LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2006

ÁRSFRÁGREIÐING

LATIN
LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM
sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
"um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

NOVEMBER 2007

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
WWW.LG.FO

Innihaldsyvirlit

1 INNGANGUR 7

2 FÍGGJARMÁL 9

2.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI O.A. 9
2.1.1 ROKNSKAPARKUNNGERÐIN (GL 1996/1 01 0-2) 9
2.1.2 EGNAR BÚSKAPARSKIPANIR (GL 2001/1 01 0-9) 9
2.1.3 LØNARUMSITING Á GJALDSTOVUNI (GL 1998/2 03 1-10) 11
2.1.4 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR O.T. (GL 1998/2 17 1-2) 13
2.1.5 UM ÁVÍSAR ÚTREIÐSLUR 14
2.2 FÍGGJARSTØÐAN 2006 15
2.2.1 FÍGGJARSTØÐAN IKKI FULLFÍGGJAÐ 15
2.2.2 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 15
2.2.3 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI O.A. 16
2.2.4 HØVUÐSTØL 17
2.2.5 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (GL 2007/3 01 2-8) 17
2.2.6 ÁOGN (GL 2005/3 01 3-7) 20
2.2.7 OGNARYVIRLIT (GL 2001/1 01 0-9) 21
2.2.8 TØKUR PENINGUR (GL 2005/3 01 4-4) 22
2.2.9 SKULD (GL 2005/3 02 2-3) 24
2.3 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM O.A. 25
2.3.1 ALMENT UM INNANEFTIRLIT Á TOLL- OG SKATTSTOVU FØROYA 25
2.3.2 UMSITING AV MVG, INNANEFTIRLIT O.A (GL 2006/ 2 4 5-11) 27
2.3.3 MVG-EFTIRSTØÐUR (GL 1997/2 4 5-5) 27
2.3.4 FRAMLEIÐSLUAVGJALD (GL 1999/2 04 6-6) 28
2.3.5 FERÐAAVGJALD (GL 2002/2 04 6-8) 28
2.3.6 VEGSKATTUR (GL 2004/2 04 6-9) 28
2.3.7 KASSAEFTIRLIT (GL 2007/2 04 0-15) 29
2.3.8 TRYGDARGRUNNURIN (GL 1998/2 09 1-2) 29
2.3.9 STUÐUL TIL FERÐAÚTREIÐSLUR OG TIL DUPULT HÚSARHALD (GL 2004/2 07 9-1) 30
2.3.10 STUÐUL TIL RENTUÚTREIÐSLUR AV LÁNUM (GL 1997/2 03 9-5) 31
2.3.11 INNFLUTNINGSGJØLD, EFTIRLITSVIRKSEMI (GL 2001/2 04 5-7) 33
2.3.12 BRENNIOLJUGJALD (GL 2002/2 04 5-8) 34
2.3.13 FAS-AFTURBERING (GL 2005/2 15 3-6) 35
2.3.14 GRANNSKOÐAN AV LØNARHÆDDARAVGJALDI (GL 2004/2 04 5- 10) 36
2.3.15 AVGJALD AV KAPITALEFTIRLØNUM (GL 2007/2 04 2-4) 38
2.3.16 KERVISSKOÐAN (GL 1996/2 04 9-2 OG GL 2005/2 04 9-4) 41

3 LØGMANSFYRISITINGIN 43

3.1 SAMSKIFTISÚTREIÐSLUR HJÁ LANDSSTÝRINUM (GL 1998/2 02 9-5) 43
3.2 UM LÓGARSMÍÐ (GL 2003/2 07 1-4) 43
3.3 STJÓRNAN AV KT OG KT-TRYGD 44

4 FISKIVINNA 45

4.1 GRANNSKOÐAN AV FISKIMÁLARÁÐNUM (GL 2007/2 14 1-6) 45
4.2 LØNJAVNINGARSTOVAN (GL 2003/2 14 4-7) 45

5 VINNUMÁL 47

5.1 STJÓRNAN AV KT OG KT-TRYGD 47
5.2 GRANNSKOÐAN AV YMISKUM STOVNUM: 47
5.2.1 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (GL 2007/2 08 2-5) 49
5.2.2 ARBEIÐSEFTIRLITIÐ (GL 2007/2 09 2-2) 49
5.2.3 JARÐFEINGI (GL 2007/2 12 3-2) 50
5.2.4 AKSTOVAN (GL 2007/2 16 9-8) 50
5.2.5 SKRÁSETING FØROYA (GL 2007/2 05 9-7) 50
5.3 KASSAEFTIRLIT Á SKRÁSETING FØROYA 50
5.4 BÚNAÐARSTOVAN (GL 2006/2 13 2-6) 51
5.5 SØLA AV LANDSJØRÐ (GL 2006/2 13 2-6) 51
5.6 LANDBÚNAÐARSTUÐUL (GL 2006/2–13 2-6) 57
5.7 P/F FISKAALING OG HAVBÚNAÐARROYNDIR (GL 2002/2 15 3-4) 58
5.8 LANDSVERK (GL 2002/2 16 1-2) 59
5.9 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (GL 2000/2 03 9-9) 61

6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 63

6.1 GRANNSKOÐAN AV YMISKUM STOVNUM: 63
6.1.1 TJÓÐPALLUR FØROYA (GL 2007/2 11 4-2) 65
6.1.2 FØROYA STUDENTASKÚLI (GL 2003/2 10 3-9) 65
6.1.3 STUDENTASKÚLA- OG HF-SKEIÐI Í EYSTUROYNNI (GL 2003/2 10 3-8) 65
6.1.4 VINNUHÁSKÚLIN (GL 2006/2 10 4-13) 65
6.1.5 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI (GL 2004/2 10 4-11) 66
6.1.6 FØROYA LÆRARASKÚLI (GL 2004/2 10 4-12) 67
6.1.7 SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA (GL 2007/2 10 4-14) 67
6.1.8 RÁSIN, EFTIRSKÚLIN Í SALTANGARÁ (GL 2004/2 10 2-5) 67
6.2 FÓLKASKÚLIN (GL 2002/2 10 2-3) 67
6.3 YRKISSKÚLAR (GL 2000/2 10 3-4) 69
6.4 SAMSKIPAN AV VIRKSEMINUM HJÁ SJÓMANSSKÚLUNUM (GL 2000/2 10 4-5) 70
6.5 FØROYA LÆRARASKÚLI (GL 2004/2 10 4-12) 70
6.6 STUÐUL TIL PRIVATAR SKÚLAR (GL 1996/2 10 5-1) 71
6.7 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (GL 2001/2 10 9-5) 72
6.8 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (GL 2001/2 10 9-7) 72
6.9 LISTASAVN FØROYA (GL 2002/2 11 2-8) 73
6.10 UMSITING AV STUÐULSJÁTTANUM (GL 1996/2 11 9 -1) 73
6.10.1 ÍTRÓTTASAMBAND FØROYA 73
6.10.2 FØROYA UNGDÓMSRÁÐ (FUR) 74
6.10.3 MENTAMÁLARÁÐIÐ (TILTØK FYRI BØRN OG UNG) 74
6.10.4 AÐRAR STUDNINGSJÁTTANIR 75
6.10.5 SKATTLIG VIÐURSKIFTI 75
6.10.6 ALMENT UM STUDNINGSLÓGGÁVU 75
6.10.7 ALMENT UM STUDNINGSUMSITING 76

7 INNLENDISMÁL 79

7.1 GRANNSKOÐAN AV UMHVØRVISSTOVUNI (GL 2007/2 05 9-8) 79
7.2 ÍTRÓTTAVEDDING (GL 2001/2 02 1-3) 79
7.3 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN (GL 2001/2 02 1-3) 82
7.4 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI HJÁ KOMMUNUNUM (GL 2002/2 02 3-1) 83

8 ALMANNA- OG HEILSUMÁL 87

8.1 KT-VIÐURSKIFTI Á ALMANNASTOVUNI (GL 2004/2 07 1-5) 87
8.2 KT-TRYGD INNAN NÆRVERKIÐ (GL 2004/2 07 4-16) 92
8.3 ALMANNASTOVAN (GL 2004/2 07 1-5) 93
8.4 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (GL 2000/2 07 2-5) 94
8.5 ALMANNAPENSJÓNIR (GL 2004/2 07 2-8) 95
8.6 PERSÓNLIG VIÐBÓT TIL PENSJÓNISTAR (GL 2004/2 07 2-8) 96
8.7 ANSINGARSAMSÝNING (GL 2002/2 07 3-7) 97
8.8 FORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2006/2 07 3-11) 97
8.9 ENDURBÚGVINGARÚTREIÐSLAR (GL 2006/2 07 3-11) 100
8.10 STUÐUL TIL HEILIVÁG (GL 2003/2 07 3-11) 102
8.11 GJALD FYRI HEIMAHJÁLP Í SAMBANDI VIÐ UMLÆTTING (GL 2004/2 07 4-14) 103
8.12 ALMANNAPENSJÓN Á STOVNUM (GL 2004/2 07 4-14) 103
8.13 HEIMATÆNASTAN (GL 2004/2 07 4-15) 104
8.14 TRIVNAÐARTÆNASTAN (GL 2004/2 07 4-16) 104
8.15 FØROYINGAR Á STOVNI Í DANMARK O.A. (GL 2004/2 07 4-16) 106
8.16 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (GL 2004/2 07 4-17) 107
8.17 STUDNINGUR TIL ALV (GL 1998/2 07 5-1) 108
8.18 SJÚKRAKASSAR (GL 2001/2 08 3-1) 109
8.19 YMISKAR HEILSUSKIPANIR (GL 2005/2 08 3-3) 109
8.20 FYRIBYRGINGARRÁÐIÐ (GL 2005/2 08 3-3) 110

9 FYLGISKJAL I: UPPRIT UM UMSITING AV STUÐULS-JÁTTANUM UNDIR MENTAMÁLARÁÐNUM 111

10 FYLGISKJAL II: UPPRIT UM STUÐUL TIL PRIVATAR SKÚLAR 149

11 FYLGISKJAL III: SPURNABLAÐ TIL STOVNAR 163

1 Inngangur

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína, í sambandi við at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2006 fyri Løgtingið til samtyktar.

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,

at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,

at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,

at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um,

at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Fyri hvørt málsøki er í frágreiðingini tikið samanum úrslitið av grannskoðanini av stovnum og skipanum. Frágreiðingin er løgd fyri avvarðandi landsstýrismann til viðmerkingar, uttan so at brævaskifti áður hevur verið um tey mál, sum eru umrødd í frágreiðingini. Í frágreiðingina hava vit tikið við møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til.

Í ársfrágreiðingini er eisini víst á, í hvønn mun viðurskifti eru komin í rættlag, ið vórðu umrødd í seinastu ársfrágreiðing, ið varð latin løgtingsgrannskoðarunum 12. januar 2007.

Umframt ársfrágreiðingina hevur Landsgrannskoðanin í oktober og í november 2007 latið løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um:

- frávik millum játtan og nýtslu o.a
- ávísar útreiðslur
- ávísar stovnar og grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap
- stjórnan av KT og KT-trygd
- einskiljingar o.a.

Argir, 14. november 2007

Leivur Harryson

2 Fíggjarmál

2.1 Roknskaparviðurskifti o.a.

2.1.1 Roknskaparkunngerðin (GL 1996/1 01 0-2)

Vit hava í áravís mælt Fíggjarmálaráðnum til at endurskoða roknskaparkunngerðina.

Vit hava eisini víst á, at Fíggjarmálaráðið ongantíð hevur álagt stovnum at skráseta t.d. framleiðslu og tíðarnýtslu í innanvirkis roknskapum samsvarandi § 7 í kunngerðini.

Seinnu árini hava Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan arbeitt við at dagføra roknskaparkunngerðina, og 14. mars 2007 varð nýggj roknskaparkunngerð lýst, við m.a. gjøllari reglum um "mál- og avriksstýring."

2.1.2 Egnar búskaparskipanir (GL 2001/1 01 0-9)

Sambært § 4, stk. 3, í roknskaparkunngerðini hava allir stovnar skyldu at nýta Búskaparskipan Landsins. Sambært § 4, stk. 4, skal Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan gera eina ætlan fyri, hvussu teir stovnar verða tiknir við, sum liggja uttan fyri Búskaparskipan Landsins tann dagin, kunngerðin kom í gildi (1. januar 1997).

Sambært § 4, stk. 5, kann Fíggjarmálaráðið eftir umsókn loyva stovnum við serligum tørvi at nýta sína egnu búskaparskipan heilt ella lutvíst. Loyvið er tó treytað av, at *"skipanin lýkur tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri Búskaparskipan Landsins"*, og at ein skrivlig rakstraravtala, sum neyvari útgreinar treytirnar fyri dátusamskifti o.ø., verður gjørd millum Føroya Gjaldstovu og viðkomandi stovn.

Vit hava fleiri ferðir víst á, at hesar reglur als ikki verða hildnar, hóast talan er um stórar og umfatandi skipanir. Vantandi samskipan og stýring hevur helst fört til ov nógvar "egnar búskaparskipanir", m.a. tí at stovnar ofta halda seg hava ein heilt serligan tørv. Fleiri broytingar og tillagingar eru gjørdar í KT-skipanunum, uttan at Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan framman undan hevur fingið nakað at vita.

Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir víst á:

> *"at nógvir landsstovnar/-grunnar nýta nógvar og ymiskar KT-skipanir at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, debitorar o.a., og tá ræður um KT-trygd, er verandi KT-bygnaður eitt tað størsta vandamálið.*
>
> *Peningur og starvsfólkaorka verða tí ikki nýtt á skynsaman hátt, og Búskaparskipan Landsins verður ikki gagnnýtt í tann mun, ætlanin var. Fíggjarmálaráðið hevur tikið fleiri stig til at bøta um støðuna. Løgtingsgrannskoðararnir vilja enn eina ferð mæla til at gera eina ítøkiliga langtíðarætlan fyri, hvussu roknskaparviðurskiftini, út frá einum heildarsjónarmiði, kunnu um- og samskipast, soleiðis at umsitingin verður bíligari og betri."*

Landsstýrismaðurin helt í desember 2004 tað hevði verið skilagott, í einari skynsamari langtíðarráðlegging, at lagt niður fleiri av smærru búskaparskipanunum, og í staðin nýtt Búskaparskipan Landsins í størri mun. Fíggjarmálaráðið hevði reist spurningin mótvegis hinum aðalráðunum.

Í juni 2006 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin, hvat síðani var hent í málinum, og hvørjar ætlanir hann hevði. Landsstýrismaðurin vísti til eina frágreiðing frá Gjaldstovuni. Gjaldstovan helt ikki nakað munagott vera hent. Tríggir smærri stovnar afturat brúka Búskaparskipan Landsins, og nakrir hava tikið Felags lønarskipanina í nýtslu; men samstundis hevur Almanna- og Heilsumálaráðið góðkent, at tveir smærri stovnar, sum eru tiknir við sum rakstrarjáttan, nýta egnar

búskaparskipanir, uttan at Gjaldstovan formliga er kunnað um tað. Gjaldstovan helt, at landsfyritøkur, sum eru vinnuligar fyritøkur við t.d. vørusølu, goymslu, innkeypi og kassaterminalum, kunnu hava egnar búskaparskipanir.

Gjaldstovan vísti á, at Almannastovan er í holt við at gera kravfestingar til eina størri loysn, sum m.a. snýr seg um at fáa viðurskiftini við Búskaparskipan Landsins formliga í rættlag. Tað fer at taka nøkur ár, og er sjálvandi treytað av, at peningur verður játtaður til endamálið.

Samanumtikið heldur Gjaldstovan seg ikki kunna gera annað enn at hyggja at, hvussu leikur fer. Sambært Gjaldstovuni eru tað fyrst og fremst aðalráðini, sum hava ábyrgdina av, at viðurskiftini formliga eru røtt, og nú 10 ár eru liðin, síðani krøvini um skipað viðurskifti á roknskaparøkinum vórðu sett, er torført framhaldandi at hava undanførslur.

Landsverk

Í september 2006 var fundur millum Fíggjarmálaráðið, Vinnumálaráðið, Gjaldstovuna og Landsverk, í sambandi við at Landsverk hevur tikið í nýtslu og tillagar "egna" Navision búskaparskipan uttan at biðja Fíggjarmálaráðið um formligt loyvi sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini. Landsverk var av teirri fatan, at Gjaldstovan kundi ikki nøkta tann tørv, stovnurin hevði á búskaparskipan, sum kundi avloysa "egnu búskaparskipanirnar".

Vinnumálaráðið boðaði í desember 2006 frá, at arbeitt verður við at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

Í september 2007 hevur Gjaldstovan kunnað um, at Vinnumálaráðið hevur biðið Gjaldstovuna góðkenna loysnina, sum Gjaldstovan í løtuni ikki kennir. Gjaldstovan ger vart við, at skal hon fara inn í eina góðkenningartilgongd, krevur tað tíð, og eru aðrar uppgávur í løtuni raðfestar hægri.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum kunnað um, at gongd er í málinum. Í oktober 2007 hevur fundur verið millum Landsverk og Gjaldstovuna um málið. Har varð serliga umrøtt, hvussu Navision búskaparskipan kann samskipast við Búskaparskipan Landsins. Partarnir vóru samdir um at arbeiða víðari við málinum, við tí í hyggju at finna eina loysn.

Vinnuskúlar

15. apríl 2003 fingu vinnuskúlarnir - t.e. Tekniski skúli í Tórshavn og Føroya Handilsskúli - fráboðan frá Mentamálaráðnum um, at Fíggjarmálaráðið hevði gjørt av, at vinnuskúlarnir skuldu nýta Búskaparskipan Landsins. Síðani tá hava vinnuskúlarnir samskift við Gjaldstovuna um, hvussu teir verða tiknir við í Búskaparskipan Landsins.

Landsgrannskoðanin spurdi Mentamálaráðið, hví hetta mál ikki var loyst enn, og hvørjar ætlanir vóru um at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

Í oktober 2006 gjørdi Mentamálaráðið skúlarnar varugar við, at tað er Fíggjarmálaráðið, ið hevur avgerðarrætt í hesum máli, og at teir skulu fylgja boðunum frá Gjaldstovuni.

Í áliti sínum til uppskotið til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið 6. mars 2007, sigur Fíggjarnevndin m.a.:

> *"Løgtingsgrannskoðararnir vísa í uppskotinum á, at tað framvegis eru nógvir stovnar/grunnar, ið brúka egna búskaparskipan og framvegis hendir, at stovnar frá teirra aðalráði fáa loyvi til at stovnseta egnar búskaparskipanir uttan góðkenning frá Gjaldstovuni. Hetta er í stríð við roknskaparkunngerðina. Fíggjarnevndin heldur eins og løgtingsgrannskoðararnir, at hetta er átaluvert.*

Tað er skylda hjá hvørjum landsstýrismanni at síggja til, at stovnar/grunnar, ið eru undirlagdir honum, nýta Búskaparskipan Landsins. Í hesum sambandi skal Fíggjarnevndin vísa á § 33, stk. 3 í stýrisskipanarlógini um, at løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt."

Í september 2007 hevur Gjaldstovan greitt frá, at als einki samskifti er millum partarnar. Gjaldstovan setti síðsta ár starvsfólkaorku av til uppgávuna. Sambært roknskaparkunngerðini er tað Mentamálaráðið, sum hevur ábyrgdina av støðuni. Spurningurin er, hvørt tað er rætt at rinda pening út til skúlarnar, nú teir hava sett seg upp ímóti at halda lógina, sum er ein av treytunum fyri fáa pengarnar. Gjaldstovan hevur gjørt tað hon kann. Nú er Gjaldstovan upptikin langa tíð við øðrum verkætlanum, so onkur má taka ábyrgdina av hesari støðuni.

2.1.3 Lønarumsiting á Gjaldstovuni (GL 1998/2 03 1-10)

Lønarstovan á Gjaldstovuni umsitur og rindar út lønir hjá nógvum landsstovnum. Á deildini arbeiða deildarleiðari og 3 starvsfólk.

Lønargrundarkort

Vanliga sendir lønardeildin á Gjaldstovuni eina ferð um árið øllum stovnsleiðarum lønargrundarkortini hjá starvsfólkunum at góðkenna. Stovnsleiðarin skal kanna, um samsvar er millum formligu setanarviðurskiftini og tær í lønarskipanini skrásettu upplýsingar.

Gjaldstovan sendi ikki lønargrundarkortini út í 2006, tí hjá fleiri fakfeløgum vóru lønarsamráðingarnar fyri 2005 framvegis ikki avgreiddar/lidnar.

Í januar 2007 sendi Gjaldstovan aftur stovnunum lønargrundarkort at góðkenna. Í skrivinum stendur m.a.: *"Hevur Gjaldstovan einki frætt frá stovninum áðrenn 1. mars 2007, mugu upplýsingarnar metast at vera rættar.*

Tey grundarkort, ið ikki koma inn aftur áðrenn 1. mars, verða skrásett sum røtt, og støðan verður gjørd upp yvir fyri viðkomandi aðalráð og Landsgrannskoðanini".

Sambært Gjaldstovuni vórðu umleið 1800 lønargrundarkort send út, 35 komu aftur við viðmerkingum, broytingum og feilfráboðanum.

Lønargrannskoðan úti á stovnunum

Í sambandi við vitjanir okkara úti á fleiri stovnum í 2007, kannaðu vit, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking, stigum o.ø. í lønarskipanini á Gjaldstovuni. Hesar stakroyndir benda á, at lønarsatsir, útrokningar o.a. í lønarskipanini eru rættar.

Grannskoðan av Felags lønarskipanini

Í 2006 fór Landsgrannskoðanin undir at ráðleggja grannskoðanina av lønarumsitingini á Gjaldstovuni, herímillum eisini grannskoðanina av Felags lønarskipanini. Ætlanin var at meta um innaneftirlitið, m.a. við at kanna, í hvønn mun ásetingarnar í roknskaparreglugerðini og innanhýsis leiðbeiningum verða fylgdar, og um eftirlitsvirksemið virkar sum ásett/ætlað. Í 2007 hava vit havt fundir og samskift við Gjaldstovuna um Felags lønarskipanina, og heldur arbeiðið fram í 2008.

Stovnar, sum skráseta í Felags lønarskipanini

Stovnar e.l. sum sjálvir skráseta í Felags lønarskipanini, kunnu verða skrásettir sum "lønarskrivstovur", við ábyrgdarøkjum, ella sum "deildir" undir "lønarskrivstovu".

"Deildirnar" eru ikki sjálvstøðug økir og hava avmarkaða atgongd til Felags lønarskipanina. Stovnarnir hava verið á skeiði í at nýta lønarskipanina.

Teir stovnar e.l., sum eru skrásettir sum "lønarskrivstovur" í Felags lønarskipanini eru:

- Mentamálaráðið/Fólkaskúlaløn og Musikkskúlaskipanin, sum er ein "deild" undir Mentamálaráðnum.
- Almanna- og Heilsumálaráðið.
- Almannastovan. Stuðulskipanin fyri børn er skrásett sum ein "deild" undir Almannastovuni.
- Nærverkið (fyrr Heimarøktin og Serforsorgin), enn bert nakrir fáir starvsbólkar.
- Suðuroyar Sjúkrahús, enn bert nakrir fáir starvsbólkar.
- Klaksvíkar Sjúkrahús, enn bert starvsfólk í umsitingini.
- Gjaldstovan. Landsverk og Lønjavningarstovan eru skrásettir sum "deildir" undir Gjaldstovuni

Gjaldstovan umsitur við Felags lønarskipanini løn fyri 168 stovnsnummur, íroknað Gjaldstovuna sjálva. Samlaða talið á stovnsnummurum, tá "lønarskrivstovurnar" eru taldar við, er 192 og 2.665 ársverk

Heilsuverkið koyrir í dag við einari forskipan/vaktplanskipan. Arbeitt verður við at umleggja hendan partin, so at vaktplanskipan og Felags lønarskipanin kunnu arbeiða saman.

Web-løn

Skipanin til Web-løn er sett í verk. Tað ber í sær, at fleiri stovnar, sum Gjaldstovan rindar út lønir fyri, nú sjálvir kunnu tøppa inn einfaldar skrásetingar, t.d. tímalønir, fundarpengar og koyripengar. Skilt verður millum skrásetara og leysgevara. Tá ið stovnurin hevur leysgivið sínar skrásetingar, sæst tað aftur í einari journal í Felags lønarskipanini, og Gjaldstovan avgreiðir síðani tað, sum er leysgivið.

Skipanarligur skilnaður

KT-deildin á Gjaldstovuni stovnar nýggjar brúkarar, upprættar ábyrgdarøki, uppsetir atgongdarstýring hjá brúkarum, skrásetir stovnsnummur, staðarnummur og annað. Tá ið eitt starvsfólk verður stovnað sum brúkari við fullum rættindum í Felags lønarskipanini, hevur viðkomandi rætt til at skráseta, rokna, upprætta, broyta, koyra og gjalda út. Tey við fullum rættindum eru brúkararnir á lønarstovuni á Gjaldstovuni. Lønarkontórini hava hvør sær ynskt avmarkingar í uppseting fyri brúkarar. Nakrir kunnu umsita lønir og aðrir kunnu gjalda út lønirnar og uppaftur aðrir kunnu bert spyrja uppá lønir.

Vanliga mannagongdin á lønardeildini er, at tá ið ein hevur skrásett, verður skrásetingin kekkað/kannað av øðrum starvsfólki - ofta av 2 í felag. Soleiðis at hann sum kekkar ikki er sami, sum hevur skrásett.

Starvsfólkini á lønardeildini hava rættindi at broyta stamdátur

Av teimum umleið 60 brúkarum, sum eru skrásettir í Felags lønarskipanini, kunnu bert tey 4 starvsfólkini á lønardeildini umsita grundskráir, t.e. grundtalvur/sáttmálar. Starvsfólk á stovnum, har lønaravgreiðslan er miðfirrað, kunnu bara spyrja.

Rættleiki í grundskráum er avgerandi fyri rættar lønarútgjaldingar – tí verða tær kannaðar serliga væl. Ofta er talan um árligar dagføringar, t.d. 1. oktober, tá ið allar læraraløninirnar vórðu broyttar. Eru hesar upplýsingar skeivar, eru allar lønarútgjaldingar skeivar.

Stovnan (og viðlíkahald) av fastari løn

Tá ið lønardeildin stovnar ein nýggjan persón í Felags lønarskipanini, verður "persónur" heintaður frá "Individ" (sum er navnaskráin í Búskaparskipan Landsins) til Felags lønarskipanina, t.v.s. navn, bústaður og p-tal. Mannagongdin er tann, at persónurin verður stovnaður eftir boðum frá aðalráði ella stovni (við lønargjaldsumbøn). Tá talan er um nýggjan persón, krevur lønardeildin, at setanarskriv eisini verður sent við lønargjaldsumbønini. Er talan um at "góðkenning er kravd" (frá t.d. Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum), krevur lønardeildin harafturat, at skjalprógv/skjalsannan er fyri "góðkenning".

Broytingar í starvsaldri verða gjørdar maskinelt. "Anciennitetskoyring" verður gjørd hvønn mánað.

Eftirlit í sambandi við lønarútgjaldingar

Í útgjaldsskipanini eru ymisk eftirlit. Útgjaldsskipanin hevur sjálvvirkandi eftirlit, sum forða fyri m.a. ov stórum upphæddum:

- hesaferð,
- seinastu 30 dagarnar og
- seinastu 12 mánaðirnar.

Harafturat er Felags lønarskipanin sett upp við nøkrum sjálvvirkandi eftirlitum, t.d. kunnu 2 eins mánaðarlønir til sama persón ikki fara ígjøgnum sama mánað.

2.1.4 Tænastumannaeftirløn o.t. (GL 1998/2 17 1-2)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2005 vísti Landsgrannskoðanin á, at umsitingin av tænastumannaeftirlønum er ikki nøktandi.

Vantandi útrokning/meting av samlaðu eftirlønarskylduni

Í 2005 vóru útreiðslurnar til tænastumannaeftirlønir o.t. um 50 mió.kr. netto, sum er einar 29 mió.kr. meira enn í 1997. Sambært landsroknskapinum eru tænastumannalønir o.t. í sama tíðarskeiði vaksnar úr um 194 mió.kr. í 257 mió.kr.

Einki samlað yvirlit finst yvir, hvussu nógvir tænastumenn o.a. hava vunnið sær eftirlønarrætt, hvussu nógvir teirra framvegis eru í tænastumannastarvi, eru farnir í annað starv, ella hvussu nógvir fáa eftirløn. Vit royndu at leita fram upplýsingar og gjørdu eitt ávegis yvirlit í mars 2005, sum skal vera tikið við fyrivarni:

- Tænastumenn í starvi: 658
- Tænastumenn, farnir í annað starv: 212
- Tænastumenn o.a., ið fáa eftirløn: 344

Samanlagt var talan um umleið 1200 tænastumannamál. Harafturat koma løgtings- og landsstýrismenn, ið eisini fáa eftirløn sum tænastumenn. Vit vístu á fleiri vandamál m.a.:

at samlaðu eftirlønarskyldurnar hjá landinum eru ikki tiknar við í landsroknskapinum,

at eftirlønaraldur o.a. hjá tænastumonnum er ikki skrásett á ein skipaðan hátt,

at fullfíggjað yvirlit er ikki yvir allar tænastumenn, ið eru ella hava verið í starvi,

at vissa er ikki fyri, at øll, ið hava eftirlønarrættindi, fáa eftirløn, herímillum hjúnafelagar og børn o.s.fr., og vandi er fyri at fleiri av órøttum verða gloymd burtur,

at ymiskt er, hvar á fíggjarlógini eftirlønarútreiðslur verða játtaðar,

at landið ikki hevur nóg gott yvirlit yvir verandi og komandi eftirlønarskyldur og eftirlønarútreiðslur,

at ongar metingar finnast av vøkstrinum í landsins útreiðslum til tænastumanna-eftirlønir komandi 5, 10 ella 20 árini,

at metingar av samlaðu, kapitaliseraðu eftirlønarskylduni eru ikki gjørdar.

Vit mæltu til at bøta um hesi viðurskifti.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið í januar 2007, stendur m.a. um tænastumannaeftirlønir, at:

"Umsitingin av tænastumannaeftirlønum er ikki nøktandi. Talan er um vantandi roknskaparreglugerð/innaneftirlit, vantandi skráseting av eftirlønarrætti hjá tí einstaka, ymiskar bókingarhættir, vantandi uppgerð av samlaðu eftirlønarskylduni, árliga eftirlønarskyldan sæst ikki í landsroknskapinum, og umsitingarbygnaðurin er óhóskandi.

Nøkur tiltøk eru sett í verk, men langt er eftir á mál (s. 23-25). Arbeiðið at samskipa umsitingina av tænastumannaeftirlønum hevur gingið striltið. Løgtingsgrannskoðararnir mæla staðiliga landsstýrismanninum til at tryggja, at ábøtur verða framdar á hesum øki í seinasta lagi á heysti 2007, sum áður fráboðað."

Tiltøk, ið Fíggjarmálaráðið hevur sett í verk at samskipa umsitingina

Í oktober 2005 greiddi Fíggjarmálaráðið frá, at Landsstýrið hevði gjørt av, at umsitingin av lønum og tænastumannaeftirlønum hjá landinum skuldi verða samskipað. Ætlanin var, at eini 15 fólk vórðu savnað í eina fyrisitingarliga eind. Sambært Fíggjarmálaráðnum var neyðugt, at arbeiðið varð skipað við einum verkætlanarleiðara. Ein felags lønarfyrisiting skuldi verða komin uppá pláss í seinasta lagi á heysti 2007.

Spurdur um gongdina í málinum, svaraði landsstýrismaðurin í august 2007, at gjørt er eitt uppskot um at savna fyrisitingina av tænastumannaeftirlønum á Gjaldstovuni. Tað hevur gingið striltið við at fáa undirtøku fyri hesum, men tað sær út til, at tað eydnast í formi av einum parti av játtanunum hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum og Mentamálaráðnum, og við at játta av nýggjum ein part.

Landsstýrismaðurin greiddi eisini frá, at eitt fólk á Gjaldstovuni í gott hálvt ár hevur arbeitt við at gjøgnumganga øll mál við tí fyri eygað at skráseta eftirlønaraldurin. Tað eru nøkur ivamál, sum verða viðgjørd. Sum landsstýrismaðurin skilir, arbeiðir Almanna- og Heilsumálaráðið og Mentamálaráðið við hesum spurningum á teirra øki.

Sambært landsstýrismanninum hevur Gjaldstovan harumframt ment lønarskipanina, so eftirlønaraldur kann verða roknaður út og skrásettur. Arbeiðið at skráseta í Felags lønarskipanini er í gongd.

2.1.5 Um ávísar útreiðslur

Í februar 2006 læt Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum eina frágreiðing um reglur og siðvenjur viðvíkjandi ávísum útreiðslum, ið liggja á markinum til privatútreiðslur ella fríar ágóðar.

Løgtingsgrannskoðararnir høvdu biðið um kanningina, ið m.a. fevnir um ferða-, samskiftis-, umboðanar- og starvsfólkaútreiðslur o.t.

Í seinastu uppskotunum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir síðani mælt landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at tryggja, at hóskandi og fullgreiðar reglur á hesum øki verða ásettar og hildnar.

Løgtingsgrannskoðararnir hava eisini mælt løgmanni til at greiða ivaspurningar um heimild og fríar ágóðar, tá ræður um samskiftisútreiðslur hjá løgmanni og landsstýrismonnum.

Í serstakari **frágreiðing "um ávísar útreiðslur"**, latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007 hava vit m.a. tikið saman um og greitt frá samskifti okkara við landsstýrismannin í fíggjarmálum um hesi viðurskifti.

Endamálið við hesari frágreiðing er at kunna løgtingsgrannskoðararnar um, hvørjar broytingar eru framdar, í mun til frágreiðingina, ið latin var løgtingsgrannskoðarunum í februar 2006.

2.2 Fíggjarstøðan 2006

2.2.1 Fíggjarstøðan ikki fullfíggjað

Í serstakari **frágreiðing "um ávísar stovnar og grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap"**, latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007 hava vit m.a. víst á, at fleiri landsstovnar ikki eru við í fíggjarstøðuni.

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava seinastu 10-15 árini javnan gjørt vart við, at fleiri stovnar/-grunnar eru ikki við á fíggjarlógini og í landsroknskapinum, og at tað er ivasamt, um grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan verða hildnar.

Í frágreiðingini verður m.a. víst á, at um støðið verður tikið í álitinum frá Fíggjarmálaráðnum í 2001, eru grunnar við einari samlaðari eginogn um 2,3 mia.kr. ikki við á fíggjarstøðuni.

Partabrøvini í landsroknskapinum eru helst undirmett við um 0,4 mia.kr., og sokallaðu "eksternu grunnarnir", um 0,3 mia.kr., eru ikki taldir við í fíggjarstøðuni.

Samanlagt eru virðir fyri einar 3 mia.kr., netto, ikki tald við í fíggjarstøðuni 2006.

Í frágreiðingini verður m.a. greitt frá:

- søguligu gongdini í hesum drúgva máli
- hvørjar stovnar/grunnar ivamálini snúgva seg um
- hvussu fíggjarstøðan í landsroknskapinum 2006 kundi verið sett upp
- hvørjar inntøkur, skattir og útreiðslur liggja uttanfyri fíggjarlóg og landsroknskap
- hvussu ymiskar lógarásetingarnar eru um roknskap og grannskoðan

Landgrannskoðanin vónar, at frágreiðingin kann vera við til at varpa ljós á og loysa nøkur av ivamálunum, ið eftir eru á hesum øki.

2.2.2 Góðkenningarmannagongdir

Mánaðarroknskapurin

Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini er álagt stovnsleiðarum mánaðarliga at góðkenna játtanarroknskapin mótvegis aðalráðunum. Á serligum góðkenningarskjali skal stovnsleiðarin sambært pkt. 2.1 í roknskaparrundskrivinum m.a. vátta:

> *"at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, herímillum at allar peningastovnskontur, sum stovnurin hevur ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum; at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp; at samsvar er millum búskaparskipanir landsins og egnar búskaparskipanir, at alt er stemmað av,*

sum ásett í roknskaparreglugerðini, og at ásettu mannagongdirnar í roknskaparreglugerðini eru hildnar. Harafturat skal verða kannað, at allar áognir, frammanundan goldnar og skyldugar upphæddir, veittar trygdir o.a. eru skrásettar í roknskapinum, so hann gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og somuleiðis av ogn og skuld við fíggjarárslok. Í átekningini skal verða kunnað um møgulig viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Tá ið játtanarroknskapurin fyri síðsta roknskaparliga ískoytisskeiðið (ársroknskapurin) er góðkendur, skal Gjaldstovan hava avrit av góðkenningarskrivinum."

Greinaroknskapurin

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok á serligum góðkenningarskjali at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálaráðnum.

Greinaroknskapurin er ein samandráttur av játtanar/mánaðarroknskapunum undir einari grein. Aðalstjórarnir skulu vegna landsstýrismannin vátta, at játtanarroknskapirnir, ið liggja undir greinaroknskapinum, allir eru góðkendir av stovnsleiðarum sambært galdandi reglum.

Á góðkenningarskjalinum skulu aðalstjórarnir kunna Fíggjarmálaráðið um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningarskjølum og møguligum fylgiskjølum. Henda skipan er eisini við til at tryggja, at gjørt verður vart við møguligar feilir og munir, og at teir verða rættaðir so hvørt.

Í 2006 hava flestu aðalráðini hildið reglurnar, men einki aðalráð heldur tíðarfreistina. Sambært yvirliti, sum Gjaldstovan hevur dagført í oktober 2007, hava Fíggjarmálaráðið, Vinnumálaráðið og Mentamálaráðið ikki sent Fíggjarmálaráðnum góðkendan greinaroknskap fyri fleiri tíðarskeið í 2006.

Gjaldstovan hevur ikki móttikið váttaðan greinaroknskap frá Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum fyri desember 2006 og tey ískoytisskeið sum eru at meta sum ársgreinaroknskapur.

Sambært yvirlitinum, sum Gjaldstovan hevur dagført í oktober 2007, hevur Løgmansfyrisitingin higartil hildið reglurnar í 2007, meðan Fíggjarmálaráðið, Mentamálaráðið og Almanna- og Heilsumálaráðið ongan greinaroknskap hava sent Gjaldstovuni í 2007.

Ársroknskapurin

Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapurin, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað. Eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, skal vera kunnað um tey á góðkenningarskjalinum.

Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningaroyðubløðum og møguligum fylgiskjølum og skrásetir tey, so hvørt stovnarnir hava sent oyðubløðini inn. Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni eru umleið 600 stovnsnummur í landsroknskapinum 2006.

Fíggjarmálaráðið hevur fingið góðkenningaroyðublað frá øllum stovnsleiðarum, á umleið 40 góðkenningarskjølum eru viðmerkingar. Í onkrum føri er talan um tíðaravmarkanarfeilir, tí Gjaldstovan og stovnar við egnari búskaparskipan nýta ymiskan uppgerðarhátt. Í flestu førum er talan um smávegis rættingar, vantandi ognarskráseting og um meira- og/ella minninýtslu.

2.2.3 Avstemman av fíggjarstøðuni o.a.

Í sambandi við gjøgnumgongd í landsroknskapinum 2006 av roknskaparpostum í fíggjarstøðuni hava vit í stóran mun bygt á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

2.2.4 Høvuðstøl

Í talvuni niðanfyri er ein samandráttur av fíggjarstøðuni við árslok 2004-2006.

mió.kr.

	2006	2005	2004
Aktiv			
Kapitalinnskot	1.108	1.575	1.576
Virðisbrøv	551	466	424
Útlán	389	370	339
Áogn o.a.	426	423	460
Tøkur peningur	1.485	1.697	1.903
Aktiv, tilsamans	**3.959**	**4.531**	**4.702**
Passiv			
Skuld	3.316	4.198	4.256
Útjavningarkonta	643	333	446
Passiv, tilsamans	**3.959**	**4.531**	**4.702**

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við á fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

2.2.5 Fíggjarligur útbúnaður (GL 2007/3 01 2-8)

Kapitalogn í landsfyritøkum

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	1.107.896	1.574.913	1.575.935

Í 2006 fevnir roknskaparposturin bert um Fíggingargrunnin frá 1992. Kapitalognin svarar til "eginognina" hjá hesum grunni. Roknskaparliga úrslitið hjá Fíggingargrunninum fyri 2006 er ikki bókað í landsroknskapinum.

Eingin allýsing finst av hugtakinum "landsfyritøka", og at júst hesin grunnur er eftir í roknskaparpostinum, er helst ein søgulig tilvild. Í nógv ár hevur Løgtingið í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, t.d. Føroya Realkreditstovnur, Húsaláns-, Bjálvingarstuðulsláns-, Íbúða- og Búnaðargrunnurin o.a. verða skrásettir í landsroknskapinum sum t.d. "Kapitalogn í landsfyritøkum o.l."

Fíggjarmálaráðið kunnaði í oktober 2005 um, at ætlanin var at taka málið upp, og at miðað varð ímóti at taka allar grunnar o.l. við sum ogn í landsroknskapinum 2005, men tað varð ikki gjørt. Landsgrannskoðanin mælti í mars 2007 til at taka henda spurning uppaftur í sambandi við landsroknskapin 2006. Sambært landsstýrismanninum verður hetta gjørt í 2007.

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at um landsstýrismaðurin heldur iva vera um, hvørt landið eigur ein stovn/grunn, ber til at taka fyrivarni fyri tí í landsroknskapinum.

Virðisbrøv

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	550.667	466.096	423.890

Broytingin frá 2005 til 2006 stavar frá hækkan av partapeningi í P/f Norðoyatunlinum, 32,5 mó.kr., P/f Atlantic Airways, 52 mó.kr., (við apportinnskoti, sí kapitalogn í landsfyritøkum), og skrásetan av partabrøvunum í P/f Tjaldur, 140 t.kr. Í 2006 eru partabrøvini í P/f Skipafelagið Føroyar 70.000 kr. seld.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum

t.kr.

Skrásett í Landsroknskapinum	2006 Upphædd	2005 Upphædd	2004 Upphædd
P/f Atlantic Airways	127.000	75.000	75.000
P/f Tjaldur	140	-	-
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347
P/f Flogsamband	-	-	1.521
P/f Fiskaaling	4.635	4.635	4.635
P/f Føroya Banki	1	1	1
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	500
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948
Nordatlantisk Turistselskab Aps.	66	66	66
P/f Norðoyatunnilin	127.500	95.000	62.500
P/f Postverk Føroya	43.000	43.000	21.500
P/f Skipafelagið Føroyar	-	70	70
L/f Skopunar Útróðrarfelag	50	50	50
P/f Smyril Line	2.760	2.760	2.760
P/f Tvøroyrar Flakavirki	-	-	820
P/f Vágatunnilin	160.300	160.300	140.300
Sp/f Ítróttavedding	20	20	20
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	4.200	4.200
Partabrøv tilsamans	**550.667**	**466.097**	**394.438**
Keypsskálaskrásett virðisbrøv, Postverk Føroya	-	-	29.453
Virðisbrøv tilsamans	**550.667**	**466.097**	**423.891**

Landið eigur allan partapeningin í 7 feløgum: P/f Atlantic Airways, P/f Fiskaaling, P/f Føroya Lívstrygging, P/f Føroya Tele, P/f Norðoyatunlinum, P/f Postverki Føroya og P/f Vágatunlinum.

Ultimo 2005 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 50 t.kr. í lutabrøvum í L/f Skopunar Útróðrarfelag. Fiskimálaráðið kunnaði í september 2003 um, at peningurin upprunaliga varð settur í felagið í 1968, og at felagið varð umskipað/endurreist í 1993, eftir at virksemið í felagnum var steðgað upp. Vit hava áður mælt Fiskimálaráðnum til at fáa greiði á, um innskotið frá 1968 er mist. (Lutabrøvini eru strikað í 2007)

Í november 2005 boðaði Vinnumálaráðið almenninginum frá, at Føroya Banki, vegna Vinnumálaráðið, skuldi selja partabrøvini, sum landskassin átti í P/f Tjaldur. Minstiprísurin, sum Vinnumálaráðið vildi hava fyri partabrøvini, var innara virðið. Navnaupphæddin á partabrøvum landskassans í P/f Tjaldur er 140.000 kr. og innara virðið 3,1 mió.kr. Partabrøvini í P/f Tjaldur eru ikki seld enn. Partabrøvini hava higartil ikki verið skrásett í landsroknskapinum, men tey eru nú skrásett í landsroknskapinum 2006.

Landið eigur 40%, 48 t.kr., av partapeningunum í Sp/f Atlanticon. Partabrøvini eru ikki skrásett í landsroknskapinum. Vinnumálaráðið hevur í september 2007 boðað frá, at tað ætlar at selja partabrøvini við at lýsa tey til sølu í einum av peningastovnunum, í fyrsta lagi til hægstbjóðandi, og í øðrum lagi ikki fyri minni enn innara virði. Partabrøvini í Sp/f Atlanticon eru ikki seld enn.

Virðismeting

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey eru keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera tó ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum 2006 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á felógunum.

Til samanberingar er innara virðið sambært ársroknskapinum hjá 10 av felógunum í yvirlitinum tilsamans um 954 mió.kr., sí yvirlitið niðanfyri:

t.kr.

2006	**Keypsvirðið**	**Innara virðið**
P/f Atlantic Airways	127.000	195.868
P/f Fiskaaling	4.635	5.792
P/f Føroya Dátusavn	200	248
P/f Føroya Lívstrygging	500	90.505
P/f Føroya Tele	77.948	327.148
Nordatlantisk Turistselskab Aps.	66	-98
P/f Norðoyatunnilin	127.500	121.353
P/f Postverk Føroya	43.000	48.564
P/f Smyril Line	2.760	3.488
P/f Vágatunnilin	160.300	161.102
Partabrøv, tilsamans	**543.909**	**953.970**

Sum víst á í yvirlitinum frammanfyri, er keypsvirðið í nógvum førum munandi lægri enn innara virðið. Í sambandi við ætlaðu einskiljingarnar av almennum fyritøkum hava vit mælt til at endurskoða verandi roknskaparreglur, og at umhugsa at fara yvir til at nýta innara virðið.

Í oktober 2005 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at ætlanin var at nýta innara virðið í landsroknskapinum 2005, men tað varð ikki gjørt.

Landsgrannskoðanin mælti í mars 2007 til at taka henda spurning uppaftur í sambandi við landsroknskapin 2006, men tað varð ikki gjørt.

Sambært landsstýrismanninum verður hetta gjørt í 2007.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari

mió.kr.

	2006	2005	2004	2003	2002
Føroya Tele	30,0	8,0	11,0	3,0	3,0
Atlantic Airways	10,0	2,0	1,0	0	0
Tilsamans	40,0	10,0	12,0	3,0	3,0

Rentu- og avdráttarfrí lán

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	203.884	208.062	187.059

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, til sjálvsognarstovnar og studningslán sambært Ll. nr. 34/1993, Ll. nr. 48/1964, Ll. nr. 42/1976 og Ll. nr. 26/1997.

Rentu- og avdráttarfríu lánini eru lækkað í 2006 við 4,2 mió.kr. netto. Eingin tilgongd var í 2006.

Útlán

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Áogn landskassans	415.577	399.921	400.598
Sett av	-230.467	-238.218	-249.001
Sambært roknskapinum	185.110	161.703	151.597

Talan er um veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán, umframt likviditetslán, sum verða umsitin av Realkreditstovninum. Harafturat er talan um eitt lán til P/f Postverk Føroya, 21,5 mió.kr., í sambandi við umleggingina av Postverki Føroya til partafelag.

Sett er av ímóti tapi. Virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum er sett til kr. 0. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Hækkingin frá 2005 til 2006 stavar í høvuðsheitum frá, at likviditetslán (lóg nr. 35 frá 1984), sum Realurin umsitur, eru hækkað við 31,4 mió.kr.

2.2.6 Áogn (GL 2005/3 01 3-7)

Goymslur

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	44.480	38.281	36.104

Talan er um vørugoymsluna hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum Landsins og Skúlabókagrunninum (Útgávuvirksemi).

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Áogn landskassans	354.781	326.543	357.818.569
Sett av	124.809	-136.685	123.747.866
Sambært roknskapinum	229.971	189.858	234.070.703

Broytingin frá 2005 til 2006 stavar í høvuðsheitum frá hækkan av vanligum landsskatti við 44,9 mió.kr., hækkan av meirvirðisgjaldi við 10 mió.kr. og lækkan av tollavgjaldi við 11,7 mió.kr.

Tíðaravmarkan

Í fleiri ár hevur Gjaldstovan vístá trupulleikan, at skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki kunnu handfara tíðaravmarkanir. Trupult er at fáa ein rættan landsroknskap, tá ið inntøkurnar verða tiknar við í landsroknskapin alt eftir, hvussu "a jour" Toll- og Skattstovan er við bókingum.

Sambært Toll- og Skattstovuni eru ongar ætlanir um tøkniligar broytingar av bókhaldsskipanini, men dentur verður lagdur á at vera "a jour" við árslok.

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	151.502	195.013	201.346

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Landsverkfrøðinginum, Strandferðsluni, sjúkrahúsunum og øðrum stovnum. "Aðrir skuldarar" er m.a. renta av inniogn í Landsbankanum, ikki avroknað yvirskot (føroyski parturin) frá danska Tjóðbankanum, endalig uppgerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur ella endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað, fyri at geva eina rætta mynd. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá Toll- og Skattstovu Føroya, kommunur o.a.

Broytingin frá 2005 til 2006 stavar í høvuðsheitum frá, at onnur áogn er lækkað 18,3 mió.kr., og at skuld hjá stovnum og myndugleikum er "lækkað" við 9,1 mió.kr.

2.2.7 Ognaryvirlit (GL 2001/1 01 0-9)

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovnunum vera eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 6. februar 2001 um roknskaparreglugerðir er ásett, at ognaryvirlit skulu verða gjørd fyri innbúgv, maskinur, bøkur og annan virðismiklan útbúnað við støði í roknskaparskjølum, og skulu tey m.a. fevna um slag, útveganarvirði, livitíð, og hvar ognin er. Vit hava fleiri ferðir vístá, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Í sambandi við vitjanir á stovnum í 2007 hava vit aftur staðfest, at stovnar ikki enn hava eitt dagført yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Í desember 2002 sendi Fíggjarmálaráðið skriv til allar stovnsleiðarar um at skráseta størri almennar ognir. Í skrivinum stóð, at sjøtul nú fór at verða settur á verkætlanina at fáa skrásett ognirnar hjá landinum og at taka upplýsingarnar við í landsroknskapin.

Í februar 2004 kunnaði Gjaldstovan um, at verkætlanin var seinkað umleið eitt ár, men at KT-skipanin, sum er partur av Búskaparskipanum Landsins, er liðug. Ætlanin var at byrja at skráseta í mars 2004 og at taka upplýsingar úr ognaryvirlitinum við í

landsroknskapin 2004. Henda ætlan helt ikki, men í november 2004 vórðu allir almennir stovnar bidnir um at senda Gjaldstovuni upplýsingar um støðisogn, t.v.s. bygningar, størri KT-útbúnað, innbúgv og aðrar størri ognir.

Í januar 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum fór at heita á starvsfelagar sínar um at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Arbeiðið hevur tó gingið striltið, og í tíðindaskrivi í desember 2006 minti Gjaldstovan á, at talan var um eitt álvarsmál og vísti á, at hóast 10 ár vóru liðin, síðani krøvini komu um at skráseta almennar ognir, er ivasamt, hvussu fullfíggjaðar hesar skrásetingar eru.

Í august 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tíverri er einki hent. Landsstýrismaðurin hevur í august 2007 sent skriv til allar aðalstjórar, har heitt verður á teir um at fáa viðurskiftini viðvíkjandi ognarskráseting uppá pláss.

2.2.8 Tøkur peningur (GL 2005/3 01 4-4)

Inniogn í Landsbankanum

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	1.093.115	1.293.051	1.474.447
Herav minstainnlán	1.500.000	1.500.000	1.485.000
Munur	-406.885	-206.949	-10.553

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 6 í Ll. nr. 57/1978 "um Landsbanka Føroya" er Landsbankin bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu eisini nýta bankan sum bankasamband. Sambært § 2 í Ll. nr. 31/1995 "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" skulu innlánini í Landsbankanum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan.

Sambært yvirlitinum frammanfyri hevur inniognin hjá landskassanum seinastu 3 árini verið niðan fyri roknaða minstainnlánið. Vit hava eisini gjørt vart við, at fleiri landsstovnar og -grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum. Vit hava fleiri ferðir áður vístá, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" ikki eru nóg greitt lýst, hvørki í lógunum ella í viðmerkingunum.

Stýring av landsins gjaldføri

Í einum uppriti í mars 2004 hevur Gjaldstovan m.a. vístá, at hóast tað er ásett í § 15 í roknskaparkunngerðini, at allar útgjaldingar skulu fara ígjøgnum Búskaparskipan Landsins, fara um 3 mia.kr., út við helvtin av øllum útreiðslum o.ø., sum eru heimilaðar á fíggjarlógini, uttanum Búskaparskipan Landsins. Sambært skrivi í mars 2005 heldur Landsbankin, at neyðugt er at støða verður tikin til málið, og at neyðugt er at fáa gjørt greiðar lógar- og umsitingarkarmar á hesum øki.

Broyting av lóggávu

Í fleiri uppskotum til samtyktar seinastu árini um at góðkenna landsroknskapirnar hava løgtingsgrannskoðararnir vístá, at útrokningin av bruttotjóðarúrtøkuni byggir á eitt leyst grundarlag, og at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" í lógini "um Landsbankan" og í lógini "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" eru ógreið. Løgtingsgrannskoðararnir hava mælt landsstýrismanninum til at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

Í januar 2002 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" fóru at verða lýst neyvari í uppskoti til broyting í lóg "um Landsbankan", sum fór at verða lagt fyri Løgtingið á heysti 2002. Einki uppskot varð tó lagt fyri Løgtingið.

Í november 2004 vísti landsstýrismaðurin á, at hann hevði gjørt av at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman í ein stovn, og at stovnurin skuldi vera á løgtingsfíggjarlógini. Ætlanin var at taka av lógirnar "um Landsbanka Føroya" og "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum". Nýggj lóg skuldi verða gjørd, har reglur fyri umsiting av gjaldføri skuldi verða ásettar.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at lógaruppskotini vóru ikki løgd fyri Løgtingið, men landsstýrismaðurin arbeiddi framvegis við at útvega sær politiska undirtøku.

Í november 2007 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at politisk semja er ikki um at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman í ein stovn.

Sambært Fíggjarmálaráðnum væntar Hagstovan at hava staðfest endaligu hagtølini um tjóðarroknskapin 2004 og 2005 um ársskiftið 2007/08. Fyrsta útgávan av tjóðarroknskapinum 2006 verður væntandi liðug umleið 1. apríl 2008.

Banka-, giro- og kassapeningur

t.kr.

Ár	**2006**	**2005**	**2004**
Sambært roknskapinum	392.372	404.379	431.010

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv "landið" tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar, við leysum/ivasomum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Omanfyristandandi upphædd fyri 2006 kann sundurgreinast í tær banka- og girokontur, sum Gjaldstovan umsitur, og tann partin av banka- og girokontum, sum aðrir stovnar umsita (vanligir landsstovnar og landsfyritøkur). Gjaldstovan umsitur kr. 230.710.357 (ella uml. 54%) av omanfyristandandi upphædd.

Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hevur Gjaldstovan í áravís vístá, at landsstovnar og -fyritøkur (t.d. Útvarp Føroya, Apoteksverkið, Húsalánsgrunnurin, Trygdargrunnurin og Rúsdrekkasøla Landsins) hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Gjaldstovan hevur sett spurningin, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum.

Í september 2006 kunnaði landsstýrismaðurin í mentamálum um, at viðvíkjandi Kringvarpinum fór hann at taka spurningin upp við leiðsluna í Kringvarpinum.

Spurdur, hvat síðani er hent í málinum, svaraði landsstýrismaðurin í juni 2007, at "*málið er ikki tikið upp við leiðsluna í Kringvarpinum enn, men málið verður fyrireikað í næstum.*"

Sambært skrivi í mars 2005 heldur Landsbankin tað vera óheppið, at landsins peningur ikki verður umsitin á ein meira skipaðan hátt. Landsbankin setir spurningin, um tað átti at verið ásett í lóg, at umsitingin av almennum peningi verður røkt á besta hátt, t.d. við einum samstarvi og ábyrgdarbýti millum Gjaldstovuna og Landsbankan, har útgjaldsskipanin hjá Gjaldstovuni er miðdepilin í almennu gjaldførisstýringini, og fíggjarumsitingin í Landsbankanum umsitur uppsparda peningin, eins og Landsbankin umsitur gjaldføri landskassans. Ístaðin fyri at hópurin av almennum krónum standa spjaddar á ymiskum bankakontum til sera lága rentu, kundi peningurin verið settur í virðisbrøv e.a. til eina munandi betri rentu.

Harafturat vísir Landsbankin á, at fastar og nøktandi mannagongdir eru, tá Gjaldstovan flytur gjaldføri millum Landsbankan og "privata bankakervið", og tá ið Toll- og Skattstovan flytur pening inn á kontu í Landsbankanum, men at mannagongdirnar eru ikki nøktandi, tá ið aðrir stovnar flyta pening úr Landsbankanum.

2.2.9 Skuld (GL 2005/3 02 2-3)

Innanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	2.224.844	3.124.790	1.538.224

Í 2006 er talan um tríggjar brævalánsrøðir á ávikavist 375 mió.kr., 400 mió.kr. og 199 mió.kr., sum allar fella til gjaldingar 24. november 2008 og tvær brævalánsrøðir á ávikavist 430 mió.kr. og 120 mió.kr., sum fella til gjaldingar 1. juni 2010 og ein brævalánsrød á 750 mió.kr., sum verður niðurgoldin fram til 10. juni 2018. Harafturat kemur tiltakgrunnurin.

Brævalánini verða seld uttanlands, og tað er óvist, hvør "keyparin" er. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

Uttanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	500.000	500.000	2.118.400

Við árslok 2006 er bert talan um 1 lán, sum stavar frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Lánið er 500 mió.kr., og sambært avtaluni er lánið rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: *"Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer."*

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar innanfyri komandi árið

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	47.540	800.000	430.345

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Sambært roknskapinum	591.466	573.657	599.175

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkanir og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Útjavningarkonta

t.kr.

Ár	2006	2005	2004
Salda 1. januar	-93.759	527.186	520.102
RLÚ-úrslit	674.178	-210.567	-155.656
Ymiskar broytingar	62.265	16.289	78.246
Salda 31. desember	**642.684**	**332.909**	**446.692**

Saldan á útjavningarkontuni primo 2006 stemmar ikki við salduna ultimo 2005. Orsøkin er í høvuðsheitum, at kapitalinnskotið hjá Fíggingargrunninum frá 1992 er lækkað 468 mió.kr., tí Gjaldstovan hevði ikki fingið roknskapin frá Fíggingargrunninum fyri 2005, tá ið landsroknskapurin 2005 varð liðugur.

Harumframt vórðu hangarurin og tyrlan "skotin" inn í P/f Atlantsflog, og landið fekk partabrøv í staðin. Talan var um at býta tyrluna og hangarin um við partabrøv í P/f Atlantsflog fyri 52 mió.kr.

"Ymiskar broytingar" fevna um broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingar av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøku av grunnum, úrslit hjá internum grunnum, broytingar í avsetingum, mótbókingar til útlánsroknskap og mótbókingar til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki "Kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Aktivini í landsroknskapinum verða virðismett øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip, vegir o.t., eru ikki virðismett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

2.3 Umsiting av skatti, avgjøldum o.a.

2.3.1 Alment um innaneftirlit á Toll- og Skattstovu Føroya

Í seinasta uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2006, ið varð lagt fyri Løgtingið í januar 2007, stendur m.a. (vísandi til s. 39-40 í frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini), at:

> *"Innaneftirlitið á Toll- og Skattstovu Føroya er ikki batnað. Toll- og Skattaráðið og Stýrið hava ikki sett tey mál, tað veri seg stevnumið ella árligar virkisætlanir, sum lógin um toll- og skattafyrisiting ásetir. Saknur er á yvirskipaðum ætlanum um ráðlegging, eftirlit og skráseting, og tørvur er á at endurskoða og bøta um roknskaparreglugerð og innaneftirlit sum heild, tá ræður um umsiting av skatti, mvg, innflutnings- og øðrum avgjøldum, og av stuðulsskipanum."*

Løgtingsgrannskoðararnir mæltu staðiliga landsstýrismanninum til at hava eftirlit við, at viðurskiftini koma í rættlag.

Niðanfyri hava vit kunnað um, hvørji tiltøk eru sett í verk at bøta um innaneftirlitið, tað veri roknskaparreglugerð, stevnumið og virkisætlanir e.a.

Roknskaparreglugerðin ógreið og ótíðarhóskandi

Tørvur er framvegis á at endurskoða, bøta um og dagføra roknskaparreglugerðina og samskipa hana við aðrar ásetingar. Roknskaparreglugerðin, við tilvísingum og leiðbeiningum, er á fleiri økjum ógreið og er ikki dagførd. Ásetingar um eftirlitsvirksemi verða í nógvum førum ikki fylgdar, og skrásetingar av eftirlitsvirksemi eru ikki neyvar og sambærligar. Saknur er á yvirskipaðum ætlanum um ráðlegging og skráseting.

Vantandi stevnumið og árligar virkisætlanir

Í Ll. nr. 169/1997 "um Toll- og skattafyrisiting" eru ásetingar um yvirskipaðu leiðsluna av Toll- og Skattstovu Føroya. Vit hava í frágreiðing til landsstýrismannin í 2007 aftur vístá, at lógarfestar ásetingar um umsiting, eftirlit o.t. í nógvum førum ikki verða fylgdar, m.a. at:

- landsstýrismaðurin kann áseta reglur fyri virkið hjá Toll- og Skattaráð Føroya (§ 19, stk. 6)
- Toll- og Skattaráð Føroya skal fastleggja stevnumið (§ 19, stk. 1)
- Toll- og Skattaráðið og Stýrið skulu hava eftirlit við skattaálíkningini (§ 20, stk. 1, 1. pkt.).
- Stýrið skal gera virkisætlanir (§ 2, stk. 1).
- Stýrið skal ansa eftir álíkning og fyrisiting (§ 1).
- Stýrið skal kanna rættleikan í avgerðum (§ 3, stk. 1).

Avrikssáttmáli millum Toll- og Skattstovuna og Fíggjarmálaráðið

Í oktober 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevur sett í verk mál- og avriksstýring fyri Toll- og Skattstovu Føroya. Fíggjarmálaráðið hevði saman við Toll- og Skattstovu Føroya sett yvirskipað mál fyri, hvørji mál og úrslit skulu verða rokkin í 2007.

Ein avrikssáttmáli er undirskrivaður 13. apríl 2007 millum Toll- og Skattstovu Føroya og Fíggjarmálaráðið. Avrikssáttmálin er galdandi til 31. desember 2007.

Í frágreiðingin til landsstýrismannin hava vit vístá, at vit hava ilt við at skilja, hvussu ein tílíkur avrikssáttmáli hongur saman við verandi regluverki, har reglur eru um umsiting, eftirlit o.t. í lóg, roknskaparreglugerð (íroknað leiðbeining til hagtals-skipanina), starvsfólkahandbók og leiðbeining til Vinnuskránna. Reglurnar fevna um stevnumið, virkisætlanir, vitjanarætlanir, konfidensiellar ætlanir, punkteftirlit, sam-skipað eftirlit, revisiónir, størri eftirlit o.s.fr. Eisini eru ásetingar um skrásetingar í einari hagtalsskipan og í Vinnuskránni. Vit hava vístá, at flest allar verandi ásetingar um umsiting og eftirlit verða ikki fylgdar, hagtals-skrásetingarnar eru ikki neyvar og álítandi, og sostatt eru nógvir ósvaraðir spurningar í verandi regluverki.

Landsgrannskoðanin ber ótta fyri, at innaneftirlitið framvegis ikki kemur at virka nóg væl

Í juli 2007 bóðu vit landsstýrismannin um viðmerkingar, og bóðu hann greiða frá, hvussu verandi regluverk, m.a. ásett í lóg og roknskaparreglugerð, sampakkar við umrødda avrikssáttmála.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin ikki beinleiðis svarað hesum spurningi, men vísir á, at endamálið við mál- og avrikssáttmálanum er at fáa sum mest burturúr landsins búskapartilfeingi og tryggja samsvar millum politisk ynski og uppgávur, sum stovnar útinna. Ætlanin við sáttmálanum er ikki at fara inn at detail-stýra stovnunum, men vónandi kann tilgongdin við mál- og avriksstýring elva til, at trupulleikarnir, sum nevndir eru í málinum um mvg-umsiting, verða rættaðir.

Fyrilestur um avrikssáttmálar, innaneftirlit o.a.

Í september 2007 skipaði Landsgrannskoðanin fyri einum fyrilestri saman við internu grannskoðanini hjá Skat í Danmark. Á fyrilestrinum luttóku starvsfólkini á Lands-grannskoðanini og leiðslan, samskiparar, økisstjórar og leiðarar úti á økjunum hjá Toll- og Skattstovuni. Endamálið við fyrilestrinum var at fáa íblástur til, hvussu ein

leiðsla ásetir mál og strategiir, hvussu tey verða skjalfest í avrikssáttmálanum, hvussu úrslitini verða skrásett, og hvussu leiðslan hevur umsjón og eftirlit við, at mál og avrik sampakka. Vit umrøddu eisini, hvussu bøtt kann verða um avrikssáttmálan millum Toll- og Skattstovu Føroya og Fíggjarmálaráðið.

2.3.2 Umsiting av mvg, innaneftirlit o.a (GL 2006/ 2 4 5-11)

Í seinastu frágreiðing januar 2007 varð umrøtt, at í samráð við stjóran á Toll- og Skattstovu Føroya hava vit, saman við umboðum fyri Stýrið, vitjað økini fyri at fáa staðfest, um eftirlitsvirksemið fer fram, sum ásett, og hvussu tað verður skjalprógvað.

Í juni 2007 kunnaði stjórin m.a. um, at í einum avrikssáttmála er ásett, at 46 mvg-vitjanir skulu verða gjørdar í 2007. Leiðslan hevur sett ein samskipara fyri mvg-eftirlitið, og ein mvg-deild er sett á stovn, sum skal taka sær av mvg-rakstrinum kring landið.

Stjórin hevur ikki viðgjørt nakrar av teimum meira grundleggjandi trupulleikunum, m.a.: at ásetingar í lógini um toll- og skattafyrisiting, í roknskaparreglugerðini og starvsfólkahandbókini ikki verða fylgdar, umframt ófullfíggjað hagtøl og vantandi umsjón.

Í juli 2007 spurdu vit landsstýrismannin, hvørjar ætlanir hann hevur.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið er við at gera eitt uppskot til broytingar í toll- og skattafyrisitingarlógini. Toll- og Skattaráðið verður møguliga tikið av, og hvørt lógarøki sær skipað soleiðis, at samskiparar koma at taka sær av hesum.

2.3.3 Mvg-eftirstøður (GL 1997/2 4 5-5)

Í ársfrágreiðingini januar 2007 umrøddu vit eina kanning, í sambandi við at løgtingsgrannskoðararnir høvdu biðið Landsgrannskoðanina lýsa vøksturin í mvg-eftirstøðunum. Landsgrannskoðanin hevur eisini kannað, um nóg mikið verður gjørt fyri at fáa eftirstøðurnar goldnar, og í hvønn mun heimildirnar í mvg-lógini eru brúktar at forða fyri, at eftirstøðurnar vaksa.

12. desember 2006 sendu vit stjóranum á Toll- og Skattstovu Føroya og landsstýrismanninum eina frágreiðing til viðmerkingar.

Eisini hava vit kannað, um broytingar, sum vórðu framdar í mvg-lógini í 1995 (Lm. 174/1994), hava havt ávirkan sum ætlað, m.a. at forða fyri kappingaravlagandi virksemi, at effektivisera innkrevjingina av eftirstøðum við at stytta avrokningartíðarskeiðið, og at fáa til vega heimild at krevja trygd og at nokta skráseting. Hetta fyri at minka um møguleikan fyri eftirstøðum og tapi av meirvirðisgjaldi.

Kanningin vísti, at fleiri heimildir, sum vórðu settar í mvg-lógina í 1995 (§ 23a), eru ikki brúktar í tann mun, ætlanin var. Umframt vantandi starvsfólkaorku á Eftirlits- og Innheintingardeildini, varð vístá, at KT-skipanirnar eru ikki nøktandi, vantandi skipað skráseting av ávísum upplýsingum, ov nógv manuelt arbeiði, vantandi skrivligar mannagongdir o.a.

Leiðarin á Eftirlits- og Innheintingardeildina helt, at tørvur var á at endurskoða og samskipa lógarásetingarnar í § 23a, og at ásetingarnar í § 23a ikki verða brúktar, m.a.:

- at stytta avgjaldstíðarskeiðið (§ 23a, stk. 1 og 4), forðar ikki fyri, at eftirstøðurnar vaksa, og úrslitið kann samanberast við støðuna við sjálvvirkandi mvg-metingum,
- tað hevur ongar ítøkiligar avleiðingar at áleggja virkjum at seta trygd fyri gjaldingini av meirvirðisgjaldi, tá ið virki framvegis ikki avroknar rættstundis (§ 23a, stk. 7),

- at áleggja virkjum, ið verða fráboðað til skráseting, at seta trygd (§ 23a, stk. 8) og nokta at skráseta nýggj virkir, um tey ikki seta eina ávísa trygd, hevur ávirkan, hóast hon er avmarkað í upphædd. Tó kann ásetingin ikki verða brúkt sum ætlað, tí Toll- og Skattstovan hevur ikki neyðugu skrásetingar um eigarar, limir í nevnd ella stjórn í virkjum, sum áður hava verið skrásett, og har landskassin hevði krøv, ið ikki vóru nóg væl tryggjað.
- § 33, stk. 3, í lógini um meirvirðisgjald, um revsing fyri brot á lógina er ikki knýtt at § 23a, stk. 7, og ongin heimild er til at taka av skrásetingar vegna manglandi veitan av trygd. Ongin sanktiónsmøguleiki er hjá myndugleikanum, tí talan er ikki um at skyldur eftir § 23a, stk. 7, yvirhøvur kunnu misrøkjast, og tá um revsing ræður, eru heldur ongar ásetingar.

Vísandi til viðmerkingarnar frá leiðaranum fyri Eftirlits- og Innheintingardeildini, mælti Landsgrannskoðanin leiðsluni á Toll- og Skattstovuni og landsstýrismanninum til at taka viðurskiftini til viðgerðar.

Í oktober 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at:

"ætlanin er at fáa heimild at innheinta mvg í lønarafturhaldi" og

"Toll- og Skattstovan upplýsir, at nú mvg-deild er sett á stovn, sum skal taka sær av mvg-rakstrinum fyri alt landið, verða viðmerkingarnar hjá fyrrverandi deildarleiðaranum á Miðøkinum havdar í huga, tá vegleiðingar og mannagongdir verða skrivaðar.

Toll- og Skattstovan metir, at tá nevndu reglur eru skrivaðar og settar í verk, standa virkir ikki fyribilsásett uttan virksemi, og harvið fara mvg-eftirstøðurnar ikki at vaksa. Gongdin higartil í árinum vísa, at mvg-eftirsstøðurnar lækkað.

Toll- og Skattstovan viðmerkir eisini, at endamálið við ásetingunum í § 23a er at minka um møguleikan fyri eftirstøðum, og soleiðis eisini tapi av meirvirðisgjaldi. Ásetingarnar í sær sjálvum eru ikki trygd fyri, at ongin eftirstøða ella tap er/verður av meirvirðisgjaldi."

Landsgrannskoðanin heldur ikki svarið vera nóg ítøkiligt. Hvørki stjórin ella landsstýrismaðurin hava tikið til viðgerðar viðmerkingarnar viðvíkjandi teimum grundleggjandi trupulleikunum í mvg-lógini, sum víst varð á í frágreiðingini.

2.3.4 Framleiðsluavgjald (GL 1999/2 04 6-6)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin m.a. víst á, at eftirlitið við framleiðslugjaldinum er ikki nóg væl greinað í roknskaparreglugerðini e.ø.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Toll- og Skattstovan er farin undir at endurskoða alla roknskaparreglugerðina og at fáa reglur fyri umsitingina á øllum lógarøkinum í hana. Hendan uppgávan er raðfest, og verða reglurnar fyri framleiðslugjaldi við í verkætlanini fyri 2008.

2.3.5 Ferðaavgjald (GL 2002/2 04 6-8)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin m.a. víst á, at eftirlitið við ferðaavgjaldinum er ikki nóg væl greinað í roknskaparreglugerðini e.ø.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Toll- og Skattstovan er farin undir at endurskoða alla roknskaparreglugerðina og at fáa reglur fyri umsitingina á øllum lógarøkinum í hana. Hendan uppgávan er raðfest, og verða reglurnar fyri ferðaavgjaldinum við í verkætlanini fyri 2008.

2.3.6 Vegskattur (GL 2004/2 04 6-9)

Roknskaparreglugerð

Í 2005 kunnaðu vit um grannskoðanina av vegskatti. Vit hildu ikki, at roknskapar-reglugerðin hjá Akstovuni leyk krøvini í pkt. 10 í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum

um skrivligar lýsingar av egnum EDV-skipanum, og mæltu tí til at endurskoða roknskaparreglugerðina.

Akstovan hevur í oktober 2007 kunnað okkum um, at arbeiðið at endurskoða roknskaparreglugerðina er liðugt, og roknsskaparreglugerðin, sum er fyri Akstovuna, skrásetingargjald, vektgjald og inntøkur av burturbeiningargjøldum, er send til avvarðandi aðalráð til góðkenningar.

Vektgjald av líkvognum og prutlum

Vit hava víst á, at soleiðis sum lógin er orðað, er ivasamt, um heimild er fyri, at líkvognar og prutl ikki rinda vegskatt.

Í januar 2006 boðaði Fíggjarmálaráðið frá, at siðvenja ongantíð hevði verið at kravt avgjøld av líkvognum og prutlum. Einki bendi á, at nakrar ætlanir høvdu verið um, at tey skuldu gjalda vegskatt. Sama gjørdi seg galdandi við skrásetingargjaldi. Landsstýrismaðurin ætlaði tí at skjóta upp at nágreina hesi viðurskifti, næstu ferð vektgjalds- og skrásetingargjaldslógirnar skuldu broytast.

Í juni 2006 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin, hvat síðani var hent í málinum. Vit hava einki svar fingið.

2.3.7 Kassaeftirlit (GL 2007/2 04 0-15)

Í fleiri ár hava vit í sambandi við kassaeftirlit á Toll- og Skattstovu Føroya gjørt vart við, at mannagongdirnar á kassaøkjunum ikki altíð samsvaraðu við roknskaparreglugerðina, at reglurnar vóru ótíðarhóskandi, og vit mæltu til at endurskoða verandi kvittanir og gera tær einfaldari. Eisini mæltu vit Stýrinum til at gera sær greitt, hvørjar ásetingar skulu vera fyri kassaeftirlit, seta tær í roknskaparreglugerðina og síðani fylgja teimum.

Í september 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Toll- og Skattstovu Føroya, var farin undir at gera arbeiðsgongdina einfaldari.

Í mai 2007 kunnaði stjórin á Toll- og Skattstovu Føroya um, at sum liður í bygnaðarbroytingunum skulu allir kontantkassar niðurleggjast. 1. januar 2007 varð kassin niðurlagdur á deildini á Tvøroyri, Skopun og Runavík, og 1. mars 2007 varð kassin á deildini í Klaksvík niðurlagdur. Kassarnir á deildunum í Tórshavn og á flogvøllinum skuldu eftir ætlan verða stongdir 1. juli 2007.

Í juli 2007 er kassin á deildini í Tórshavn niðurlagdur. Eftir er so kassin á flogvøllinum. Tá ið kassin á flogvøllinum er niðurlagdur, verður reglugerðin dagførd samsvarandi.

Tollararnir koma tó at taka ímóti kontantum peningi. Tann kassin verður gjørdur upp dagliga, og peningurin lagdur í náttarboks. Miðøkið skrásetur inngjaldingarnar dagin eftir.

2.3.8 Trygdargrunnurin *(GL 1998/2 09 1-2)*

Roknskaparreglugerð

Hóast 5 ár eru liðin, síðani stovnarnir í seinasta lagi skuldu hava eina góðkenda roknskaparreglugerð, hevur Trygdargrunnurin framvegis onga góðkenda reglugerð.

Í august 2007 vitjaðu vit Suðurøki, fyri at kunna okkum um roknskaparreglugerðina. Sambært Suðurøkinum er roknskaparreglugerðin framvegis ikki liðug, men arbeitt verður við málinum.

Skráseting og eftirlit

Vit vístu á, at ikki allar lønarútgjaldingar úr Trygdargrunninum vóru farnar um lønarskipanina á Føroya Gjaldstovu.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at mannagongdin var broytt, og allar útgjaldingar fara um lønarskipanina á Gjaldstovuni.

Endurgjaldskrøv skulu verða send Gjaldstovuni at skráseta. Vit vístu á, at priviligeraðu lønarkrøvini eru ikki skrásett í landsroknskapinum.

Í januar 2006 mælti Landsgrannskoðanin landsstýrismanninum til at fáa greiði á spurninginum.

Í august 2007 staðfestu vit, at priviligerað lønarkrøv nú eru skrásett í landsroknskapinum.

Uppsøgn av peningastovnskontum

1. oktober 2002 boðaði landsstýrismaðurin frá, at inniognin hjá Trygdargrunninum (74,1 mió.kr. við árslok 2005) átti at standa í Landsbankanum, og at landsstýrismaðurin fór at taka spurningin upp við leiðslurnar á Toll- og Skattstovu Føroya og í Landsbankanum.

Í desember 2005 greiddi stjórin frá, at í mars 2005 vórðu konturnar sagdar upp.

Á vitjan í Suðurøki í august 2007 kunnaði málsviðgerðin um, at allar kontur eru tømdar í august 2007, og peningurin er fluttur Landsbankanum. Sambært landsroknskapinum í oktober 2007 eru ikki allar kontur tømdar.

Spurdur, hvat ætlanin var við hesari peningaupphædd, svaraði landsstýrismaðurin í juni 2006:

> *"Endalig avgerð er ikki tikin til henda spurning. Trygdargrunnurin er tikin inn í fíggjarlógina og tikin við í landsroknskapinum, og kundi hetta talað fyri at tikið peningin inn í landskassans vanliga gjaldføri, men ásannast má tó, at peningurin er kravdur inn við serligari løgtingslóg til serligt endamál. Inntil løgtingslógin um Trygdargrunnin møguliga verður broytt, haldi eg, at rættast er at hava nevndu upphædd setta til síðis."*

Landsgrannskoðanin hevur síðani spurt landsstýrismannin, nær støða fer at verða tikin til henda spurning.

Í oktober 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at ætlanin er "í hesari tingsetuni" at taka endaliga avgerð um at taka Trygdargrunnin av. Tað fer at hava við sær, at lógin um Trygdargrunnin verður tillagað soleiðis, at landið átekur sær skyldurnar og yvirtekur ognirnar.

Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at enn er eingin endalig støða tikin í málinum, men verður tað vónandi gjørt í komandi tingsetu.

2.3.9 Stuðul til ferðaútreiðslur og til dupult húsarhald (GL 2004/2 07 9-1)

Í ársfrágreiðingini januar 2007 kunnaðu vit um grannskoðanina av stuðli til ferðaútreiðslur og til dupult húsarhald. Vit høvdu nakrar viðmerkingar og einstøk tilmæli.

Í oktober 2006 kunnaði landsstýrismaður um, at frá 1. januar 2007 verður stuðul til ferðaútreiðslur og stuðul til útreiðslur til dupult húsarhald flutt til Suðurøki at umsita, og í tí sambandinum verða mannagongdir gjørdar. Í sambandi við, at Toll- og Skattstova Føroya setir í verk elektroniska journal, verða arbeiðsgongdirnar og umsóknarblaðið gjøgnumgingin. Atlit verða í hesum sambandi tikin til at lætta um málsviðgerðina og at tryggja innaneftirlitið.

Í mai 2007 greiddi stjórin á Toll- og Skattstovu Føroya frá, at allar umsóknir um stuðul til ferðaútreiðslur og stuðul til útreiðslur til dupult húsarhald nú verða

viðgjørdar í Suðurøkinum. Mannagongdirnar eru broyttar, m.a. er eitt málsviðgerðarskjal gjørt, sum skal tryggja, at málsviðgerin tekur støðu til øll viðkomandi saklig fyrilit í sambandi við málsviðgerðina, umframt at virka sum skjalprógv/skjalsannan fyri málsviðgerðini.

Í august 2007 vóru vit í Suðurøkinum fyri at kanna, í hvønn mun Toll- og Skattstova Føroya hevur byrgt uppfyri teimum feilmøguleikum, vit vístu á í frágreiðingini til landsstýrismannin.

Vit staðfestu, at framvegis:

- er einki eftirlit við, um samsvar er ímillum útgoldnan stuðul og skrásettar umsóknir.
- er ógreitt, hvussu dagatal verður tulkað.
- verður endurgjald á annan hátt ikki váttað/kannað.
- verður minstaupphædd fyri útreiðslur til dupult húsarhald ikki brúkt.

Orsøkin til, at nevndu ásetingar í lógini og kunngerðini ikki verða fylgdar, er, at kunngerðin er ógreið, og ongar mannagongdir eru gjørdar, og málsviðgerðarskjali ikki tryggjar, at ásetingarnar í kunngerðini verða fylgdar.

Vit mæltu enn eina ferð til at taka støðu til, hvussu ásetingarnar í lógunum og í kunngerðini skulu umsitast og seta mannagongdina í roknskaparreglugerðina. Eisini mæltu vit til at taka spurningin upp við landsstýrismannin.

2.3.10 Stuðul til rentuútreiðslur av lánum (GL 1997/2 03 9-5)

Í ársfrágreiðingini januar 2007 kunnaði Landsgrannskoðanin um grannskoðanina av stuðli til rentuútreiðslur. Vit høvdu nakrar viðmerkingar og nøkur tilmæli.

Í mai 2007 greiddi stjórin á Toll- og Skattstovu Føroya frá, at allar umsóknir um stuðul til rentuútreiðslur nú verða viðgjørdar í Suðurøkinum og journaliseraðar í nýggju elektronisku journalskipanini. Hann vísir eisini á, at mannagongdirnar eru broyttar m.a. við, at eitt málsviðgerðarskjal er gjørt, sum skal tryggja, at málsviðgerin tekur støðu til øll viðkomandi saklig fyrilit í sambandi við málsviðgerðina, umframt at virka sum dokumentatión fyri málsviðgerðini.

Í august 2007 vóru vit í Suðurøkinum fyri at kanna, í hvønn mun Toll- og Skattstova Føroya hevur byrgt upp fyri teimum feilmøguleikum, vit vístu á í frágreiðingini til landsstýrismannin.

Vit staðfestu, at framvegis er:

- kunngerðin ikki dagførd,
- ásetingin í kunngerðini um avmarking av stuðulstíðarskeiði ikki fylgd,
- møguligt at fáa rentustuðul í óavmarkaða tíð,
- møguligt at fáa rentustuðul uttan at gjalda rentur,
- avmarking í stuðulsupphæddini,
- ongin mannagongd skrivað um innaneftirlit, málsviðgerð og avstemming/-eftirlit,
- spurningur um endamálið við stuðlinum er rokkið.

<u>Kunngerð</u>

Vit hava aftur mælt til at dagføra kunngerðina og mælt til, at ásetingin í kunngerðini um avmarking av stuðulstíðarskeiði verða fylgd.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, tað er rætt framhaldandi at síggja burtur frá ásetingini í kunngerðini. Vit hava mælt til at taka spurningin upp við landsstýrismannin.

Rentustuðul í óavmarkaða tíð

Bygt er inn í rentustuðulsskipanina, at um lánið ikki veksur, ber til at fáa stuðul í óavmarkaða tíð, t.d. um lántakarin rindar renturnar.

Rentustuðul uttan at gjalda rentur

Stuðulin verður sjálvvirkandi steðgaður, um lánssaldan hækkar, t.v.s. lántakarin onki rindar ella rindar minni enn renturnar. Lántakarin má tí søkja av nýggjum um rentustuðul.

Um lántakarin, í samráð við peningastovnin, einki ætlar at gjalda t.d. í 5 ár, ber til at hækka lánið við rentutilskrivingunum komandi 5 árini. Sambært Toll- og Skattstovuna ber sostatt eisini til at fáa rentustuðul hvønn mánað í hesi 5 árini, uttan at gjalda nakað.

Avmarking í stuðulsupphæddini

Í ársfrágreiðingini januar 2007 vístu vit á, at fleiri persónar ikki fingu fullan rentustuðul, tí árliga rentan var hægri enn 60.000 kr. Hesir persónar høvdu ikki søkt um at fáa hægri rentustuðul og "mistu" tí samanlagt um 1,2 mió.kr. í rentustuðli.

Toll- og Skattstovan hevur kunnað okkum um, at øll, sum søkja um hægri rentustuðul innan 1. apríl, fáa hann játtaðan. Tí er sannlíkt, at fleiri av persónunum vita ikki av hesari mannagongd. Tað er tí ein spurningur, um nøkur meining er í at hava eitt rentuhámark uppá 60.000 kr. Vit mæltu til at taka spurningin upp við landsstýrismannin.

Vit hava eisini vístá, at helst eigur Toll- og Skattstova Føroya at vegleiða borgarar um rætt teirra at søkja um hægri rentustuðul. Vit hava einki svar fingið.

Mannagongdir eru ikki skrivaðar um innaneftirlit, málsviðgerð og avstemman/eftirlit

Vit vístu á, at ongar mannagongdir eru gjørdar, og málsviðgerðarskjali tryggjar ikki rættleikan av málsviðgerðini.

Vit mæltu enn eina ferð til at taka støðu til, hvussu ásetingarnar í lógunum og í kunngerðini skulu umsitast og seta mannagongdina í roknskaparreglugerðina. Eisini mæltu vit til at taka spurningin upp við landsstýrismannin.

Er endamálið við stuðlinum rokkið

Við Ll. nr. 148/1996 um "stuðul til rentuútreiðslur av lánum" varð rentufrádráttarskipanin í skattinum løgd um til eina stuðulsskipan. Vit vístu á, at í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:

> *"at rentufrádrátturin hevur leingi verið nýttur sum ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging. Í 80´árunum vóru nógv og stór lán veitt til nógv ymisk endamál, t.d. keyp av fleiri húsum, bilum, summarhúsum, uttanlandsferðir og aðra privatnýtslu. Landsstýrið ynskti ikki at stuðla hesari nýtslu skattliga og legði tí uppskot fyri Løgtingið í 1990 um at avtaka rentufrádráttin fyri øll lán uttan sethúsalán, lestrarlán og lán til innfrían av veðhaldi."*

Eftir hesum at døma er rentustuðulin til sethúsalán ein óbeinleiðis stuðul til sethúsabygging, og avmarkingarnar vórðu gjørdar, tí Landsstýrið ikki framhaldandi ynskti at stuðla privatnýtslu.

Sammett við siðvenju fyri bert fáum árum síðani, kemur í dag helst oftari fyri, at sethúsalán ikki verða goldin aftur. Talan er um lán, har 40% av rentuútreiðslunum verða latin sum rentustuðul frá landinum. Sum víst á frammanfyri, ber til at fáa rentustuðul í eitt óavmarkað tíðarskeið.

Ein avleiðing av rentustuðlinum tykist sostatt vera, at fólk verða eggjað til ikki at rinda síni sethúsalán aftur, kanska heldur ikki renturnar. Eitt størri fíggjarligt rásarúm kann síðani verða brúkt til onnur endamál, m.a. privatnýtslu ella til uppsparing til eitt nú kapitalpensjón, ratupensjón ella íløgur í virðisbrøv o.t. Landsgrannskoðanin ivast í, um hetta var endamálið við at veita rentustuðul.

Seinastu mongu árini hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar m.a. víst á, at á flestu málsøkjum eru studningslóggáva og studningsumsiting ikki nøktandi. Sjáldan er endamálið nóg væl lýst, og ofta er ikki heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð, útgjald o.a. Tí er ofta torført hjá landsstýrismanninum/umsitingini at tryggja, at landsins peningur verður nýttur á ein sparnan og virknan hátt, og at úrslitini svara til endamál og fyritreytir fyri játtanini.

Vit vístu eisini á, at lógin um rentustuðul lýkur ikki krøvini til eina góða studningslóg. Endamálið við studninginum er ikki nóg greitt og nóg neyvt, og ongar ábendingar eru um, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið. Landsgrannskoðanin mælti landsstýrismanninum til at viðgera henda spurning.

Í áliti sínum til eykajáttanarlógina september 2006 helt Fíggjarnevndin, at "*tað tykist sum gongdin í Føroyum viðvíkjandi sethúsafígging alsamt meira líkist gongdini í grannalondum okkara, við tað at tað verður alsamt meira vanligt, at lán í sethúsum ikki verða niðurgoldin. Við verandi rentustuðli verður vanligt forbrúk sostatt stuðlað úr landskassanum. Fíggjarnevndin heldur, at landsstýrismaðurin eigur sum skjótast at finna eina loysn, sum hevur eina breiða politiska semju.*"

Í apríl 2007 spurdu vit, hvat er hent í málinum, og í juli 2007 svaraði landsstýrismaðurin:

> *"Landsstýrismaðurin er samdur við Landsgrannskoðanini í, at endamálið við rentustuðlinum er heldur ógreitt. Ásannast má eisini, at rentustuðulin í flestum førum ikki lættir um hjá sethúsaeigara, men ístaðin er vorðin ein fíggjarlig byrða hjá landskassa og kommunum. Henda gongd gerst týðiligari, nú tað verður meira vanligt, at sethúsalán í minni mun verða niðurgoldin, sum óbeinleiðis hevur við sær, at vanlig nýtsla verður stuðlað og beinleiðis hevur við sær, at fíggjarliga byrðan hjá landskassa og kommunum veksur.*
>
> *Landsstýrismaðurin er sannførdur um, at rentustuðulsskipanin eigur at verða endurskoðað, har neyðugu atlitini verða tikin fyri fíggjarligu bindingunum, sethúsaeigarar hava langt fram í tíðina. Ásannast má, at tað neyvan verða gjørdar tær stóru broytingarnar í hesum valskeiðnum, eftirsum flest allir flokkar fóru til val við lyftinum um at varðveita rentustuðulsskipanina, og sum harafturat er ásett í samgonguskjalinum. Landsstýrismaðurin er tó sinnaður til í heyst at gera eina roynd at finna eina loysn, sum hevur breiða politiska semju."*

2.3.11 Innflutningsgjøld, eftirlitsvirksemi (GL 2001/2 04 5-7)

Í 2006 kannaðu vit mannagongdir og innaneftirlit viðvíkjandi innflutningi. Vit vístu á, at Stýrið ikki hevði lagt árligar virkisætlanir ella sett eftirlitsmál. Toll- og Skattstovan hevði tó gjørt eftirlit úti á virkjum, sum tolla sjálvi. Eftirlitini tyktust væl úr hondum greidd, men saknur var á yvirskipaðum ætlanum um ráðlegging og skráseting.

Vit mæltu Stýrinum til at endurskoða og dagføra eftirlitsvirksemið út frá einum heildarsjónarmiði, og við støði í einari yvirskipaðari váðagreining.

Í juli 2007 boðaði Stýrið frá, at allir e-tollbrúkarar hava fingið vegleiðandi eftirlit. Eisini er ætlanin at gera vinnugreinaeftirlit. Málið er, at Miðøkið skal kanna heilsølur, og Norðurøkið skal kanna maskinídnað. Umframt vinnugreinaeftirlit er málið fyri 2007, at punkteftirlit í e-tollinum skulu gerast. Tolleftirlitið hevur eisini gjørt eina ætlan fyri, hvørji og hvussu nógv eftirlit tað skal gera í 2007.

Umframt nevndu eftirlit er ein avrikssáttmáli fyri 2007 undirskrivaður 13. apríl 2007 millum Toll- og Skattstovu Føroya og Fíggjarmálaráðið.

2.3.12 Brennioljugjald (GL 2002/2 04 5-8)

Í ársfrágreiðingini januar 2007 kunnaði Landsgrannskoðanin um grannskoðanina av brennioljuavgjaldi. Vit høvdu nakrar viðmerkingar og einstøk tilmæli.

Kunngerð nr. 177/1993 er sett úr gildi

Vit vístu á, at kunngerðin vísti til skeiva heimild. Sambært Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya var talan um eina prentvillu, sum skuldi verða rættað.

Eisini hevði Stýrið boðað økjunum frá, at tey skuldu síggja burturfrá umsóknarfreistini í kunngerðini, tí hon ikki hevði heimild í lógini. Vit mæltu Toll- og Skattstovuni til í staðin at greiða landsstýrismanninum frá hesum trupulleika, soleiðis at landsstýrismaðurin kundi tikið støðu til spurningin og møguliga broytt lógina ella kunngerðina. Í desember 2006 boðaði Stýrið fyri Toll- og Skattstovuni frá, at ætlanin var at broyta lógina.

Kunngerðin varð ikki broytt, men 3. september 2007 varð kunngerð nr. 177/1993 sett úr gildi. Landsgrannskoðanin undrast á, at kunngerðin er sett úr gildi, uttan at annað er sett í staðin. Stýrið hevur í oktober 2007 kunnað um, at arbeitt verður við at gera nýggjar mannagongdir.

Inntøkur, oljulatingarfeløgini umsita lógina

Vit vístu á, at oljulatingarfeløgini kunnu sigast at vera ein partur av umsitingini av lógini. Tey senda uppgerð inn hvønn mánað, sum vísir, hvussu nógv oljufelagið skal gjalda. Tey rokna sjálvi oljugjaldið út og gjalda upphæddina á kontu hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Tey taka støðu til, hvørjum olja verður latið við og uttan avgjald.

Tilmæli um grannskoðanarváttan

Vit hava áður, fyrstu ferð í 1997, mælt til at umhugsa eina skipan, har grannskoðarin hjá feløgunum árliga váttar, at tær uppgerðir, ið latnar eru Toll- og Skattstovu Føroya, eru rættar. Grannskoðarin, ið kennir roknskaparmannagongdirnar, kann lættliga meta um, hvørt mannagongdir og bókhaldið eisini eru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av oljugjaldi. Vit hava eisini mælt til at umhugsa líknandi skipan fyri umsitingina av ferðaavgjaldi, framleiðslugjaldi, rentuskatti, avgjaldi av kapitaleftirlønum o.ø.

Í desember 2006 mæltu vit enn einaferð til at viðgera hesi tilmæli. Vit hava onki svar fingið.

Endurrindan til gistingarhús

Vit hava áður víst á, fyrstu ferð í 1997, at nøkur gistihús við matstovu, sum hava søkt um at fáa rætt til endurgjald av oljugjaldi, einans fáa rætt til lutvíst endurgjald. Endurgjaldið er fyri tann partin av avgjaldinum, sum viðvíkur gistingarhús-virkseminum og ikki tann partin, sum viðvíkur matstovuvirkseminum. Henda avmark-

ing tykist ikki vera í tráð við lógina og kunngerðina. Vit fingu ongantíð nakað svar og reistu tí málið av nýggjum í oktober 2007.

Í Ll. nr. 179/1992 "um serligt avgjald á brenniolju" við seinni broytingum stendur, at gistingarhús hava rætt til at fáa endurgoldið brennioljugjald.

Kunngerð nr. 96/1994 "um endurrindan av serligum oljugjaldi" er tikin av, og kunngerð nr. 23/2003 "um endurrindan av serligum oljugjaldi" er sett í staðin. Í báðum kunngerðunum stendur, at meirvirðisgjaldsskrásett virki, ið hoyra til bólk 55.1: "Gistingarhús", í Føroysku Vinnugreinaskipan 1993, kunnu søkja Toll- og Skattstovu Føroya um at fáa góðkenning at fáa endurrindað avgjaldið, sum er lagt á olju sambært § 1 í Ll. nr. 179/1992.

Til bólk 55.1, í Føroysku Vinnugreinaskipan 1993: "Gistingarhús" hoyrir:

undirbólkur 55.11 Gistihús við matstovu og ráðstevnumiðdeplar o.a.
Vinnugrein 55.11.10 **Gistihús við matstovu**
Vinnugrein 55.11.20 **Rástevnumiðdeplar og hús til skeiðvirksemi**
undirbólkur 55.12 Gistihús uttan matstovu
Vinnugrein 55.12.00 **Gistihús uttan matstovu**

Sambært lógini og kunngerðini hava gistihús bæði við og uttan matstovu rætt til fult endurgjald av oljugjaldinum. Men matstovuvirksemi, sum hoyrir til bólk 55.3 í Føroysku Vinnugreinaskipanini, hevur ikki rætt til oljuendurgjald smb. kunngerðini og lógini. Vit spurdu, um tað var meiningin við lógini, at matstovur á hotellum skuldu fáa oljuendurgjald, meðan matstovur, sum ikki eru knýttar at gistihúsi ikki fingu oljuendurgjald. Vit hava onki svar fingið.

Í skrivi til Toll- og Skattstovu Føroya í desember 2006 vístu vit á, at tað er ymist, hvussu umsitingin á Toll- og Skattstovuni skilir kunngerðina. Vit vístu á, at 6 hotell við matstovu vóru skrásett í Vinnuskránni á Toll- og Skattstovuni til at fáa fult endurgjald, og 6 hotell við matstovu vóru skrásett til lutvíst endurgjald.

Vit spurdu, hví nøkur hotell høvdu rætt til fult endurgjald og nøkur til lutfalsligan part av oljugjaldinum. Vit fingu ongantíð nakað veruligt svar og reistu tí spurningin av nýggjum í oktober 2007.

Vit mæltu til at taka skrásetingar av hotellum við matstovu í Vinnuskránni upp av nýggjum, soleiðis at øll hotell í somu vinnugrein fáa somu rættindi og fáa skrásetingarprógv svarandi til teirra rættindi.

2.3.13 FAS-afturbering (Gl 2005/2 15 3-6)

Í ársfrágreiðingini januar 2007, kunnaðu vit um grannskoðanina av afturbering av hýrum til reiðaravirkir, hvørs skip eru skráset í FAS (Føroya Altjóða Skipaskrá).

Niðanfyri hava vit kunnað um, hvørji stig landstýrismaðurin hevur sett í verk at bøta um innaneftirlitið.

Lógargrundarlag

Sambært § 63a, stk. 8, í skattalógini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur fyri afturberingina. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett neyvari reglur.

Í juli 2007 spurdu vit, um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at áseta neyvari reglur.

Í september 2007 svaraði landsstýrismaðurin, at hann í løtuni ongar ætlanir hevur um at áseta neyvari reglur, men tær verða gjørdar, um tað seinni vísir seg at verða tørvur á teimum.

Ásetingar í roknskaparreglugerðini ikki fylgdar

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at áðrenn FAS-útlendingar fáa fyribils persónstal, skal økisskrivstovan hava avrit av passi, av hýrusáttmála og av- og ámynstringarskjølum. Toll- og Skattstovan ásannar, at reglurnar ikki verða fylgdar og heldur, at roknskaparreglugerðin og reglurnar um fyribils persónstøl eiga at verða broyttar/dagførdar.

Í juli 2007 spurdu vit, um roknskaparreglugerðin er broytt.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin er at broyta roknskaparreglugerðina, so hon er í samsvari við umsitingina.

Leiðbeining á umsóknarblaði og reglugerðin frá Stýrinum ikki fylgd

Við stakroyndum hava vit staðfest, at leiðbeining á umsóknarblaði og reglugerðin frá Stýrinum verður ikki fylgd.

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstovan er farin undir at gera nýggja vegleiðing fyri málsviðgerðina.

Eftirlit við útgjaldingum ikki nøktandi

Hvørki Stýrið ella økini hava eftirlit við, hvørjir persónar reiðaravirkið fær afturbering fyri.

Í skrivi í mai 2007 greiddi stjórin m.a. frá at niðurstøðan av einari vitjan í Norðurøki var, *"at í dag verður einki gjørt, men fer arbeiðið í gongd so skjótt, sum nýtt starvsfólk verður sett í Norðurøki"*.

Í september 2007 boðaði landstýrismaðurin um, at eitt fólk er sett í starv, sum kemur at taka sær av hesum. Arbeiðið verður skipað í 2007.

Tørvur á "arbeiðsgevaraeftirlitum"

Seinastu 5 árini hava fá eftirlit verið við afturberingum til FAS reiðaravirkir. Toll- og Skattstovan hevur víst á, at eftirlit eiga at verða skipað sum "arbeiðsgevaraeftirlit", sum er einasti háttur at kanna, um alt fer rætt fram.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at í virkisætlanini 2008 verður skipað fyri arbeiðsgevaraeftirliti.

Kontuavrit og skattauppgerðir ikki sendar út

Toll- og Skattstovan hevur gjørt av ikki at senda kontuavrit og skattauppgerðir til ávísar skattgjaldarar, m.a útlendingar undir FAS-skipanini, tí flest øll brøv koma retur.

Vit halda tað vera óheppið, at eingi onnur eftirlit eru sett ístaðin fyri kontuavrit og skattauppgerðir, m.a. tí at skattgjaldarin ikki hevur høvi at gera vart við møguligar skeivleikar.

Í juli 2007 bóðu vit um viðmerkingar frá landsstýrismanninum.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Toll- og Skattstovan er samd við Landsgrannskoðanini, men returposturin skapar nógv óneyðugt arbeiði, og ongar ætlanir eru um at senda kontuavrit út.

2.3.14 Grannskoðan av lønarhæddaravgjaldi (GL 2004/2 04 5- 10)

Landsgrannskoðanin hevur kannað mannagongdir og innaneftirlit viðvíkjandi umsiting av lønarhæddaravgjaldi, sum m.a. er ásett í lóggávu og í roknskaparreglugerð.

Í samráð við stjóran á Toll- og Skattstovuni hava vit, saman við umboðum fyri Stýrið, vitjað Miðøkið fyri at fáa staðfest, um eftirlitsvirksemið er ásett, og hvussu tað

verður skjalprógvað. Í einum uppriti hava vit gjøllari greitt frá, um úrslitið av grannskoðan okkara. Vit hava eisini sett nakrar spurningar, teir flestu hava vit ikki fingið svar uppá.

Lógargrundarlag ikki dagført

Sambært § 1, stk. 2 í lógini um lønarhæddaravgjald, fevnir avgjaldsskyldan ikki um Føroya Ídnaðargrunn, Færøernes Realkreditinstitut, Húsalánsgrunnin, Jarðargrunnin, Menningargrunn Ídnaðarins og Fíggingargrunnin frá 1992.

Fleiri av hesum grunnum eru tiknir av, men aðrir grunnar eru komnir ístaðin, t.d. Framtaksgrunnurin og Vinnuframagrunnurin, sum er komin ístaðin fyri Føroya Ídnaðargrunn og Menningargrunn Ídnaðarins. Búnaðargrunnurin er komin ístaðin fyri Jarðargrunnin. Hesir grunnar rinda ikki lønarhæddaravgjald, hóast teir ikki positivt verða undantiknir í lógini. Lógin um lønarhæddaravgjald er sostatt ikki dagførd.

Innaneftirlit

Vit hava staðfest, at eingi innaneftirlit tryggja, at øll virkir, sum skulu gjalda lønarhæddaravgjald, eru skrásett i Vinnuskránni.

Á fundi við umboð fyri Toll- og Skattstovuna kunnaðu vit um nøkur virkir, sum vit, við einari einfaldari leiting í Vinnuskránni, hava funnið fram. Hesi virki reka, eftir øllum at døma, fíggjarvirksemi, og eru hvørki skrásett at gjalda mvg ella lønarhæddaravgjald. Lønir eru goldnar út við nøkrum av hesum V-tølum.

Skeiv skráseting av heilsuvirksemi

Vit hava víst á dømir um virkir sum, vegna skeiva kotu í einari sjálvvirkandi útrokning av lønarhæddaravgjaldi, møguliga rinda eina skeiva upphædd, um tey gjalda út lønir, og at avgjald ikki verður goldið av møguligari B-inntøku.

Ivamál um fíggjarvirksemi

Í Vinnuskránni eru fleiri sløg av virkjum við eins vinnugreinakotum. Tey eru skrásett ymiskt, tá tað snýr seg um skylduna at gjalda avgjald. Sambært rundskrivi nr. 2 frá 11. august 1995 frá Toll- og Skattstovuni skulu virkir, sum reka banka- sparikassa- og fíggjarvirksemi, og sum lata tænastur móti samsýning, gjalda lønarhæddaravgjald. Ongar vegleiðingar eru, sum greina, hvat tað merkir at reka fíggjarvirksemi í sambandi við avrokning av lønarhæddaravgjaldi.

Sjálvvirkandi forrit roknar skeiva avgjaldsupphædd

Vit hava víst á, at við einari sjálvvirkandi skipan, sum lesur útgoldnar A-inntøkur hjá fíggjarvirksemi, banka, sparikassa, tryggingarvirksemi og hjá teimum, sum reka heilsuvirksemi í partafelag, verða fríir ágóðar ikki taldir við í avgjaldsgrundarlagið.

Endalig uppgerð av lønarhæddaravgjaldi

Vit hava víst á, at eingi innaneftirlit tryggja, at øll avgjaldsskyldug fáa eina endaliga uppgerð, tá talan er um heilsuvirksemi. Um eitt virki av óvart ella við vilja ikki fær eina rokning, er tað eingin annar, uttan møguliga virkið sjálvt, sum boðar frá hesum. Vit hava víst á virki, sum ikki hava fingið endaliga uppgerð av lønarhæddaravgjaldi, hóast sjálvuppgávur eru innkomnar.

Blandað virksemi

Vit hava spurt, hvør orsøkin er til, at eitt virki ikki rindar lønarhæddaravgjald av tí virksemi, sum er ein partur av tænastum, sum verða veittar peningastovnunum. Vit hava ikki fingið svar.

Vandi fyri mistøkum ella svik

Vit hava víst á, at Toll- og Skattstovan ikki hevur viðgjørt spurningin um svik, og tí eru ongar ávísar mannagongdir og tiltøk sett í verk at forða fyri sviki.

Tilmæli

Í uppritinum mæltu vit Toll- og Skattstovuni til:

at seta í verk eitt virkið innaneftirlit, sum m.a. skal tryggja:
- eina fullfíggjaða skráseting,
- at øll, sum skulu gjalda lønarhæddaravgjald, gjalda røttu upphædd,
- at virkir, sum lata inn ov seint inn, eisini verða gjørd upp endaliga, og at hædd verður tikin fyri møguligum rættingum av inntøkum og lønum í "gomlum árum",

at lýsa innaneftirlitini í roknskaparreglugerðini.

at seta ein ábyrgdarpersón til umsitingina av lønarhæddaravgjaldi, og

at endurskoða sjálvvirkandi útrokningarnar.

2.3.15 Avgjald av kapitaleftirlønum (GL 2007/2 04 2-4)

Í sambandi við ráðlegging av grannskoðanini av umsitingini av rentutryggingarlógini ætlaðu vit at kunna okkum um mannagongdir og innaneftirlit.

Í mai 2007 sendu vit Toll- og Skattstovuni eitt upprit, har vit settu nakrar spurningar, og bóðu um fund við leiðsluna á Toll- og Skattstovuni.

Vit hava fleiri ferðir mint á skriv okkara, og í august 2007 sendu vit skriv til stjóran á Toll- og Skattstovuni, har vit mintu á skrivið frá mai 2007 og bóðu um ein fund. Avrit av skrivinum í august varð eisini sent til landssýrismannin. Vit fingu einki svar.

Niðanfyri hava vit í stuttum kunnað um roknskapartøl, lógarásetingar o.a. á hesum øki, og síðani hava vit greitt frá um innaneftirlit og teir spurningar, vit hava sett.

Roknskapartøl

Talvan niðanfyri vísir roknskapartølini fyri avgjaldi av kapitaleftirlønum 2001 – 2006

t.kr.

Ár	2006	2005	2004	2003	2002	2001
Avgjald av kapitaleftirlønum, 35%	16.283	17.197	10.982	9.663	10.984	7.904
Avgjald av kapitaleftirlønum, 55% (40% til 2003)	3.053	3.123	3.984	3.969	3.625	8.891
Inntøka, brutto	19.336	20.320	14.966	13.632	14.609	16.795
Flutt til kommunurnar	-7.734	-8.128	-5.987	-5.453	-5.843	-6.718
Inntøka, netto	11.602	12.192	8.979	8.179	8.766	10.077

Talvan vísir, at nettoinntøkan av avgjaldi av kapitaleftirlønum hevur ligið millum 8 - 12 mió.kr. um árið. Lutfallsliga stórur vøkstur er í 2005, tá inntøkan av avgjaldi av kapitaleftirlønum vaks við 3 mió.kr. í mun til í 2004. Umframt avgjøld, fær landskassin eisini A-skatt av kapitaleftirlønum.

Lógargrundarlag

Avgjald av kapitaleftirlønum verður umsitið og goldið við heimild í:

- løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 “um skatt av rentutrygging v.m. (rentutryggingarlógin)”,
- kunngerð nr. 41 frá 30. november 1992 frá Líkningarráð Føroya “um upplýsingarskyldu, gjaldshátt v.m. viðvíkjandi eftirlønarskipanum”,
- rundskriv nr. 3 frá 22. september 1998 frá Toll- og Skattstovu Føroya “um skattligan frádrátt fyri gjøld til tann partin av einari lívstrygging sum fer til avlamistrygging”.

Innanhýsis reglur eru ásettar í roknskaparreglugerðini hjá Toll- og Skattastovu Føroya, fylgiskriv 4N.

Eftirlønarskipanir í rentutryggingarlógini

Niðanfyri hava vit gjøgnumgingið eftirlønarskipanirnar í rentutryggingarlógini. Endamálið er m.a. at fáa eitt yvirlit yvir eftirlønarskipanirnar, fyri at leggja til rættis grannskoðanina av avgjaldi av eftirlønum.

Sambært rentutryggingarlógini er talan um 5 eftirlønarskipanir:

1. Eftirlønarskipan við stigvísari útgjalding (leypandi útgjalding) sambært § 1.
2. Lutatrygging (ratutrygging) sum eftirlønarskipan sambært § 1 A.
3. Kapitaleftirlønartrygging sambært § 1 B.
4. Eftirlønaruppsparing sambært § 1 C.
5. Lutaeftirlønaruppsparing (ratuuppsparing) sambært § 1 D.

Eftirlønarskipanir kunnu verða settar saman av fleiri skipanum.

Eftirlønarskipanir kunnu verða stovnaðar í tryggingarfelag, pensjónskassa ella peningastovni. Eftirlønarskipan í peningastovni er uppsparingarskipan burturav, mótvegis eftirlønarskipan í tryggingarstovni ella pensjónskassa.

Eftirlønarskipanir kunnu vera arbeiðsgevaraeftirlønir, har antin arbeiðsgevarin, ella arbeiðsgevarin saman við løntakaranum, gjalda til skipanina. Eftirlønarskipanir kunnu eisini verða stovnaðar sum privatar eftirlønarskipanir, har eigarin sjálvur rindar til skipanina.

Innaneftirlit

Endamálið við grannskoðanini er at kunna okkum um, hvussu Toll- og Skattstova Føroya leggur til rættis umsitingina av rentutryggingarlógini, og hvørji innaneftirlit eru sett í verk at tryggja, at skattligur frádráttur og avgjøld eru rætt roknað, herímillum eisini:

- mannagongdir í sambandi við at Toll- og Skattstovan skal góðkenna ein skattligan frádrátt á sjálvuppgávum,
- hvørjar kanningar Toll- og Skattstovan ger, í sambandi við útrokning av avgjaldinum (§ 7, stk. 3 í Ll 51/71), úrslitini av kanningunum/eftirlitunum, og
- hvussu kanningarnar/eftirlitini eru skrásett og skjalfest.

Spurningar til leiðsluna á Toll- og Skattstovu Føroya

Í einum notati frá mai 2007, spurdu vit m.a.:

- um stjórin hevur útdelegerað ábyrgdina av stovnsnummarinum, og um so er, hvør hevur ábyrgdina í dag,
- hvussu samskiftið við tryggingarfeløgini og peningastovnarnir er skipað, og hvussu Toll- og Skattstovan tryggjar sær, at upplýsingarnar eru sannar,
- hvussu Toll- og Skattstovan ansar eftir, at skattur og avgjøld verða roknað og goldin sambært rentutryggingarlógini,
- um Toll- og Skattstovan hevur skyldu at boða einum persóni frá, um hann hevur gloymt at seta frádráttin fyri eftirlønargjald á sjálvuppgávuna,
- hvussu nógvar broytingar eru gjørdar í skattskyldugu inntøkuni hjá løntakarum árini 2003 - 2006, orsakað av at inngjaldingar ikki lúka galdandi reglur og fyriskipanir um frádrátt,
- hvussu nógvar kanningar av arbeiðsgevarafrádrátti Toll- og Skattstovan hevur framt í 2005 og 2006, og hvat úrslitið var, og hvussu eftirlitini eru skjalprógvað.

Vit spurdu eisini,

- hvørji innaneftirlit tryggja:
  - *at* avgjald verður goldið, tá ið broyting er í eftirlønarskipanum, t.d. at eftirlønarskjalið er veðsett,
  - *at* skattligur frádráttur hjá einum arbeiðsgevara er rættur,
- hví mannagongdin at góðkenna ein eftirlønarsáttmála helt uppat í 2003, tá tað er ásett í kunngerð, at eftirlønarsáttmálar, sum geva rætt til frádrátt í skattskyldugu inntøkuni skulu góðkennast, og hvør gav boð um broyttu mannagongdina,
- um Toll- og Skattstovan hevur eitt skipað eftirlit við inngjaldi, frádrátti og útgjaldi av eftirlønarskipanum, sum tryggingarfeløg og peningastovnar umsita, hvussu eftirlitini eru skjalprógvað,
- harumframt ætlaðu vit eisini at umrøða vandan fyri sviki.

Tað hevur ikki borið til at fingið fund við Toll- og Skattstovuna, m.a. tí at Toll- og Skattstovan ikki kundi vísa á nakran á stovninum, sum kundi svara okkara spurningum, og tí hevur ikki borið til at kanna innaneftirlitið.

Leikluturin hjá peningastovnunum og tryggingarfeløgunum

Tað er okkara fatan, at í roynd og veru eru tað peningastovnarnir og tryggingarfeløgini, sum umsita eftirlønarskipanirnar, frá tí tær verða stovnaðar, og til tær verða goldnar út. Leikluturin hjá Toll- og Skattstovuni er at góðtaka ein eftirlønarfrádrátt á sjálvuppgávuni.

Í fyrireikingararbeiði okkara eru vit higartil ikki komin fram á:

- skrivligar mannagongdir, sum skulu tryggja, at frádráttur og avgjøld eru rætt roknað, m.a. tí at Toll- og Skattstovan ikki longur góðkennir eftirlønarsáttmálar,
- skipað eftirlit við avgjøldum, sum verða goldin á kontu hjá Gjaldstovuni, og
- at eftirlit er við frádráttum í roknskapum.

Peningastovnarnir og tryggingarfeløgini umsita partar av lógini

Vit hava víst á, at peningastovnarnir og tryggingarfeløgini kunnu sigast at vera partur av umsitingini av lógini. Tey taka m.a. støðu til, hvussu stórt avgjald skal verða goldið, um ein eftirlønarskipan kann verða útgoldin í ótíð og annars útgjalda eftirlønargjøld sum A-inntøku við egnum V-tali.

Tilmæli um grannskoðaraváttan

Vit hava mælt til at umhugsa eina skipan, har grannskoðarin hjá peningastovnunum og tryggingarfelagnum árliga váttar, at tær uppgerðir, ið latnar eru Toll- og Skattstovu Føroya viðvíkjandi eftirlønaravgjøldum og eftirlønarútgjaldingum annars, eru rættar. Grannskoðarin, ið kennir roknskaparmannagongdirnar, kann lættliga meta um, hvørt mannagongdir og bókhaldið eisini eru hóskandi skipað við atliti at útrokning, avrokning og ávísing av avgjaldi av eftirlønarskipanum.

2.3.16 Kervisskoðan (GL 1996/2 04 9-2 og GL 2005/2 04 9-4)

Avtala um kervisskoðan

Í mai 2004 góðkendi Toll- og Skattstovu Føroya, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisskoðarin á Elektron avtaluna um kervisskoðan av skipanunum hjá Toll- og Skattstovu Føroya á Elektron.

Avtalan fevnir um tann partin av teldukervinum, sum Elektron hevur ábyrgdina av, men ikki teir partar, sum eru á Toll- og Skattstovu Føroya, so sum brúkaraumsiting, mannagongdir og annað, sum eru neyðugar fyri einum tryggum og munagóðum raksturi. Átekningar frá kervisskoðaranum og grannskoðaranum á Elektron eru tí treytaðar av, at mannagongdir og skipanir annars á Toll- og Skattstovu Føroya eru tryggar.

Kervisskoðarin skal árliga:

- skoða eina ávísa brúkaraskipan,
- kanna tey øki innan fyri alment KT-eftirlit, sum ikki eru fevnd av árligu skoðanini av skipanini hjá peningastovnunum,
- halda skil á óloystum tilmælum frá kervisskoðanini,
- halda kervisyvirlitið við líka.

So hvørt eitt øki er skoðað, skal frágreiðing verða send Toll- og Skattstovu Føroya.

Harafturat skal kervisskoðarin gera eina ársfrágreiðing, sum grannskoðarin hjá P/f Elektron skal vátta.

Í ársfrágreiðingini skal vera:

- yvirlit yvir tað, sum er skoðað í árinum,
- niðurstøður hjá kervisskoðaranum,
- uppgerð yvir ikki loyst tilmæli,
- úrslit og viðmerkingar til ta almennu KT-trygdina,
- grannskoðaraváttan frá kervisskoðaranum og frá grannskoðaranum hjá Elektron.

Til skoðanina eru seks arbeiðsvikur settar av. Meirarbeiðið verður gjørt eftir rokning.

Frágreiðingar um kervisskoðan

Fyri árið 2006 hevur Toll og Skattstova Føroya útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av tveimum frágreiðingum. Tær eru:

- "Årsrapport fra Systemrevisionen 2006"
- "Generelle IT-kontroller 2006"

Hóast tað í avtaluni um kervisskoðan stendur, at kervisskoðarin árliga skal skoða eina ávísa brúkaraskipan, er eingin slík skoðan gjørd í 2005 og í 2006.

Fyri árið 2004 var serfrágreiðingin "Revision af innkrevjingarskipanin 2004".

Fyri árið 2003 var serfrágreiðingin "Revision af eToll, 2003".

Tá ið vit lesa frágreiðingarnar frá kervisskoðaranum, skulu vit m.a. hava í huga, at:

- frágreiðingarnar snúgva seg bert um tann partin av KT-kervinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya, sum verður umsitin av Elektron, ikki um partin sum Toll og Skattstovan sjálv hevur beinleiðis ábyrgdina av,
- niðurstøðurnar hjá kervisskoðaranum eru allar treytaðar av, at arbeiðsgongdir og eftirlit á Toll- og Skattstovu Føroya eru nøktandi,
- tær serskipanir, sum higartil eru skoðaðar, eToll og innkrevjingarskipanin, eru millum tær nýggjastu skipanirnar, og tískil millum tær tryggastu og frægast skjalfestu. Um aðrar og eldri skipanir høvdu verið kannaðar, høvdu tað verið fleiri viðmerkingar,
- skattaskipanin, sum er tann elsta og týdningarmesta skipanin hjá Toll- og Skattstovu Føroya á Elektron, er ikki skoðað.

Um tað eru viðurskiftir, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisskoðarin ítøkilig tilmælir.

Við árslok 2006 vóru 21 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár, tvs. frá 2005 ella eldri.

Við árslok 2005 vóru 22 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár, tvs. frá 2004 ella eldri.

Við árslok 2004 vóru 12 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár, tvs. frá 2003 ella eldri.

Við árslok 2003 vóru 4 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár, tvs. frá 2002 ella eldri.

Kervisskoðarin er ikki nøgdur við, at tað eru so mong, gomul óavgreidd tilmæli.

Av teimum sjey tilmælunum frá 2000, eru framvegis fýra óavgreidd. Eitt av teimum óavgreiddu tilmælunum frá 2000 er skjalfestingin av skattaskipanini, sum kervisskoðarin øll árini hevur sagt hevur høga raðfesting.

Í ársfrágreiðingini fyri 2003 skrivar kervisskoðarin, at skipanarskjølini til fleiri skipanir eru ófullfíggjað, og at hetta ger støðuna ótrygga. Hesa viðmerking endurtekur kervisskoðarin í frágreiðingunum fyri 2004, 2005 og aftur í 2006.

Niðurstøðan hjá kervisskoðaranum er tó, at roknskapargrannskoðanin kann líta á, at dátu-, kervis- og rakstrartrygdin á Elektron er álítandi.

3 LØGMANSFYRISITINGIN

3.1 Samskiftisútreiðslur hjá landsstýrinum (GL 1998/2 02 9-5)

Í frágreiðing til løgmann í juli 2000, um grannskoðan av samsýning landsstýrismanna, vístu vit á, at sera ymiskt var, hvussu endurrindað varð fyri telefonútreiðslur hjá landsstýrismonnum. Tí reistu vit fleiri spurningar m.a. um heimildina, hvør rætta mannagongdin var, hvussu nógv skuldi verða rindað, og hvussu nógv skuldi verða givið upp skattliga.

Í ársfreiðing okkara í januar 2007 greiddu vit frá, hvat var hent í málinum.

Í serstakari **frágreiðing "um ávísar útreiðslur"** latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007 hava vit tikið saman um og greitt frá samskifti okkara við løgmann um hesi viðurskifti.

3.2 Um lógarsmíð (GL 2003/2 07 1-4)

Ófullfíggjað lógargrundarlagið

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingunum í februar 2003, mars 2004 og aftur í januar 2007 gjørt vart við, at eftir okkara tykki er lógargrundarlagið sum heild eitt tað størsta vandamálið í umsitingini. Á fleiri málsøkjum er lógargrundarlagið ófullfíggjað.

Gongdin seinastu nógvu árini hevur vístur, at á týðandi økjum megnar landsumsitingin ikki at smíða góðar lógir og kunngerðir. Tað tykist at vera ein afturvendandi trupulleiki at manna størv við løgfrøðingum, sum hava førleika og royndir at smíða lógir. Tá ið eindirnar eru so smáar, er ofta eingin upplæring og siðvenja. Tað er kanska aftur ein atvold til starvsfólkaútskifting, og so heldur ónda ringrásin fram, "soðið verður ov tunt".

Í seinasta uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið í januar 2007, stendur m.a. um lógarsmíð:

> *"Løgtingsgrannskoðararnir hava vístur á, at tað hevur stóran týdning, at lógararbeiðið verður væl skipað. Teir hava eisini mælt til, at tað tilfar, sum verður lagt fyri Løgtingið, verður málsliga betur greitt úr hondum.*
>
> *Aðalráð og stovnar hava framhaldandi ilt við at manna størv við fólki, sum hava neyðugan førleika og royndir innan lógarsmíð, m.a. á almannaøkinum (s. 127-131)***.** *Løgtingsgrannskoðararnir halda, at verandi trupulleikar við lógarsmíði eru eitt langtíðar vandamál, ið løgmaður má taka stig til at loysa sum skjótast."*

Samskifti við løgmann í 2007

Í juli 2007 bóðu vit løgmann um viðmerkingar til hesi sjónarmið og spurdu hvørjar ætlanir løgmaður hevur.

Í oktober 2007 hevur løgmaður svarað:

> *"Løgmaður er púra samdur í, at tað hevur sera stóran týdning, at lógararbeiðið í fyrisitingini er væl skipað og væl greitt úr hondum í allar mátar. Tí verður alla tíðina roynt at betra um viðurskiftini ikki minst nú, nakað trupult hevur verið við at manna ávís løgfrøðilig størv í miðfyrisitingini, og tað hevur staðið á hjá løgdeildini í Innlendismálaráðnum at eftirkanna lógaruppskotini.*
>
> *Tí hevur løgmaður júst sett í verk eitt útgreiningararbeiðið til tess at betra munandi um lógardygdina. Málið varð viðgjørt herfyri á serligum seminari fyri ovastu stjórunum í miðfyrisitingini. Grundað á hesa viðgerð eru stjórarnir farnir undir eina felags verkætlan at seta langtíðarmál fyri lógardygdina og at greina lógarøkið. Út frá hesum skal ein strategi leggjast, so vit miðvíst og stigvíst koma á mál.*

Í hesum sambandi er arbeiðsbólkur settur við luttøku av einum umboði frá hvørjum stjórnarráði. Í hesum bólki eru millum annað okkara mest royndu løgfrøðingar í miðfyrisitingini umframt tríggir aðalstjórar.

Arbeiðið verður fylgt upp av stjóraráðnum, samstundis sum ætlanin er at grundfesta tað væl millum starvsfólkini í miðfyrisitingini."

3.3 Stjórnan av KT og KT-trygd

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava í mong ár víst á nakrar yvirskipaðar trupulleikar í landsumsitingini, sum bert kunnu verða loystir, um samstarvað verður tvørtur um aðalráð og tvørtur um kommunala bygnaðin.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar 12. januar 2007 umrøddu vit aftur tílík viðurskifti, m.a. vantandi stjórnan av kunningartøkni og kunningartrygd, og í hesum sambandi eisini málið um effektivisering av umsitingini.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið í januar 2007 (Lm. nr. 54-1/2006), høvdu løgtingsgrannskoðararnir eisini fleiri viðmerkingar, átalur og áheitanir hesum viðvíkjandi.

Í serstakari **frágreiðing "um stjórnan av KT og KT-trygd"**, latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007 hava vit m.a. tikið saman um og greitt frá samskifti okkara við løgmann um hesi viðurskifti.

Endamálið við hesari frágreiðing er at kunna løgtingsgrannskoðararnar um, hvørjar broytingar eru framdar, og hvussu støðan er í dag.

4 Fiskivinna

4.1 Grannskoðan av Fiskimálaráðnum (GL 2007/2 14 1-6)

Í 2007 hava vit grannskoðað Fiskimálaráðið, við støði í einum spurnablaði, sum vit høvdu sent stovninum, viðvíkjandi roknskapar-, lønar-, KT- og øðrum viðurskiftum, sjá **fylgiskjal III**. Undan vitjanini hevði leiðslan svarað spurnablaðnum og sent okkum tað.

Niðanfyri er í stuttum tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

- Endamál, virksemi og uppgávur hjá Fiskimálaráðnum eru ikki orðað og lýst. Ætlanir eru um at orða og lýsa hesi – sum part av dygdarmenningarskipan fyri ráðið. Fiskimálaráðið vísti til viðmerkingarnar til fíggjarlógina og til heimasíðuna.
- Tilfeingisnýtslan er ikki býtt út á einstøku uppgávurnar. Ein klokkuskipan verður brúkt til at skráseta sjúku, frítíð, avspáking o.l.
- Fiskimálaráðið hevur eina roknskaparreglugerð, sum er frá 2001. Tørvur er á at dagføra hana.
- Fiskimálaráðið er ikki ajour við at góðkenna greinaroknskapin.
- Fiskimálaráðið nýtir journalskipanina Doculive. Mannagongd fyri journalisering eru í starvsfólkahondbókini.
- Ognaryvirlitið er dagført í august 2007.
- Fiskimálaráðið hevur, við hjálp frá einum grannskoðarvirki, gjørt eina váðameting í januar 2005.
- Fiskimálaráðið hevur orðað ein KT-politikk. Landsgrannskoðanin heldur, at "KT-politikkurin hjá Fiskimálaráðnum" meira er talan um einstakar ásetingar á KT-trygdarøkinum.
- Fiskimálaráðið hevur kunnað um, at reglur eru í starvsfólkahandbókini um flekstíð/avspáking og lønarfrádráttir, men reglurnar verða ikki fylgdar, og at umsitingin á økinum skuldi verið strammað upp.
- Vit kannaðu við stakroyndum, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking, stigum o.ø. Hóast ongar lønargjaldsumbønir vóru í teimum báðum málunum vit kannaðu, benda stakroyndirnar á, at lønarsatsir, útrokningar o.a. eru rættar.
- Fiskimálaráðið nýtir ikki eina skipaða mannagongd fyri at finna svik, ið er farið fram. Men stakroyndir verða gjørdar, við støði í kontukortunum. Mannagongdir eru ásettar í sambandi við umsiting av fískiloyvum. Mannagongdin er ikki lýst skrivliga, ein listi við 11 punktum skal gjøgnumgangast.

4.2 Lønjavningarstovan (GL 2003/2 14 4-7)

KT-viðurskifti

Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir víst á, at trupulleikarnir í gomlu KT-skipanunum eru ikki loystir. Fiskimálaráðið er farið undir at endurnýggja partar av KT-skipanunum. Landsgrannskoðanin helt tað vera óheppið, at Fiskimálaráðið ikki hevur gjørt nakrar kravfestingar, og vit hava mælt til, at uppgávan at dagføra KT-skipanirnar hjá Lønjavningarstovuni fer fram sum liður í yvirskipaðari heildarætlan.

Í mars 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at KT-verkætlanin varð steðgað, tá ið játtanin varð skorin av fíggjarlógini í 2004.

Í januar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki var hent í málinum, men ætlanir vóru um at fáa ment nýggjar skipanir til Lønjavningarstovuna frá 2006. Talan er um stórar íløgur, sum kunnu koma at strekkja seg yvir ár.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, umrøddu løgtingsgrannskoðararnir eisini málið:

> *"EDV-verkætlanin at endurnýggja verandi skipanir steðgaði í 2004, tá játtanin varð skorin burtur. Ætlanin er at fara undir aftur arbeiðið í 2006, og sambært landsstýrismanninum er talan um stórar íløgur, sum strekkja seg yvir fleiri ár. Løgtingsgrannskoðararnir mæla til, at arbeiðið verður gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið, sum liður í einari yvirskipaðari heildarætlan, har eisini verandi uppgávur hjá Lønjavningarstovuni verða endurskoðaðar".*

Í oktober 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Fiskimálaráðið er byrjað at gera kravfestingar til KT-skipanirnar á Lønjavningarstovuni, men enn er ikki komið á mál.

Sambært landsstýrismanninum ber ikki til at greiða gjøllari frá, hvørjar ætlanirnar eru, ella hvussu stórur íløgutørvurin er. Í tráð við galdandi reglur fer Fiskimálaráðið at samstarva við Fíggjarmálaráðið um menningina av KT-skipanum og fer at taka atlit til krøv og royndir hjá øðrum stovnum, sum hava líknandi KT-skipanir. Fiskimálaráðið hevur tó ikki ætlanir um at endurskoða verandi uppgávur hjá Lønjavningarstovuni.

Í august 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at kravfestingin er um at verða liðug, og arbeiðið verður boðið út í heyst 2007. Sambært landsstýrismanninum er ætlanin at biðja um fígging á løgtingsfíggjarlógini 2008.

Landsgrannskoðanin kann viðmerkja, at sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið 2008 er undir Fiskimálaráðnum játtaðar 1,8 mió.kr. til menning og umskipan av KT-skipanum, m.a. á Lønjavningarstovuni og á Skipaskrásetingini.

5 Vinnumál

5.1 Stjórnan av KT og KT-trygd

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava í mong ár víst á nakrar yvirskipaðar trupulleikar í landsumsitingini, sum bert kunnu verða loystir, um samstarvað verður tvørtur um aðalráð og tvørtur um kommunala bygnaðin.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar 12. januar 2007 umrøddu vit aftur tílík viðurskifti, m.a. vantandi stjórnan av kunningartøkni og kunningartrygd, og í hesum sambandi eisini málið um effektivisering av umsitingini.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið í januar 2007 (Lm. nr. 54-1/2006), høvdu løgtingsgrannskoðararnir eisini fleiri viðmerkingar, átalur og áheitanir hesum viðvíkjandi.

Í serstakari **frágreiðing "um stjórnan av KT og KT-trygd"**, latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007 hava vit m.a. tikið saman um og greitt frá samskifti okkara við landsstýrismannin í vinnumálum um hesi viðurskifti.

Endamálið við hesari frágreiðing er at kunna løgtingsgrannskoðararnar um, hvørjar broytingar eru framdar, og hvussu støðan er í dag.

5.2 Grannskoðan av ymiskum stovnum:

Í 2007 hava vit grannskoðað ymiskar stovnar undir Vinnumálaraðnum, við støði í einum spurnablaði, sum vit høvdu sent stovnunum, viðvíkjandi roknskapar-, lønar-, KT- og øðrum viðurskiftum, sjá **fylgiskjal III**. Undan vitjanini hevði leiðslan svarað spurnablaðnum og sent okkum tað. Stovnar, sum vit hava vitjað í 2007 eru:

- Heilsufrøðiliga Starvsstovan
- Arbeiðseftirlitið
- Jarðfeingi
- Akstovan
- Skráseting Føroya

Niðanfyri er í stuttum tikið samanum úrslitið av grannskoðanini. Fyrst verður greitt frá almennum viðmerkingum, sum eru felags fyri fleiri stovnar, og síðani verður greitt frá grannskoðanini av stovnum, har serlig viðurskifti verða umrødd.

Eru endamál, virksemi og uppgávur stovnsins orðað og lýst

Endamálini hjá stovnunum eru í flestu førum lýst í lógum, tilhoyrandi kunngerðum, reglugerð og í fíggjarlógini.

Skrásetingar um nøgd og góðsku sum lýsa virksemi og tilfeingisnýtslu

Bert fáir stovnar hava skrásetingar, sum í nøgd og góðsku kunnu lýsa, hvat stovnurin avrikar, ella hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar (t.d. tíðarnýtsla hjá starvsfólki).

Roknskaparviðurskifti o.a.

Vísandi til § 5, stk. 1 í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 22/2007 "um roknskaparverk landsins o.t." hava vit spurt, um stovnurin hevur eina roknskaparreglugerð, um hon er góðkend, dagført og formliga skipað innan karmarnar av roknskaparrundskrivinum.

Jarðfeingi hevur ikki eina góðkenda roknskaparreglugerð. Hinir hava eina góðkenda roknskaparreglugerð, sum er skipað innan karmarnar í rundskrivinum. Reglugerðirnar eru ikki dagførdar, m.a. eru mannagongdir á roknskaparøkinum broyttar, eitt nú í sambandi við at farið er yvir at nýta verkgongdarskipanina hjá Føroya Gjaldstovu.

Roknskapargóðkenning

Vit spurdu, um mánaðarroknskapirnir regluliga og rættstundis verða góðkendir mótvegis hægri myndugleika.

Flestu stovnarnir góðkenna mánaðarroknskapin ein mánað forskotið. Arbeiðseftirlitið góðkennir mánaðarroknskapirnar hálvárliga, men ætlar at góðkenna rættstundis í framtíðini.

Journalviðurskifti

Vit spurdu, um stovnarnir hava eina journalskipan, og um teir hava skrivligar mannagongdir um journalisering.

Allir stovnarnarnir nýta DokuLive, tó ikki Skráseting Føroya, sum nýtir aðrar journalskipanir. Stovnarnir hava skrivligar mannagongdir í sambandi við journalisering.

Landsgrannskoðanin heldur, at mannagongdin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni er fyrimyndarlig, og at aðrir landsstovnar uttan iva kundu havt gleði av at lisið hana.

Ognaryvirlit

Vit spurdu stovnarnar, um teir hava eitt dagført yvirlit yvir ognir sínar.

Flestu stovnarnir hava ognaryvirlit, sum er dagført í 2007, onkur í 2006. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði eitt ognaryvirlit frá 2002, sum varð gjørt í sambandi við roknskaparárið 2001.

Trygdartiltøk á KT-økinum

Skráseting Føroya og Akstovan hava gjørt eina váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtsluni. Allir stovnarnir hava skipað ymisk trygdartiltøk á KT-økinum, eitt nú brandmúr, virusverju, persónlig brúkaranøvn og loyniorð, ið javnan verða skift.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Skráseting Føroya hava orðað ein trygdarpolitikk, sum tó ikki eru dagførdir. Stovnarnir vísa á, at bíðað verður til samráðingarnar við LandsNet eru komnar uppá pláss. Akstovan sigur seg hava orðað ein trygdarpolitikk, og Arbeiðseftirlitið hevur gjørt eina kladdu, men er ikki komin víðari.

Lønarumsiting

Vit spurdu, um leiðslan hevur eina skrivliga mannagongd um:

- at seta fólk í starv, loysa fólk úr starvi, áseta lønarflokk, flyta í hægri lønarflokk, geva lønarískoyti o.t.,
- at áleggja yvirtíðararbeiði/ meirarbeiði og tænastuferðir,
- at góðkenna, at lønarútgjaldingarnar eru rættar,
- hvør setir fólk í starv, hvat skjalatilfar verður kravt (umsókn, setanarbræv o.a.).

Vit spurdu eisini, um leiðslan hevur skrivliga lýsing av dagligu lønarumsitingini, herímillum hvussu arbeiðstíð, frítíð, avspáking, sjúka o.a. verður skrásett.

Samanumtikið vóru svarini frá stovnunum, at teir hava egnar skrivligar mannagongdir í roknskaparreglugerð og starvsfólkahondbók. Nakrar skrivligar mannagongdir fyri setan av starvsfólki og yvirtíð eru ásettar í roknskaparreglugerðunum hjá flestu stovnum.

Samanumtikið hava bert fáir stovnar hóskandi tíðarskráseting, og í flestu førum verður tíðarskrásetingin ikki váttað.

Í sambandi við vitjanirnar úti á stovnunum kannaðu vit, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking, stigum o.ø. Hesar stakroyndir benda á, at lønarsatsir, útrokningar o.a. eru rættar.

Vandi fyri mistøkum og sviki

Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard hava vit spurt, um leiðslan hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri seg av mistøkum ella sviki.

Samanumtikið benda svarini á, at leiðslurnar ikki hava sett nøkur tiltøk í verk at forða fyri sviki. Stovnarnir vísa á, at teir brúka Verkgongdarskipanina á Føroya Gjaldstovu, sum hevur innbygdan skilnað millum tey, sum skráseta og tey, sum leysgeva, og tí duga leiðslurnar ikki at síggja, at tað ber til at svika. Samanumtikið hava leiðslurnar ikki kunnleika um, at svik er framt, illgruna um svik, hoyrt um skuldsetingar um svik.

5.2.1 Heilsufrøðiliga Starvsstovan (GL 2007/2 08 2-5)

Langtíðarleiga

Heilsufrøðiliga Starvsstovan langtíðarleigar 2 kopimaskinur. Stovnurin kennir reglurnar í játtanarskipanini, men tey halda, at leigukostnaðurin er minni tyngjandi frá ári til ár, enn um stovnurin keypir nýggja.

Inntøkur

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur í roknskaparreglugerðini, eina skrivliga mannagongd, sum lýsir heimild, skráseting, prísáseting, avsláttir og kredittir. Landsgrannskoðanin heldur, at henda mannagongd kundi verið nýtt sum íblástur hjá øðrum stovnum, ið hava inntøkur.

Stjórin kunnaði um, at prísásetingin hjá kanningarstovuni er gjørd útfrá bestu sannføring og prísum hjá tilsvarandi kanningarstovum uttanlands. Prísurin á gjøldum er vanliga ásettur í kunngerð ella í reglugerð. Avsláttur verður veittur sambært ásetingum í kunngerð nr. 37 frá 20. mars 2000.

5.2.2 Arbeiðseftirlitið (GL 2007/2 09 2-2)

Arbeiðseftirlitið hevur skrivliga mannagongd, sum lýsir heimild, skráseting og prísáseting, sum er ásett í kunngerð, sum hevur heimild í arbeiðsumhvørvislógini, og til príslista, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur góðkent.

Ásetingar eru eisini í roknskaparreglugerðini um heimild og prísáseting. Ásetingar eru ikki um avsláttur og kredittir.

Arbeiðseftirlitið kunnaði um, at í sambandi við skeið vórðu rokningar vanliga sendar arbeiðsgevaranum, áðrenn skeiðið verður hildið. Um arbeiðsgevarin sendir “broytt tal av fólki” á skeið, verður kreditnota skrivað.

Tá ið loyvisbrøv/koyrikort o.a. verða send út, verða tey send út “pr. uppkrav”, og goldið verður á girokontuna hjá stovninum.

Landsgrannskoðanin gjørdi vart við, at kassauppgerðarskjølini verða bókað á ein sovorðnan hátt, at salda á girokontuni sæst ikki í landsbókhaldinum.

Landsgrannskoðanin mælti til at gera mannagongd, sum tryggjaði, at allar inntøkur, sum eiga at verða skrásettar, verða skrásettar. Bæði tá ið talan er um eftirlit, sum rindað verður fyri, og tá ið talan er um útleigan av amboðum.

5.2.3 Jarðfeingi (GL 2007/2 12 3-2)

Jarðfeingi hevur greitt frá, at stovnurin hevur fasta avtalu um prís við Landsverk og oljufeløg. Tey vístu eisini á K. nr. 34/2001 "um endurrindan av útreiðslum í sambandi við kolvetnisvirksemi". Í § 2, stk. 1, er ásett, at tímagjaldið er 740 kr.

Jarðfeingi greiddi frá, at tá ið arbeiði verður gjørt fyri Landsverk, nýtir stovnurin somu prísir sum ráðgevandi verkfrøðingar (løn + 110%). Tey vístu á, at taksturin var lægri, um "nýklaktur jarðfrøðingur" varð nýttur, heldur enn "royndur jarðfrøðingur". Vit hava spurt, hvørja heimild Jarðfeingi hevur at taka gjald fyri tílíkar tænastur. Jarðfeingi hevur sent okkum avrit av samstarvsavtalu, sum Landsverk og Jarðfeingi hava gjørt. Jarðfeingi hevur greitt frá, at talan er um formalisering av samstarvinum stovnanna millum, og at Vinnumálaráðið hevur ikki verið partur av viðgerðini, tá ið avtalan varð gjørd.

5.2.4 Akstovan (GL 2007/2 16 9-8)

Stjórin á Akstovuni vísti á orðingarnar í § 64 í ferðslulógini, men tað er eingin kunngerð fyri virksemi stovnsins í lógini. Akstovan hevur roynt sjálv, í bygnaðarlýsing frá 2000, at lýsa uppgávur stovnsins. Síðani stovnurin orðaði hesa bygnaðarlýsing, hevur hann eisini fingið álagt umsitingina av vegskatti (flutt frá Gjaldstovuni) og av skrásetingargjaldinum (frá Toll- og Skattstovuni). Stovnurin er tí broyttur frá at vera ein eftirlitsstovnur/tekniskur stovnur, til eisini at vera ein umsitingarligur stovnur.

<u>Egnar búskapanarskipanir</u>

Stovnurin hevur egna kassaskipan, sum er ment sum ein forskipan til Búskaparskipan Landsins, og eina útrokningarskipan til skrásetingargjøld. Henda skipan hevur ikki samband við Búskaparskipan Landsins. Í staðin verða útrokningarnar skrásettar í kassaskipanini.

5.2.5 Skráseting Føroya (GL 2007/2 05 9-7)

Skráseting Føroya hevur "manuellan kassa" á avgreiðsluni, har tikið verður ímóti inngjøldum frá viðskiftafólki o.ø. Inntøkurnar verða skrásettar í høvuðsbók í Búskaparskipan Landsins.

Vanliga verður rokning fyri ársgjaldið, sum feløg skulu rinda, send út í mai/juni, men rokningin fyri 2006 varð ikki send út fyrrenn í januar 2007. Stjórin vísti á, at núverandi mannagongd er alt ov tung. Tosað verður við Gjaldstovuna um at finna eina loysn.

5.3 <u>Kassaeftirlit á Skráseting Føroya</u>

Í september 2007 var Landsgrannskoðanin ófráboðað á kassaeftirliti á Skráseting Føroya. Endamálið við vitjanini var at kanna, um stovnurin umsitur inntøkurnar á tryggan hátt, herímillum eisini um samsvar er millum kassa- og peningastovnskontur í landsbókhaldinum og uttanhýsis kontuavrit.

Skráseting Føroya hevur ein avgreiðslukassa, 2 peningastovnskontur og eina girokontu, har inntøkur verða rindaðar.

Samanumtikið halda vit, at umsitingin av avgreiðslukassanum virkar sera væl. Vegna starvsfólkaskifti var stovnurin afturút við skrásetingum og avstemmingum. Tað er síðani komið í rættlag. Vit vístu á, at stovnurin hevði ov nógv standandi inni á peningastovnskontum. Avtalað er eftirsíðan gjørd við Gjaldstovuna um gjaldførið.

5.4 Búnaðarstovan (GL 2006/2 13 2-6)

Landsgrannskoðanin hevur í januar 2007 kunnað seg gjøllari um umsitingina á Búnaðarstovuni.

Í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum 1. februar 2001 um roknskaparreglugerðir verða ítøkilig krøv sett til, hvussu innaneftirlitið á roknskaparøkinum á einum stovni skal verða skipað, og skal tað vera skjalfest í einari roknskaparreglugerð.

Vit fingu í desember 2005 avrit av roknskaparreglugerðini. Vit gjøgnumgingu hana og settu nakrar spurningar, tá vit vóru á vitjan í januar 2007.

Samanumtikið halda vit roknskaparreglugerðina vera nøktandi.

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skal stovnsleiðarin hvønn mánað góðkenna roknskapin mótvegis møguligum hægri myndugleika, og honum er álagt at hava eftirlit við, at ásettu mannagongdirnar verða hildnar. Í punkti 2.1 í rundskrivinum er ásett, hvat tað merkir, at stovnsleiðarin hevur góðkent roknskapin.

Í januar 2007 greiddi stovnsleiðarin frá mannagongdini. Vit hava einki at finnast at.

5.5 Søla av landsjørð (GL 2006/2 13 2-6)

Landsgrannskoðanin hevur í 2007 kunnað seg gjøllari um umsitingina av sølu av almennari jørð.

Lógargrundarlagið

Lógargrundarlagið undir sølu av almennari jørð í 2006 er:

- Ll. nr. 20 frá 17. mai 2004 “um landsjørð”,
- K. nr. 98 frá 22. desember 2004 “um festi”, seinast broytt við K. nr. 56 frá 10. mai 2005,
- Ll. nr. 21 frá 17. mai 2004 “um Búnaðargrunn”,
- K. nr. 97 frá 22. desember 2004 “um Búnaðargrunn”, seinast broytt við K. nr. 57 frá 10. mai 2005.

Nýggj lóg

Nýggja lógin um landsjørð varð samtykt í Løgtinginum 8. mai 2007 og lýst 15. mai 2007 sum Ll. nr. 45.

Sambært § 12, stk. 1, kemur lógin í gildi, tá ið tað í kunngerð verður ásett av landsstýrismanninum. Sambært K. nr. 94/2007 “um gildiskomu av løgtingslóg um landsjørð” kemur lógin í gildi 1. november 2007.

23. oktober 2007 varð lýst K. nr. 95 “um umsiting av landsjørð” við gildiskomu 1. november 2007.

Søla av landsjørð

Sambært løgtingslóg nr. 20 frá 17. mai 2004 um landsjørð er heimilað at selja burtur av landsjørð til almenn endamál, t.d. til grundstykkir til húsabygging, handils- og ídnaðar-, havbúnaðar-, ítrótta- og frítíðarendamál.

Eftir § 5 í løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 "um Búnaðargrunn" skal ágóðin av søluni flytast Búnaðargrunninum og verða bókaður á kontu hjá avvarðandi festi. Talan er um eina fyri landskassan útreiðsluneutrala játtan. Tað er sera ymiskt, hvussu nógv almenn jørð verður seld hvørt árið, og er játtaða upphæddin tí bert ein meting, sum byggir á søluna undanfarin ár.

Sambært § 10 í Ll. nr. 20/2004 "*verður Búnaðarstovuni heimilað, burtur av landsjørð, at selja jørð til almenn endamál, grundstykkir til húsabygging, handils- og ídnaðar-, havbúnaðar-, ítrótta- og frítíðarendamál v.m.*".

Í sambandi við grannskoðan okkara bóðu vit Búnaðarstovuna um at greiða okkum frá mannagongdum og reglum í sambandi við sølu av jørð. Vit høvdu valt tvær sølur í 2006 sum dømi:

- Øki til barnagarð í Miðvági, og
- Øki til útstykking við Norðskála.

Búnaðarstovan greiddi frá, at tað kemur fyri, at fólk venda sær til Búnaðarstovuna fyri at keypa. Búnaðarstovan selir stórt sæð bara til kommunur. Mannagongdin er:

- Hoyringarskriv verður sent til festaran.
- Avvarðandi kommuna verður biðin um at gera viðmerkingar til møguliga sølu, og má broyta byggisamtyktina um neyðugt.
- Stykkið verður mált upp og frámatrikulerað.
- Játtanarskriv verður sent kommununi.
- Áðrenn skeytið verður skrivað og tinglýst, skal kommunan gjalda upphæddina á kontu í Føroya Banka.
- Búnaðarstovan heitir síðani á Føroya Gjaldstovu um at flyta peningin fyri søluna til Búnaðargrunnin.

<u>Prísir</u>

Sambært Ll. nr. 20 frá 17. mai 2004 "um landsjørð" "*verður Búnaðarstovuni heimilað, burtur av landsjørð, at selja jørð til almenn endamál, grundstykkir til húsabygging, handils- og ídnaðar-, havbúnaðar-, ítrótta- og frítíðarendamál v.m. Áðrenn jørð verður seld burtur av einum festigarði ella leigutrød, eigur festarin/leigarin at verða eftirspurdur.*"

Sambært løgtingsfíggjarlógini 2007 vóru prísirnir seinast reguleraðir í 2003:

1. 60 kr. fermeturin fyri jørð á stórplássum, t.d. Tórshavn og Klaksvík,
2. 49 kr. fermeturin fyri jørð í bygdum, sum eru bundnar saman ella hava gott ferðasamband, t.d. Kvívík og Sandavág,
3. 38 kr. fermeturin fyri jørð á útoyggj.

Harumframt verður goldið fyri avloysing av biti, tinglýsing og sakargjald.

Spurdur, hvør ásetir prísin, og á hvørjum grundarlag prísirnir verða reguleraðir, greiddi Búnaðarstovan frá, at Føroya Jarðarráð hevði umsitið landsjørðina til 1. januar 2005. Tá varð økið lagt til Búnaðarstovuna. Føroya Jarðarráð hevur selt lendi lutfalsliga bíliga, og mangt bendir á, at siðvenjan gongur aftur til 1937. Sambært "lov nr. 174 af 24. maj 1937 om landbrugets fremme" kundi Jarðarráðið útvega dyrkilendi ella

byggilendi til ein sámuligan prís. Um eigari sýtti at selja, kundi kommunan ognartaka privata jørð, og tá varð prísurin ásettur av metingarmonnum.

Føroya Jarðarráð hevði fastar prísir, sum vórðu dagførdir við millumbili. Prísurin var ymiskur, alt eftir hvar í landinum lendið lá, og um talan var um dyrkaða, innangarðs- ella uttangarðsjørð. Búnaðarstovan hevur fyribils valt at føra somu prísskipan víðari. Stjórin greiddi frá, at Búnaðarstovan ætlaði at regulera prísin fyri jørð í Tórshavn til um 90 kr. fermeturin.

Málið hevur verið nógv viðgjørt síðani januar 2005. Í notati til Vinnumálaráðið í januar 2006 reisti Búnaðarstovan spurningin, um landsjørð skuldi verða alment boðin út til sølu til hægstbjóðandi ella til fastan prís.

Í skrivi 11. desember 2006 frá Vinnumálaráðnum til Búnaðarstovuna verður í einari niðurstøðu sagt:

at tað er ein kommunal uppgávu at útvega hóskandi útboð av byggilendi,

at kommunan eigur at kunna stýra útbyggingini í kommununi,

at tillutan av og prísásetingin hjá kommunum tryggjar, at øll hava eins góðan møguleika at ogna sær eitt grundstykki til eins treytir, og at prísásetingin er saklig og gjøgnumskygd,

at kommunan í sínum virksemi sum formidlari av byggilendi er undir kommunulóggávuni og undir eftirliti av landsstýrismanninum í innlendismálum,

at landsjørð sum meginregla ikki verður boðin út alment til sølu,

at jørðin verður seld kommunum til ein fastan prís.

Vinnumálaráðið boðaði frá, at Búnaðarstovan kann regulera prísin sum higartil, men kommunurnar skulu frammanundan fáa boð um tað. Vinnumálaráðið mælti eisini til at útvega greiðari lógargrundarlag.

<u>Nýggj lóg</u>

Sambært § 11 í nýggju lógini - Ll. nr. 45/2007 - *"ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð nærri reglur um, hvussu jarðarprísir, prísir fyri bygningar á festum, gjøld fyri avloysing av biti, prís fyri innistøðuna o.a. og gjøld fyri leigu av jørð verða ásett."*

Landsstýrismaðurin hevur í § 7 í K. nr. 95 frá 23. oktober 2007 "um umsiting av landsjørð", við gildiskomu 1. november 2007, ásett, at "*Búnaðarstovan kann selja landsjørð fyri ein frammanundan ásettan prís srt. fylgiskjali A.*"

Prísur fyri almenna jørð sbrt. fylgiskjali A er (krónutal fyri fermeturin):

	Hagi, ið ikki er gott bit og ikki er dyrkingarbærur	Góð hagajørð og hagi, sum kann dyrkast	Velt lendi og væl dyrkingarbært lendi, sum liggur væl fyri	Gott lendi (lendi C), sum liggur serliga væl fyri
Øki 1 Tórshavn	89	110	137	eftir meting
Øki 2 Onnur miðøki	71	88	110	eftir meting
Øki 3 Størru bygdirnar	58	71	89	eftir meting
Øki 4 Smápláss í miðøki og útjaðari	45	55	69	eftir meting
Øki 5 Útoyggj og lendi millum bygda	22	27	34	

Á heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni er eitt yvirlit, har sæst, hvussu bý/bygdir eru bólkaðar.

Sakargjøld

Sambært roknskaparreglugerðini verða, í sambandi við ymiskar málsavgreiðslur á Búnaðarstovuni, tikin sakargjøld, sum byggja á ein "áralangan praksis" hjá Føroya Jarðarráð. Vit gjørdu vart, at almenn gjøld skulu hava heimild í lóg ella verða ásett í kunngerð við heimild í lóg.

Sambært § 11 í Ll. nr. 45/2007 "*ásetir landsstýrismaðurin sakargjøld, sum Búnaðarstovan kann krevja*". Tað hevur landsstýrismaðurin ásett í § 11 í K. nr. 95/2007 á hendan hátt:

> *§ 11. Búnaðarstovan ásetur sakargjøld í sambandi við sølu av jørð, makaskifti, marknaumskipan, servituttstriking, festaraskifti og sáttmálar.*
>
> *Stk. 2. Sakargjøldini skulu endurskoðast í minsta lagi triðja hvørt ár.*

Landsstýrismaðurin hevur sostatt ikki ásett nærri reglur í kunngerðini, men einans skrivað, at Búnaðarstovan ásetur nærri reglur. Landsgrannskoðanin heldur ikki, at landsstýrismaðurin á hendan hátt kann "delegera" eina lógarásetta skyldu at áseta sakargjøld til Búnaðarstovuna.

Søla av lendi til Stórutjørn og víðarisøla av traðum

Bjørn á Heygum, advokatur, hevði í bløðunum í oktober 2006 eina gein við heitinum: "Stóratjørn – startskot: Ein almennur kekkur uppá umleið ½ mia. kr." Vit bóðu Búnaðarstovuna um viðmerkingar til ávís sjónarmið í greinini.

<u>Søla beinleiðis til privatpersónar</u>

Í greinini verður m.a. fört fram:

> "*Kommunulógin sigur heilt greitt, at kommunurnar skulu bjóða alla jørð út í fríum handli. § 44 í kommunulógini sigur orðarætt, so onki skal vera at taka feil av: Føst ogn hjá kommununi má ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongdina við almennum útboði umframt reglur um, at ávísar ognir kunnu undantakast almennum útboði.*
>
> *Tað er ikki so langt frá at hugsa sær, at teir nú finna uppá tey ráð, at landið sjálvt ella Búnaðarstovan skal selja ella rættari sagt geva ognina til Jákup á Dul. Her er eingin § 44, sum blokerar fyri slíkari undirhondssølu.*
>
> *Bjarni Djurholm, sum varðar av Búnaðarstovuni, kann soleiðis uttan beinleiðis lógarforðingar ájavnt § 44 í kommunulógini avreiða almennar ognir til útvaldar persónar fyri ½ mia.kr.*
>
> *Men hesin møguleiki fyri at skáka sær undan kommunulóggávuni er neyvan til staðar.*"

Búnaðarstovan hevur greitt frá, at tað ikki er lógarásett, hvussu prísurin skal verða ásettur, ella til hvønn prís selt verður. Búnaðarstovan selir tó í høvuðsheitum bert til kommunur, og tí er møguleikin fyri beinleiðis sølu til privatpersónar ikki til staðar í praksis.

Sum víst á frammanfyri, er prísurin nú ásettur í kunngerð, ið kemur í gildi 1. november 2007. Vísandi til fylgiskjal A í kunngerðini verður fermeturprísurin fyri sølu av Stórustjørn ætlandi 110 kr. fyri m^2, ein partur kanska 137 kr. fyri m^2.

<u>Lógarheimild at selja fyri undirprís (gáva)</u>

Í greinini verður m.a. fört fram:

> "*Studningur, t.v.s. veitingar, sum eru at sammeta við gávur, eru eyðsæð gávur, sum eisini krevja játtan.*

Er so ein gáva úr landskassanum, sum elvir til eina virðisminking av almennum aktivum uppá ½ mia. kr., og sum júst hevur somu avleiðing fyri landskassaroknskapin sum ein og hvør studningur, so ikki ein avgerð, sum krevur játtan á fíggjarlógini, er nærliggjandi at spyrja."

Búnaðarstovan hevur greitt frá, at materiella heimildin at selja finst í Ll. nr. 20/2004 "um landsjørð", og fíggjarliga heimildin finst í fíggjarlógini. Búnaðarstovan hevur eisini hugt eftir prísinum, sum verður latin fyri ognartøku.

Landið eigur umleið helmingin av allari jørð í Føroyum, og í prinsippinum kann Búnaðarstovan økja útboðið av jørð "óendaliga". Tí ber ikki til at samanbera prísin við eitt einstakt grundstykki mitt í høvuðsstaðnum. Stjórin heldur, at eitt barometur fyri prísin á landsjørð til byggilendi til kommunur er tað, sum kommunur mega rinda privatum í sambandi við ognartøku.

Í støðum er stórur prísmunur á landsjørð og ognarjørð, sum privat selja. Við at økja útboðið kann Búnaðarstovan taka grundarlagið undan privatari sølu av jørð. Prísurin fyri landsjørð má hinvegin ikki vera so lágur, at tað eggjar til "ovurnýtslu" av lendi til býarmenning, vinnulig endamál og undirstøðukervi. Er ov stórur munur millum prísin á landsjørð og marknaðarprísin, kann tað virka avlagandi og kann eggja til størri eftirspurning eftir góðum lendi, enn møguligt er at nøkta, sum frá líður.

Víðarisøla av traðum

Í greinini verður undir yvirskriftini "Virðismeting av almennum ognum", m.a. fört fram:

"Føroyski borgarin skal vita, at óteljandi og ítøkilig dømi eru um, at Búnaðarstovan, sum sambært servitutti eigur helvt av staðfesta ágóðanum í sambandi við víðarisølu av jørð, sum er latin privatum, framvegis bert krevur ½ av symbolska prísinum ella ca. 27 kr. pr. m^2, hóast tað kann staðfestast, at prísurin fyri jørðina er kanska 500 kr. pr. m^2. Upp á fyrispurning hevur Búnaðarstovan upplýst, at hetta er eftir boðum frá Landsstýrinum, at henda skilaleysa og óforsvarliga mannagongd skal halda fram. Við einum slíkum servitutti í hondini skuldi og átti tað verið skyldan hjá Búnaðarstovun, ið umboðandi føroyska skattaborgaran, at kravt t.d. 250 kr. pr. m^2, og ikki latið t.d. privatar arvingar, sum als ikki hava gjørt seg fortjentar til nakað sum helst, strokið avstað við øllum profittinum."

Búnaðarstovan hevur greitt frá, at tað er rætt, at sambært servitutti kann Jarðarráðið krevja helvtina av ágóðanum í sambandi við víðarisølu av traðum. Mannagongdin hjá Jarðarráðnum hevur verið at krevja helvtina av fermetraprísinum, sum til eina og hvørja tíð hevur verið galdandi siðvenja hjá Jarðarráðnum. Búnaðarstovan hevur hildið fram við hesari siðvenju.

Í mars 2007 heittu vit á Búnaðarstovuna at kunna okkum gjøllari um hesar servituttir, hvussu teir eru orðaðir, hvussu nógv mál talan er um, hvussu Búnaðarstovan fylgir við sølu av traðum o.s.fr. Búnaðarstovan svaraði í juli 2007:

"Føroya Jarðarráð hevur, síðani tað varð stovnað í 1937 selt traðir. Hetta inntil 1981.

Seldar traðir eftir 1981 – undantøk

Tó skal viðmerkjast, at nakrar traðir vórðu seldar eftir henda dag, og vóru tað vanliga traðir, sum av einari ella aðrari orsøk ikki vóru matrikuleraðar til eigaran í Matrikuldóminum. Ein orsøk var t.d., at eigarin ikki var møttur á grannastevnu og gjørt vart við sín rætt. Tá traðareigarin hevði framvíst skeyti fyri Føroya Jarðarráð og tað varð váttað av Matrikulstovuni, at brúk nr. XX átti ávísi eigarin, varð trøðin skeyta eigaranum uttan kostnað. Hetta var eisini galdandi fyri grundstykkir.

Frá 1937 – við gomlum traðarservituttum frá 1894

Vanligt var, at traðir fyrst vóru útleigaðar. Í leigusáttmálanum stóð, at 1/25 partur av trøðni skuldi veltast um árið, og tá so trøðin var velt, kundi leigarin fáa hana til keyps. Prísurin á trøðni var settur til 25 x leiguna, sum vanliga var frá 2 til 4 kr. Traðirnar vórðu tí seldar fyri kr. 50 - 200.

Eitt skeyti (áðrenn 1957) hevði vanliga m.a. hesar orðingar: "Trøðin skal alla tíðir verða eitt samlað brúk, sum hvørki kann arvast sundur ella lutast sundur við gávu, sølu ella á annan hátt, uttan jarðarráðið hevur samtykt loyvi til tess. Hús mega ikki verða bygd á trøðni uttan játtan jarðarráðsins."

Frá 1957 – helvtarpeningur

Í 1957 samtykti jarðarráðið at seta eina nýggja treyt í skeytini, nevniliga helvtarpening. Hetta varð gjørt, tí hugsast kundi, at traðareigarar, um trøðin lá væl fyri í t.d. Havnini, kundu vinna sær nógvan pening við at selja hana til t.d. útstykkingar.

Ein servituttur í skeytinum viðv. útstykkingum er vanliga orðaður soleiðis: "Eigarin fær rætt at byggja eini sethús á trøðna. Um hann ætlar at byggja fleiri, kann ráðið treyta sundurbýtisloyvið av, at øll trøðin verður útstykkjað, og jarðargrunsins partur verður goldin".

Føroya Jarðarráð, seinni Búnaðarstovan, hevur havt ta praksis, at tá helvtarpeningur varð kravdur, var tað fyri helvt av peninginum, sum ein fermetur kostaði, um Føroya Jarðarráð/Búnaðarstovan sjálv hevði selt lendið, t.v.s. fermetraprísurin, sum til eina og hvørja tíð hevur verið galdandi hjá Jarðarráðnum/Búnaðarstovuni.

Hetta var upprunaliga gjørt, tá t.d. ein traðareigari, sum hevði eina trød við treytum um helvtarpening, gav einum av børnum sínum eitt grundstykki burturav trøðni. Ráðið samtykti tá, at helvtarpeningur skuldi krevjast, hóast grundstykkið var ein gáva.

Hesin praksis hevur so eisini verið nýttur, tá ið traðirnar hava verið seldar privat, og hóast søluprísurin tey seinnu árini í t.d. Havn, hevur ligið væl hægri enn fermeturprísurin hjá Føroya Jarðarráð/Búnaðarstovuni.

Hvussu verður fylgt við søluni av traðum

Servituttir, sum lýstir eru á traðum, umfata eisini m.a. sundurbýti og eigaraskifti.

Tá frábýtt verður av trød við servituttum, kann Matrikulstovan ikki gera hetta uttan loyvi frá Búnaðarstovuni. Er t.d. servituttur um helvtarpening á trøðni, verður kravt gjald fyri frábýtta lutin, og hevur restin av trøðni sostatt framvegis servittuttin um helvtarpening hvílandi á ognini.

Tá trød við servituttum verður seld/frábýtt, skal Búnaðarstovan sostatt altíð loyva víðarisølu/sundurbýti.

Hvørja ferð ein trød verður útstykkjað/víðariseld/sundurbýtt verður hugt eftir treytunum í upprunaskeytinum, um tað er helvtarpeningur o.a., og verður loyvi ikki givið til frábýti/víðarisøli/sundurbýti, fyrrenn helvtarpeningurin er goldin.

Verður trøðin seld til útstykkingar, verður helvtarpeningur kravdur; men verður hon seld til landbúnað, hvílur servitutturin framvegis á ognini.

Hvussu nógvar traðir

Onki fullfíggjað yvirlit finst yvir traðir, ið eru seldar í tíðini frá 1937 til 1981. Nógvar eru seldar í tíðini frá 1957 – 1981 og hava hesar flestallar servituttir um gjald av helvtarpeningi. Fleiri traðir í Havn eru longu avloystar, t.v.s. at helvtarpeningur er goldin, og standa nú hús/býlingar, har traðirnar vóru. Búnaðarstovan hevur t.d. gjøgnumgingið Argir og Havnina og hevur funnið um 50 traðir, sum enn hava servitutt um helvtarpening. Tað er rættuliga tíðarkrevjandi at leita hesar traðir fram (arbeiðið má gerast á Tinglýsingini), og tí er fyribils bert kannað Argir og Havnina."

5.6 Landbúnaðarstuðul (GL 2006/2–13 2-6)

Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini 2000-2006:

t.kr.

	2000	2001	2002	2003	2004	2005	2006	J 2007
Mjólkastudningur	9.117	9.355	9.531	6.443	7.111	7.560	7.437	7.550
Neytakjøt	912	885	864	911	766	905	787	800
Seyðakjøt	1.501	1.576	1.721	2.004	1.631	1.753	1.377	1.800
Stráfóður	1.507	1.468	1.279	1.402	1.191	1.011	1.256	1.160
Súrhoysbrunn	112	13	74	-	-	-	-	50
Velting v.m	311	710	444	716	782	726	638	600
Húsdýralógin	81	84	83	68	65	68	60	70
Træplanting	-	-	24	-	-	-	-	-
Avloysaraskipan	480	480	480	480	435	480	480	480
Føroysk húsdjór	-	-	100	90	50	50	69	50
Tilsamans	**14.021**	**14.571**	**14.600**	**12.114**	**12.031**	**12.553**	**12.104**	**12.560**

Mjólkarstudningur

Studningur til mjólk verður veittur við heimild í § 1 í Ll. nr. 32 frá 6. mars 2003 "um landbúnaðarstuðul".

Sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið "*er endamálið at stuðla framleiðslu av góðari mjólk, at minka um brúkaraprísin og at stuðla flutningi av mjólk frá útjaðaranum.*"

Sambært § 3 í lógini verður heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur og treytir fyri studningsveitingunum.

Hesar treytir eru ásettur í § 2, í K. nr. 96 frá 17. juni 2003 "um stuðul til landbúnaðin":

> ***§ 2.*** *Studningur verður latin til mjólk, sum er í 1. flokki og til flutning.*
> Stk. 2. *Studningurin verður útgoldin mjólkarvirki sambært váttaðum innvigingarlista.*
> Stk. 3. *Flutningsstudningur verður veittur mjólkarvirki eftir somu treytum sum mjólkarstudningur, bæði hvat viðvíkur góðsku og mongd.*

Í 2005 var studningurin 0,82 kr. fyri liturin, og í 2006 var hann 0,65 kr. fyri liturin. Í 2005 og 2006 var flutningsstudningurin 0,40 kr. fyri liturin.

Vit bóðu Búnaðarstovuna greiða nærri frá umsitingini av studninginum, m.a. hvussu endamálið sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður rokkið, og hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum, at minka um brúkaraprísin, er rokkið.

Búnaðarstovan vísti á, at ongar beinleiðis ásetingar eru í lógini og í kunngerðini um, hvussu hetta mál kann verða nátt. Búnaðarstovan fylgir við prísinum á mjólk og samskiftir við L/f Meginfelag Búnaðarmann um hesi viðurskifti.

Prísgongdin á mjólk hevur ligið niðanfyri gongdina á eitt nú tímalønini, t.v.s. mjólkarprísurun er hækkaður lutfalsliga minni enn tímalønin.

Sambært ársfrágreiðingini 2005 hjá L/f Meginfelag Búnaðarmanna var innvigað mjólk 7.459.360 litrar, av teimum var 98,8% 1. floks, t.v.s. 7.369.848 litrar. Tað bendir á, at eitt av endamálunum við studninginum er rokkið, t.v.s. at stuðla framleiðslu av góðari mjólk.

Stjórin greiddi frá, at L/f Meginfelag Búnaðarmanna hvønn mánað sendir uppgerð yvir mjólkarstudning. Niðanfyri er eitt dømi fyri november 2005:

Mjólkarstudningur:

1. flokkur mjólk	543.926	litrar á 0,82 kr.	kr.	446.019,32
2. flokkur mjólk	929	litrar á 0,00 kr.	-	0,00
3. flokkur mjólk	1.856	litrar á 0,00 kr.	-	0,00
Tilsamans	546.711	litrar	kr.	446.019,32

Flutningsstudningur:

543. 926 litrar á 0,40 kr.	kr.	217.570,40
Studningur tilsamans	kr.	663.589,72

Meginfelagið lutar mjólkarstudningin út til bøndurnar eftir innvigaðu mjólkarmongdini. Búnaðarstovan hevur onga grund til at halda, at uppgerðirnar ikki eru rættar.

Búnaðarstovan útvegaði í januar 2007 Landsgrannskoðanini eitt eintak av roknskapinum hjá Meginfelag Búnaðarmanna fyri 2005.

Roknskapurin er ikki sundurliðaður í virkisøkir. Tí sæst ikki, hvat mjólkarframleiðslan og onnur virkisøki geva hvørt sær, ella um t.d. eitt virkisøki rindar undirskotið hjá einum øðrum virkisøki.

5.7 P/f Fiskaaling og havbúnaðarroyndir (GL 2002/2 15 3-4)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 16. oktober 2005 umrøddu vit ávís viðurskifti viðvíkjandi P/f Fiskaaling og játtanini til havbúnaðarroyndir.

Niðanfyri verður greitt frá, hvat síðani er hent.

P/f Fiskaaling

Við Ll. nr. 69 frá 2. mai 2003 “um at hækka partapeningin í og at veita stuðul til P/f Fiskaaling” gav Løgtingið landsstýrismanninum heimild at hækka partapeningin í felagnum 6 mió.kr. við at skjóta tvær ognir hjá landinum, sum felagið hevði nýtslurætt til, inn í felagið. Talan var um eina høll við Áir (2 mió.kr.) og lívfiskastøðina í Skopun (4 mió.kr.).

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 vístu vit á, at sambært landsroknskapunum síðani 1991 hava ognirnar, sum ætlanin var at skjóta inn í P/f Fiskaaling, kostað landskassanum umleið 49 mió.kr.

Í 2004 varð einans høllin við Áir skotin inn í felagið við 2 mió.kr. Grannskoðarafelagið Spekt váttaði, at virðið á innskotnu ognini í minsta lagi svaraði til innskotið.

Í januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at viðvíkjandi lívfiskastøðini í Skopun varð arbeitt við einari loysn, har kommunan ognartók lendið, lívfiskastøðin stóð á og leigaði P/f Fiskaaling økið. Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at málið um lendið eftir øllum at døma var loyst.

Fíggjarliga heimildin, at skjóta ognina inn í felagið, er fingin til vega við játtan á fíggjarlógini 2007. Lívfiskastøðin verður skotin inn í P/f Fiskaaling við 8,95 mió.kr., sum er ein varliga mettur søluprísur í vanligum handli.

Havbúnaðarroyndir

Sáttmálin við P/f Fiskaaling 1999-2001

Sáttmáli fyri árini 1999-2001 varð gjørdur millum Vinnumálaráðið og P/f Fiskaaling um kynbøtur, royndir við aling við nýggjum fiskasløgum o.a. Vinnumálaráðið rindaði

P/f Fiskaaling 11 mió.kr. um árið. Sambært sáttmálanum skuldi P/f Fiskaaling rinda Vinnumálaráðnum aftur tann partin av studninginum, sum ikki var nýttur við sáttmálalok ultimo 2001.

Avlopið av studninginum ultimo 2001, 6.742 t.kr., varð inntøkuført í landsroknskapinum, og P/f Fiskaaling varð skuldskrivað fyri upphæddina. Sáttmálin 1999-2001 varð longdur at galda fyri 2002 eisini, og í 2003 varð staðfest, at 2.407 t.kr. av teim 6.742 t.kr. vóru brúktar til verkætlanir, sum ikki vóru lidnar ultimo 2001. Aðrar 2.460 t.kr. vórðu í 2003 lagdar um til partapening í felagnum, og P/f Fiskaaling skuldi rinda 1.875 t.kr. aftur, sum var avlopið á verkætlanum, sum vóru lidnar ultimo 2001.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at fíggjarstøðan hjá P/f Fiskaaling var hampiliga góð nú, tí vøkstur var í alivinnuni, og felagið fekk meira fyri sølu av tøkulaksi, sílayngli og laksarognum. Felagið hevði goldið landskassanum 818 t.kr. í 2006 og miðaði eftir, at øll skuldin var afturgoldin í 2007.

Í juli 2007 spurdu vit, um restskuldin verður afturgoldin í 2007. Vit fingu einki svar.

Sáttmálin við P/f Fiskaaling 2003-2005

Nýggjur sáttmáli millum Vinnumálaráðið og P/f Fiskaaling varð gjørdur fyri árini 2003-2005.

Í 2004 vórðu játtaðar 12 mió.kr. í studningi. Í 2004 roknaði P/f Fiskaaling sær 2.634 t.kr., svarandi til 22% av studningsupphæddini, til fyrisitingargjald. Talan er um endurgjald fyri m.a. lønarútreiðslur til stjóran, bókhaldaran, maskinmeistaran, útreiðslur til grannskoðan og edv, umframt part av olju- og elnýtslu í skrivstovuhøllunum. Fyrisitingargjaldið var ikki ásett í sáttmálanum fyri árini 2003-2005.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sáttmálin millum Vinnumálaráðið og felagið varð endurnýggjaður í apríl 2006, har m.a. er ásett, hvat stuðul landskassans kann verða nýttur til, herímillum til fyrisiting.

Studningur til havbúnaðarroyndir

Landið hevur árini 1999 til 2005 veitt P/f Fiskaaling umleið 71 mió.kr. í studningi til "havbúnaðarroyndir".

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum til at eftirmeta tað, sum komið er burturúr í sáttmálaskeiðnum í mun til ætlaða úrslitið.

Í juli 2007 spurdu vit, um landsstýrismaðurin hevur eftirmett tað, sum komið er burturúr í sáttmálaskeiðnum, og hvat úrslitið er. Vit hava einki svar fingið.

5.8 Landsverk (GL 2002/2 16 1-2)

Í frágreiðingini í mars 2005 kunnaðu vit um, at vit í 2003 og 2004 høvdu kannað EDV-nýtslu, virksemi/inntøkur og innanhýsis skrásetingar hjá Landsverki. Í 2004 hevur Landsverk, m.a. við serkønari hjálp, broytt og bøtt um fleiri av teimum mannagongdum og veikleikum, ið vit høvdu umrøtt, og í 2005 var ætlanin at menna skipanir og mannagongdir at lúka krøvini til KT-trygd í ISO 17799. Niðanfyri hava vit tikið samanum, hvat síðani er hent í málinum.

Roknskaparreglugerðin og KT

Í frágreiðingini í mars 2005 kunnaðu vit um, at roknskaparreglugerðin leyk ikki minstukrøvini í roknskaparrundskrivinum "um egnar EDV-skipanir", at leiðslan hevði

ikki skjalfest nakra váðameting í sambandi við KT-nýtsluna, og at stovnurin hevði ongan yvirskipaðan KT-politikk/trygdarpolitikk.

Í juni 2006 kunnaði Vinnumálaráðið um, at Landsverk eftir summarfrítíðina var farið undir at dagføra roknskaparreglugerðina.

Í 2005 orðaði stovnurin ein KT-trygdarpolitikk, sum varð settur í gildi í oktober 2005. Í hesum sambandi varð ein yvirskipað váðameting gjørd fyri tær týdningarmiklastu KT-skipanirnar á stovninum.

Landsverk hevur ikki sett sett øll tey tiltøk í verk, sum eru ásett í KT-trygdarpolitikkinum. Landsverk arbeiðir støðugt við at bøta um KT-trygdina, og í 2007 er ætlanin at endurskoða KT-trygdarpolitikkin og at gera eina nýggja yvirskipaða váðameting.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Landsverk arbeiðir við at endurskoða og dagføra sín KT-trygdarpolitik frá 2005 í samstarvi við Vinnumálaráðið (trygdarráðgevanum). Miðað verður eftir, at arbeiðið verður liðugt í 2007.

Egnar búskaparskipanir

Í frágreiðingini í mars 2005 kunnaðu vit m.a. um, at Landsverk hevur "egnar EDV-skipanir", sum verkfrøðingar á stovninum hava ment. Í roknskaparligum høpi vóru tær týdningarmiklastu skipanirnar:

- Vektarskipanin: til at skráseta uttanhýsis sølu og innanhýsis nýtslu frá skerv- og asfaltsverkunum kring landið.
- Lønarskipanin: til at skráseta viku- og mánaðarlønir, koyripengar umframt samsýningar í sambandi við tyrluavgreiðslur.
- Interna bókhaldsskipanin (INTB): til at býta nýtsluna av egnari framleiðslu (skerv, asfalt, maskintímar) út á hvørt arbeiðsplássið (vegastrekki o.a.).

Harafturat hevur stovnurin sjálvur ment eina eykaluta-goymslustýringarskipan, maskin-viðlíkahaldsskipan, prísindexskipan, journalskipan, vegdátugrunn, lendisskipan og eina skipan, har ferðsluóhapp verða skrásett. Stovnurin hevur eisini sjálvur ment eina intranet-skipan.

Íverksetan av nýggjari "egnari búskaparskipan"

Síðani ársskiftið 2005/2006 hevur Landsverk arbeitt við at seta í verk eina Navision búskaparskipan, sum skal avloysa fleiri av teimum KT-skipanum, sum stovnurin sjálvur hevur ment, herímillum Vektarskipanina, Internu bókhaldsskipanina, eykaluta-goymslustýringarskipanina og maskin-viðlíkahaldsskipanina.

Í september 2006 var fundur millum Fíggjarmálaráðið, Vinnumálaráðið, Gjaldstovuna og Landsverk í sambandi við, at Landsverk var farið undir at taka í nýtslu egna Navision búskaparskipan uttan at biðja Fíggjarmálaráðið um formligt loyvi sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini. Landsverk var av teirri fatan, at Gjaldstovan kundi ikki nøkta tann tørv, stovnurin hevði á búskaparskipan, sum kundi avloysa "egnu búskaparskipanirnar".

Vinnumálaráðið boðaði í desember 2006 frá, at arbeitt verður við at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

Í september 2007 hevur Gjaldstovan kunnað um, at Vinnumálaráðið hevur biðið Gjaldstovuna um at góðkenna loysnina, sum Gjaldstovan í løtuni ikki kennir. Gjaldstovan ger vart við, at skal hon fara inn í eina góðkenningartilgongd, krevur tað tíð, og eru aðrar uppgávur í løtuni ráðfest hægri.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at gongd er í málinum. Fundur hevur verið í oktober 2007 millum Landsverk og Gjaldstovuna. Har var

serliga umrøtt, hvussu Navision búskaparskipanin kann samskipast við Búskaparskipan Landsins. Partarnir eru samdir um at arbeiða viðari við málinum við tí í hyggja at finna eina loysn.

Roknskaparreglugerðin og inntøkur

Í desember 2004 vístu vit á, at:

- roknskaparreglugerðin leyk ikki minstukrøvini í rundskrivinum um prísáseting/príspolitikk, og at ongar formligar reglur vóru um at góðkenna prísásetan/-broytingar
- vit ivaðust í, um reglurnar í játtanarskipanini um inntøkufíggjað virksemi og prísáseting vórðu hildnar.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Vinnumálaráðið 1. oktober 2007 hevur góðkent eina nýggja roknskaparreglugerð, sum m.a. hevur greiðar ásetingar um prísáseting og inntøkur stovnsins.

5.9 Rúsdrekkasøla Landsins (GL 2000/2 03 9-9)

Landsgrannskoðanin hevur ikki endaliga grannskoðað ársroknskapin 2006, men vit hava verið ófráboðað á kassa- og goymslueftirliti. Vit hava gjøgnumgingið avstemmanir viðvíkjandi banka- og girokontum, kreditorum o.a.

Harafturat hava vit eisini kannað einstakar partar av KT-trygdini hjá stovninum.

Egnar búskaparskipanir

Rúsdrekkasøla Landsins hevur egnar búskaparskipanir. Talan er um eina bókhaldsskipan við fleiri mótulum, kassaskipan, lønarskipan, heimabanka og serliga forritað excel-rokniørk til at skráseta lønartímar. Í november 2005 byrjaði Rúsdrekkasølan at nýta Felags lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Síðani mars 2006 eru allar lønir farnar um Felags lønarskipanina, og í november 2006 er stovnurin byrjaður at nýta Web-løn til leysar lønargjaldingar.

Hvønn mánað ger roknskaparleiðarin yvirlit yvir sumbókingarnar í bókhaldsskipanini á Rúsdrekkasøluni, sum Gjaldstovan handliga skrásetir í Búskaparskipan Landsins.

Yvirskotsgjaldføri

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár vístá, at stovnurin ofta hevur nógvan tøkan pening á vanligum peningastovnskontum, til lítla og onga rentu, og vit hava mælt til, at Rúsdrekkasølan javnan flytur yvirskotsgjaldføri á kontu hjá Gjaldstovuni.

Í november 2006 kunnaði stjórin á Rúsdrekkasøluni um, at stovnurin í 2006 hevði flutt Gjaldstovuni yvirskotsgjaldførið hvønn ársfjórðing.

Í 2007 er yvirskotsgjaldførið flutt til Gjaldstovuna hvønn mánað.

KT-viðurskifti í roknskaparreglugerðini

Í punkt 10 í roknskaparrundskrivinum eru ávís krøv sett til skrivligar lýsingar av egnum edv-skipanum. Vit halda ikki, at roknskaparreglugerðin lýkur hesi krøv, t.d. er samskiftið millum kassaskipanirnar og búskaparskipanina ikki lýst. Vit hava mælt til at endurskoða roknskaparreglugerðina. Stjórin kunnaði í november 2006 um, at stovnurin er í ferð við endurskoða KT-partin í roknskaparreglugerðini.

Í oktober 2007 var hetta arbeiðið ikki heilt liðugt.

Gjøgnumgongd av KT-trygdini

Landsgrannskoðanin framdi í 2002 eina størri gjøgnumgongd av KT-trygdini á Rúsdrekkasølu Landsins. Niðurstøðan var, at Rúsdrekkasøla Landsins ikki leyk fleiri av grundleggjandi krøvunum til eina trygga edv-skipan, sum eru ásett í roknskaparrundskrivinum til egnar edv-skipanir.

Vit hava síðani javnan staðfest, at lítið ítøkiligt er komið burtur úr arbeiðinum við at bøta um KT-trygdina. Síðani 2002 eru onnur krøv til KT-trygd sett í persónsupplýsingalógini, trygdarkunngerðini og í rundskrivi frá Vinnumálaráðnum um KT-trygd.

Í juni 2006 kunnaði Rúsdrekkasølan um, at tað ikki vóru gjørdar nakrar ítøkiligar broytingar í KT-trygdini á Rúsdrekkasøluni í mun til gjøgnumgongdina í 2002, og Landsgrannskoðanin hevur tí ikki í 2006 gjørt eina nágreiniliga kanning av KT-trygdini.

Landsgrannskoðanin hevur tó hugt eftir einstøkum pørtum innan: skjalfesting av KT-skipanum o.a., ábyrgd av KT, funktiónsskilnaði, umsitingini av brúkarum (herímillum atgongd hjá veitarum) og trygdaravrit.

Landsgrannskoðanin hevur víst á ymiskar veikleikar í KT-trygdini, serliga við atliti at stýring av brúkararættindum til búskaparskipanina. Í sambandi við grannskoðanina hava vit staðfest vantandi funktiónsskilnað á týðandi økjum. Vit hava mælt til eina skipaða gjøgnumgongd av funktiónsskilnaðinum á stovninum, og at ásetingar verða settar í roknskaparreglugerðina. Harafturat hava vit mælt til, at KT-skipanirnar, serliga búskaparskipanin, verða settar upp í samsvari við ásetingarnar í roknskaparreglunum.

Í november 2006 greiddi stjórin frá, at bøtt var um fleiri av veikleikunum, sum vit høvdu víst á, og stovnurin í meira enn eitt ár hevði arbeitt skilvíst við KT-trygdini.

Í oktober 2007 hevur landsgrannskoðanin staðfest, at tað verður arbeitt við at bøta um KT-trygdina, og at fleiri av teimum veikleikum, vit fyrr hava víst á, eru rættaðir.

Tá havt verður í huga støddina á stovninum, og hvussu heftur stovnurin er av kunningartøkni, halda vit framvegis, at KT-trygdin ikki er heilt nøktandi.

6 Útbúgving og gransking

6.1 Grannskoðan av ymiskum stovnum:

Í 2007 hava vit grannskoða ymiskar stovnum undir Mentamálaráðnumvið støði í einum spurnablaði, sum vit høvdu sent stovnunum viðvíkjandi roknskapar-, lønar-, KT- og øðrum viðurskiftum, sjá **fylgiskjal III.** Undan vitjanini hevði leiðslan svarað spurnablaðnum og sent okkum tað. Stovnar, sum vit hava vitjað í 2007 eru:

- Føroya Fornminnissavn
- Tjóðpallur Føroya
- Fiskivinnuskúlin
- Føroya Studentaskúli
- Eysturoyar Studentaskúli- og HF-skeið
- Vinnuháskúlin
- Klaksvíkar Sjómansskúli
- Føroya Læraraskúli
- Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya
- Rásin, eftirskúlin í Saltangará

Niðanfyri er í stuttum tikið samanum úrslitið av grannskoðanini. Fyrst verður greitt frá almennum viðmerkingum, sum eru felags fyri fleiri stovnar, og síðani verður greitt frá grannskoðanini av stovnum, har serlig viðurskifti verða umrødd.

Eru endamál, virksemi og uppgávur stovnsins orðað og lýst

Endamálini hjá stovnunum eru í flestu førum lýst í lógum, tilhoyrandi kunngerðum og í fíggjarlógini.

Skrásetingar um nøgd og góðsku, sum lýsa virksemi og tilfeingisnýtslu

Bert fáir stovnar hava skrásetingar, sum í nøgd og góðsku kunnu lýsa, hvat stovnurin avrikar, ella hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar (t.d. tíðarnýtsla hjá starvsfólki). Leiðslurnar á skúlunum hava víst á, at skúlarnir føra hagtøl yvir, hvussu nógvir næmingar hava tikið prógv um árið, og tað er ein háttur at lýsa, hvat stovnurin avrikar í nøgd.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Vísandi til § 5, stk. 1 í Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins o.t.” hava vit spurt, um stovnurin hevur eina roknskaparreglugerð, um hon er góðkend, dagførd og formliga skipað innan karmarnar av roknskaparrundskrivinum.

Næstan allir stovnar hava gjørt eina roknskaparreglugerð, sum er skipað innan karmarnar í rundskrivinum, men í fleiri førum eru reglugerðirnar ikki dagførdar, hóast mannagongdir á roknskaparøkinum eru broyttar, m.a. í sambandi við at farið er yvir til at nýta verkgongdarskipanina hjá Føroya Gjaldstovu.

Í spurnablaðnum svara leiðslurnar á øllum stovnum nevndir frammanfyri, at mánaðarroknskapirnir verða regluliga og rættstundis góðkendir mótvegis hægri myndugleika.

Journalskipan

Í spurnablaðnum spurdu vit, um stovnurin hevur journalskipan, og um hann hevur skrivligar mannagongdir um journalisering. Flestu stovnarnir hava eina journalskipan, men fáir hava skrivligar mannagongdir um journalisering.

Vit hava áður víst á, at nógvir stovnar ikki hava eina nøktandi journalskipan, og fleiri hava ikki ásett minstukrøv til málsviðgerð, herímillum hvørji skjøl, upprit o.a. skulu verða til skjals í einum máli, eisini fyri at tryggja, at málsviðgerðin lýkur krøvini um vegleiðing, partshoyring, skyldu at skriva upp o.a. í ávikavist Ll. nr. 132/1993 "um fyrisitingarlóg" og Ll. nr. 133/1993 "um innlit í fyrisitingina".

Yvirlit yvir ognir

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovnunum vera eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Í spurnablaðnum spurdu vit, um stovnurin hevur dagført yvirlit yvir ognir sínar. Flestu stovnarnir hava gjørt yvirlit yvir ognir og útbúnað, nakrir hava tó ikki dagført yvirlitið.

Trygdartiltøk á KT-økinum

3 stovnar siga seg hava gjørt eina váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtsluni. Stovnarnir hava skipað ymisk trygdartiltøk á KT-økinum, eitt nú brandmúr, virusverju, persónlig brúkaranøvn og loyniorð, ið javnan verða skift. Bara ein skúli, Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya, hevur orðað ein trygdarpolitikk.

Lønarumsiting

Vit spurdu, um leiðslan hevur eina skrivliga mannagongd um:

- at seta fólk í starv, loysa fólk úr starvi, áseta lønarflokk, flyta í hægri lønarflokk, geva lønarískoyti o.t.,
- at áleggja yvirtíðararbeiði/ meirarbeiði og tænastuferðir,
- at góðkenna, at lønarútgjaldingarnar eru rættar,
- hvør setir fólk í starv, hvat skjalatilfar verður kravt (umsókn, setanarbræv o.a.).

Vit spurdu eisini, um leiðslan hevur skrivliga lýsing av dagligu lønarumsitingini, herímillum hvussu arbeiðstíð, frítíð, avspáking, sjúka o.a. verður skrásett.

Samanumtikið vóru svarini frá stovnunum, at teir ikki hava egnar skrivligar mannagongdir, men teir nýta ístaðin almenna starvsfólkapolitikkin hjá Løgmansskrivstovuni. Nakrar skrivligar mannagongdir fyri setan av starvsfólki og yvirtíð eru ásettar í roknskaparreglugerðunum hjá flestu stovnum.

Samanumtikið hava bert fáir stovnar hóskandi tíðarskráseting. Skúlarnir hava sum so heldur ikki tíðarskráseting, men skúlastjórarnir vístu á, at lærararnir undirvísa sambært skema.

Í sambandi við vitjanirnar úti á stovnunum kannaðu vit, um lønirnar vóru samsvarandi galdandi sáttmálum, flokking, stigum o.ø. Hesar stakroyndir benda á, at lønarsatsir, útrokningar o.a. eru rættar.

Vandi fyri mistøkum og sviki

Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard hava vit spurt, um leiðslan hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki.

Samanumtikið benda svarini á, at leiðslurnar ikki hava sett nøkur tiltøk í verk at forða fyri sviki. Stovnarnir vísa á, at teir brúka Verkgongdarskipanina á Føroya

Gjaldstovu, sum hevur innbygdan skilnað millum tey, sum skráseta og tey, sum leysgeva. Tí duga leiðslurnar ikki at síggja, at tað ber til at svika. Samanumtikið hava leiðslurnar ikki kunnleika um, at svik er framt, illgruna um svik, ella hoyrt um skuldsetingar um svik.

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at tað hevur týdning, at leiðslurnar eisini hugsa um onnur øki í sambandi við svik, t.d. skal ein skúli tryggja rættleika í prógvum, karakterum o.a.

6.1.1 Tjóðpallur Føroya (GL 2007/2 11 4-2)

Inntøkur

Tjóðpallurin hevur inntøkur frá sølu av atgongumerkjum, frá arbeiði fyri aðrar stovnar, t.d. Kringvarp Føroya og frá inntøkum av at fyriskipa tiltøk fyri onnur. Pkt. 4 í roknskaparreglugerðini hjá Tjóðpallinum er um inntøkur. Ásett er í reglugerðini, hvørjar inntøkur Tjóðpallurin hevur, og harafturat er ásett, at stjórin ábyrgist fyri, at inntøkur verða tiknar við í roknskapin til tíðina. Ongar skrivligar reglur eru um prísáseting.

Flestu inntøkurnar fyri tiltøk eru í forsølu ígjøgnum kunningarstovur og Norðurlandahúsið. Arbeiðið fyri Kringvarp Føroya verður gjørt "eftir rokning". Tjóðpallurin brúkar rokningarskipan hjá Gjaldstovuni.

Vísandi til lóg, kunngerð og fíggjarlóg verður nakað av inntøkunum sæð sum "inntøkufíggjað virksemi", t.d atgongumerki. Vit vístu á, at eftir okkara tykki er tað ikki talan um inntøkufíggjað virksemi.

Stjórin hevur kunnað um, at Tjóðpallurin hevur ikki skrásett inntøkurnar sum inntøkufíggjað virksemi, men inntøkurnar eru skrásettar á standardkontu 21. "Søla av vørum og tænastum" á stovnsnummarinum hjá Tjóðpallinum.

Hølisviðurskifti

Tjóðpallur Føroya heldur til í hølum hjá Tórshavnar Býráð. Tjóðpallurin rindar ikki húsaleigu, Tórshavnar Býráð rindar fyri el og olju. Hølisviðurskiftini eru tronglig, og hølini eru gomul og ótíðarhóskandi.

6.1.2 Føroya Studentaskúli (GL 2003/2 10 3-9)

Í sambandi við lønargrannskoðanina gjørdi Landsgrannskoðanin vart við, at skylduga undirvísingartímatalið, sum var ásett í lønarseðlinum hjá tí eina læraranum, var hægri enn ásett í sáttmálanum. Rektarin hevur kunnað um, at talan er um ein feil, sum verður rættaður beinanvegin. Annars var einki at finnast at.

6.1.3 Studentaskúla- og HF-skeiði í Eysturoynni (GL 2003/2 10 3-8)

Í sambandi við lønargrannskoðanina vístu vit á, at talan er um nógva yvirtíð, men annars var einki at finnast at.

6.1.4 Vinnuháskúlin (GL 2006/2 10 4-13)

Skúlastjórin vísti á, at tað er trupult at umsita løn eftir sáttmálunum, tí teir eru ikki nóg greiðir. T.d. er diskussión við fakfelagið um tulking av skylduga undirvísingartímatalinum 21,6, og hvussu tímatalið skal roknast, tá ið tímar verða nýttir til annað enn undirvísing.

Vinnuháskúlin hevur broytt mannagongdina, sum varð brúkt fyrr, tá ið lærarar kundu fáa yvirtíð fyri eina viku, hóast somu lærarar í vikuni frammanundan ella

aftaná, ikki høvdu undirvíst 22,1 tímar (nú 21,6 tímar). Tímatalva verður løgd fyri hálvt ár í senn, við ymiskum vikutímatalvum, soleiðis at hvør lærari kann hava ymiskar undirvísingartímar frá viku til viku.

Ongar nágreiniligar reglur eru í sáttmálanum fyri, hvønn tímaniðurskurð hvørt einstakt fak skal hava. Einasta ásetingin er, at samlaði tímaniðurskurðurin ikki er hægri enn 3,4 um vikuna fyri allar lærugreinir fyri allar seks lestrarhálvurnar samanlagt, sum ásett í § 25 í sáttmálanum. Tað er ein áseting, sum varð gjørd, tá ið 2 skúlar vóru, og leiðslan heldur, at nú skúlarnir eru lagdir saman, skal ásetingin skiljast sum 6,8 (t.e. 2 ferðir 3,4). Sambært yvirlitinum eru samlaðu niðurskurðirnir 6,3851, men vit duga ikki at siga, um fordeilingin millum fakini/lærararnir er røtt.

Niðurstøðan av grannskoðanini av einstøku lønarmálunum er, at um støðið verður tikið í sáttmálanum við Felagið Maskinmeistaralærara saman við Fakfelag Sjómansskúlalærara, umframt teimum tulkingum og "óskrivaðu reglunum", sum Vinnuháskúlin hevur fyri tímaniðurskurði og lønarásetingini, so tykjast útgoldnu lønirnar rættar. Men sum víst á, byggir lønarumsitingin ikki í øllum førum á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað, og mælt er tí til at bøta um viðurskiftini. Í oktober 2007 hava vit biðið landsstýrismannin um viðmerkingar. Vit hava eisini mælt Mentamálaráðnum til at taka spurningin um ógreidleikar í sáttmálanum upp við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum.

6.1.5 Klaksvíkar Sjómansskúli (GL 2004/2 10 4-11)

Roknskaparreglugerð

Skúlin hevur ikki eina roknskaparreglugerð, sum er góðkend av Mentamálaráðnum. Eitt uppskot fyriliggur, sum m.a. vísir til dygdarhondbókina. Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 (s. 65) vísti Landsgrannskoðanin á, at landsstýrismaðurin hevði kunnað um, at reglugerðin ikki er sambært rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum, og at hon ikki er góðkend. Skúlin hevði fingið boð um at gera nýggja roknskaparreglugerð.

Hesi viðurskifti eru framvegis ikki komin í rættlag. Í oktober 2007 kunnaði stjórin um, at roknskaparreglugerðin nú er send Mentamálaráðnum til viðmerkingar.

Skyldugt undirvísingartímatal

Í lestrarhálvárinum várið 2007 undirvístu fleiri lærarar á skúlanum ikki skylduga undirvísingartímatalið, m.a. tí eingin sjóvinnuflokkur varð tikin inn. Stjórin hevur víst á, at lærararnir skulu luttaka í skeiðsvirksemi og øðrum, sum leiðslan ávísir, fyri at fylla skemaið, og fyrra hálvár 2007 hava lærararnir hildið skeið, verið á skeiðum og gjørt annað fyrifallandi arbeiði. Stjórin heldur, at lærararnir samanlagt hava arbeitt fleiri tímar enn tað, sum teir hava fingið løn fyri.

Okkum kunnugt er lønin hjá einum lærara ikki góðkend av Fíggjarmálaráðnum. Vit spurdu stjóran um tað, men fingu einki svar.

Ongar nágreiniligar reglur eru í sáttmálanum fyri, hvønn tímaniðurskurð hvørt einstakt fak skal hava. Einasta ásetingin er, at samlaði tímaniðurskurðurin ikki er hægri enn 3,4 um vikuna fyri allar lærugreinir fyri allar seks lestrarhálvurnar samanlagt, sum ásett í § 25 í sáttmálanum. Stjórin kunnaði um, at hann brúkar ein reduktiónsfaktor, sum hann hevur brúkt seinastu 20 árini, og sum hann hevur fingið frá Mentamálaráðnum.

6.1.6 Føroya Læraraskúli (GL 2004/2 10 4-12)

Sáttmálaviðurskiftini við magistarafelagið eru enn ikki komin uppá pláss. Víst verður til partin aðrastaðni í frágreiðingini um Læraraskúlan.

6.1.7 Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya (GL 2007/2 10 4-14)

Sambært leiðaranum verður arbeiðstíðin ikki skrásett. Leiðarin vísir á, at lærararnir hava ikki skyldu at undirvísa ávíst tímatal, men eru settir í starv 40 tímar um vikuna. Yvirtíð kemur ikki fyri.

Í frágreiðingini, sum Landsgrannskoðanin læt løgtingsgrannskoðarunum í februar 2003 (s. 66), er m.a. umrøtt at:

> *Rektarin hevur greitt frá, at lærararnir hava ikki skyldu at undirvísa ávíst tímatal, men teir eru settir í starv 40 tímar um vikuna við summarfrí í 5 vikur.*
>
> *Eingin skipað skráseting er av arbeiðstíð og fráveru. Vit hava mælt til, at tað verður gjørt.*
>
> *Í januar 2003 hevur landsstýrismaðurin víst á, at í mun til aðrar skúlar, fer alt arbeiðið í sambandi við undirvísing fram á skúlanum, bæði fyrireiking, fyrisiting, bólka- og einstaklingavegleiðing, uppgávurætting, skematímar o.s.fr. Landsstýrismaðurin heldur ikki, at neyðugt er við neyvari skráseting av arbeiðstíð ella fráveru. Landsgrannskoðanin er ikki samd við landsstýrismanninum og fer at reisa spurningin av nýggjum.*

Spurd, um hesi viðurskifti, sigur leiðarin, at skúlin hevur ikki broytt mannagongd við tíðarskráseting síðani 2003.

6.1.8 Rásin, eftirskúlin í Saltangará (GL 2004/2 10 2-5)

Endamálið hjá stovninum er lýst í § 2 í Ll. nr. 67/2003 "um skúlatilboð til ung við breki". Skúlin hevur pláss fyri 7 næmingum. Skúlaárið 2007/2008 eru 7 næmingar á skúlanum. Talan er um somu næmingar, sum byrjaðu á skúlanum í januar 2004. Sambært § 3, stk. 2, er hvørt skúlaskeið í mesta lagi 3 ár. Leiðarin greiddi frá, at fyrstu tíðina hevði stovnurin hølistrupulleikar og umstøðurnar annars vóru ikki nøktandi. Tí hevur leiðslan valt at lata næmingarnar vera eitt ár eyka á skúlatilboðnum.

Arbeiðstíðirnar verða lagdar til rættis í vaktplanum, sum leiðarin leggur til rættis. Starvsfólkini fylgja sjálvi við, at vaktirnar verða hildnar og boða leiðaranum frá, nær tey hava arbeitt. Leiðarin ger upp eina ferð um mánaðin og sendir Gjaldstovuni lønargjaldsumbøn, saman við fráboðan um talið á vanligum tímum, viðbótum, leygardagstímum o.s.fr.

Sambært § 4 í lógini er innihaldið í skúlaskeiðnum eitt heildartilboð, sett saman av bústaði, skúla og arbeiði, við høvuðsdenti á praktiska upplæring. Talan er um menningartarnaðar stovnsbúgvar, og vit hava mælt til at umhugsa, um tað ikki hevði verið meira praktiskt, at stovnurin lá undir Nærverkinum.

Vit hava eisini mælt til, at stovnurin nýtir sokallaðu "vaktplansskipanina", ið aðrir líknandi stovnar undir Nærverkinum brúka.

6.2 <u>Fólkaskúlin</u> (GL 2002/2 10 2-3)

Í 2006 fór Landsgrannskoðanin undir at ráðleggja grannskoðanina av umsitingini av lønum til lærarar í fólkaskúlanum, herímillum eisini grannskoðanina av "nýggju" skúlaforskipanini. Ætlanin er at meta um innaneftirlitið, m.a. við at kanna, í hvønn mun ásetingarnar í roknskaparreglugerðini og innanhýsis leiðbeiningum verða fylgdar, og um eftirlitsvirksemið virkar sum ásett/ætlað. Í 2007 hava vit havt fundir og samskift við lønarstovuna í Mentamálaráðnum um skúlaforskipanina. Vit hava eisini

vitjað á einum skúla fyri at kunna okkum um mannagongdir á skúlanum. Arbeiðið heldur fram í 2008.

Um játtanina

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 125/1997 "um fólkaskúlan" við seinni boytingum. Játtanin til at reka virksemið í fólkaskúlanum var 230 mió.kr. fíggjarárið 2006. Meginparturin av útreiðslunum eru lønarútreiðslur. Sambært fíggjarlógini 2006 er talan um 682 fulltíðarstørv. Lønarstovan í Mentamálaráðnum fyrisitur játtanina.

Sambært § 32, stk. 2, skipar landsstýrismaðurin í mentamálum á hvørjum ári læraratalið á hvørjum skúla. Skipanin er grundað á upplýsingar frá tí einstaka skúlanum um væntað tal av næmingum, flokkum o.ø.

Mentamálaráðið skal sum so ikki góðkenna næmingatalið. Næmingatalið er bert ein uppgerð, sum skúlin sendir Mentamálaráðnum til kunningar, soleiðis at talið av tímum og lærarum kann verða roknað út.

Skúlaforskipanin

Skráseting av lønum til lærarar verður gjørd í eini skúlaforskipan, sum lønarstovan á Mentamálaráðnum umsitur. Servarin, sum skúlaforskipanin koyrir á, stendur í "umhvørvinum hjá Gjaldstovuni" á Elektron og hevur somu trygdaruppseting sum Felags lønarskipanin.

Ein KT-veitari rekur og umsitur skúlaforskipanina - bæði rakstur og menning. Mentamálaráðið hevur ikki enn gjørt rakstraravtalu við KT-veitaran um skúlaforskipanina. Lønarstovan kann ikki broyta í sjálvari skúlaforskipanini, so sum programrættingar o.a. Lønarstovan boðar KT-veitaranum frá, og KT-veitarin hevur "fjaratgongd" til at gera broytingarnar. Tað er ongin serlig test av broytingum, men "versiónsnummar" verða nýtt, tá ið broytingar eru.

Landsgrannskoðanin spurdi, um Mentamálaráðið kundi síggja, um KT-veitarin hevði gjørt broytingar í skipanini. Mentamálaráðið vísti á, at alt verður loggað. Spurd, hvussu loggurin verður brúktur, segði Mentamálaráðið, at tey kanna ikki loggin. Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi.

Lønarstovan kunnaði um, at Mentamálaráðið hevur eina lýsing av Felags lønarskipanini, og lønarstovan var í ferð við at gera eina vegleiðing fyri, hvussu hon brúkar forskipanina.

Vit hava víst á, at Mentamálaráðið hevur ábyrgd av skúlaforskipanini, hóast raksturin verður fluttur til onkran annan.

Skúlaleiðarin á hvørjum skúla sær ger av, hvør í leiðsluni skal hava atgongd til skúlaforskipanina. Vanliga er tað skúlastjóri, varaskúlastjóri, einalærari ella skrivari. Fyri at fáa atgongd til skúlaforskipanina skal skúlaleiðarin senda Mentamálaráðnum/lønarstovuni umsókn um tað. Rættindini kunnu latast til at skráseta ella at frígeva.

Lønarstovan kannar umsóknirnar og letur KT-deplinum í Mentamálaráðnum umsóknina at skráseta. KT-depilin stovnar og strikar brúkararnar, letur teimum brúkaranavn og loyniorð og vegleiðir brúkarunum, um tørvur er á tí.

Skrásetingar av stamdátum o.a.

Vanliga málsgongdin byrjar við, at ein skúli sendir Mentamálaráðnum/lønarstovuni boð um, at hann hevur sett ein lærara í starv, hvussu hann er settur, útbúgving, ella um nakað serligt er. Lønarstovan tøppar upplýsingarnar inn í Felags lønarskipanina. Øll starvsfólk á lønarstovuni kunnu skráseta lønarútgjaldingar.

Lønarstovan er á somu skipan sum Gjaldstovan, á Felags lønarskipanini. Lønarstovan ger allar skrásetingar, eisini útgjaldskoyringar, í sínum parti av skipanini. Lønardeildin á Gjaldstovuni kann "hyggja" inn í partin hjá Mentamálaráðnum á Felags lønarskipanini, men hon hevur ikki heimild at broyta.

Lønardeildin á Gjaldstovuni skrásetir og viðlíkaheldur lønartalvurnar í Felags lønarskipanini og hevur ábyrgd av, at tær eru rættar.

Niðurskurðir og frymlar til útrokningar eru lagdar inn í skúlaforskipanina. Lønarstovan (KT-veitarin) hevur lagt dáturnar og frymlarnar inn í skipanina og hevur ábyrgd av, at tær til eina og hvørja tíð eru rættar.

Gjaldstovan rindar lønirnar út.

Setanarskriv, virksemisætlan o.a.

Mentamálaráðið skrivar setanarskrivið, hóast tað er tann einstaki skúlin, sum setir læraran. Tað verður gjørt, tí Mentamálaráðið hevur yvirlit yvir m.a. starvsaldur frá øðrum skúlum. Ætlanin er, at serkunnleikin framhaldandi skal verða á Mentamálaráðnum, bæði við at skriva setanarskriv, við eini felags skúlaforskipan og við aðrari vegleiðing.

Skúlastjórarnir gera virksemisætlan fyri hvønn lærara, t.d. tímatal, flokk, niðurskurð o.s.fr. og tøppa hesi "rádata" inn, men rokna onki út sjálvir. Ein rapport vísir útroknaðu lønina.

Lønarstovan skal góðkenna skrásetingarnar, sum skúlarnir gera í skúlaforskipanini, áðrenn tær verða aktiveraðar. Lønarstovan kann festa við eina viðmerking og avvísa, so at skúlin kann síggja, hví ein skráseting ikki verður góðkend. Lønarstovan kann broyta - men kann ikki skráseta fyri ein skúla.

Lønarstovan kannar heildarætlanina, stemmar av næmingatal og um sertímar eru rættir. Lønarstovan kannar eisini, um niðurskurðir og tal av tímum til "fyrisiting" eru rættir.

KT-trygd

Vísandi til rundskrivið um KT-trygd, spurdu vit, í hvønn mun Mentamálaráðið-/lønarstovan lýkur treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd, og um leiðslan hevur gjørt eina ítøkiliga váðameting fyri egið ábyrgdarøki, sum skal nýtast sum grundarlag, tá leiðslan bólkar ábyrgdarøkið, vísandi til vegleiðing um bólking av krøvum í ISO 17799.

Mentamálaráðið/lønarstovan hevur ikki gjørt nakra ítøkiliga váðameting fyri egið ábyrgdarøki. Mentamálaráðið vísir á, at ráðið hevur lagt alla trygd í sambandi við skúlaforskipanina á sama stig, sum Gjaldstovan hevur gjørt fyri sínar KT-skipanir. "*So, um KT-skipanirnar hjá Gjaldstovuni eru nóg tryggar, er skúlaforskipanin eisini nóg trygg. Mentamálaráðið hevur ikki nýtt egnar ressoursir til at tryggja skúlaforskipanina.*"

Mentamálaráðið vísir eisini á, at hóast ráðið hevur avmarkað tilfeingi og ikki hevur gjørt nakað við váðameting, er skúlaforskipanin sett upp til at hava góða KT-trygd. Víst verður eisini á, at Mentamálaráðið seinni møguliga fer at avhenda skúlaforskipanina til Gjaldstovuna.

6.3 Yrkisskúlar (GL 2000/2 10 3-4)

Í februar 2001 vístu vit á, at hóast Ll. nr. 106/1998 "um yrkisskúlar" v.s.b. kom í gildi 1. januar 1999, hevur landsstýrismaðurin ikki ásett reglur, sum álagt honum í § 14 í lógini.

Í áravís hevur landsstýrismaðurin síðani boðað frá, at arbeitt verður við málinum.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst.

Í september 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlandi fór kunngerðin at verða lýst í 2006.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at kunngerðin er send til hoyringar, og verður ætlandi kunngjørd í næstum. Við enda av oktober 2007 er kunngerðin ikki lýst.

6.4 Samskipan av virkseminum hjá sjómansskúlunum (GL 2000/2 10 4-5)

Í oktober 2001 spurdu vit landsstýrismannin, um hann hevði ætlanir um at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Tórshavn og í Klaksvík, vísandi til at samlaða næmingatalið var minkandi.

Skiftandi landsstýrismenn hava síðani fleiri ferðir boðað frá, at spurningurin um at samskipa fór at verða tikin upp.

Í juli 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein arbeiðsbólkur skal lata landsstýrismanninum álit við árslok 2006.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at sum støðan er í dag heldur hann ikki, at samskipan av virkseminum á báðum skúlanum er tann rætta loysnin.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at næmingatilgongdin til maritimu útbúgvingarnar hevur verið fallandi. Við upptøku til skiparaútbúgvingina á Klaksvíkar Sjómansskúla, sum skuldi byrja í august 2007, vóru bert tríggjar umsóknir. Tað førdi við sær, at ongin skiparaflokkur er á Klaksvíkar Sjómansskúla í dag.

Landsstýrismaðurin kunnar eisini um, at í august 2007 byrjaðu á Vinnuháskúlanum 16 næmingar á skiparaútbúgvingini og 24 næmingar á maskinmeistaraútbúgvingini.

Landsstýrismaðurin hevur tí gjørt av at seta ein arbeiðsbólk, ið skal gera álit um framtíðina hjá Klaksvíkar Sjómansskúla, og hvat virksemi skal verða har í framtíðini. Álitið skal eftir ætlanini verða liðugt 1. desember 2007.

6.5 Føroya Læraraskúli (GL 2004/2 10 4-12)

Vantandi sáttmálaásetingar um lærarar, ið undirvísa pedagoglesandi

Lærarar, ið undirvísa læraralesandi, hava 19 tíma undirvísingarskyldu. Lærarar, ið undirvísa pedagoglesandi, hava sambært siðvenju 22 tíma undirvísingarskyldu.

Í januar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ósemja var um hetta mál, og at Mentamálaráðið hevði biðið Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um at taka málið upp við Magistarafelagið í komandi sáttmálasamráðingum.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hóast sáttmálaskeiðið var úti 1. oktober 2005, hava partarnir enn ikki gjørt nýggjan sáttmála.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Magistarafelagið í apríl 2006 hevur sent málið viðvíkjandi undirvísingarskylduni 19/22 í rættin.

Vantandi reglur fyri tímaútrokning og lønaráseting

Í oktober 2001 vístu vit á, at lønarumsitingin ikki í øllum førum byggir á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað, og vit mæltu til at bøta um viðurskiftini.

Niðurstøðan av grannskoðanini í 2004 var tann sama. Verður støði tikið í sáttmálanum við Magistarafelagið, og í einum skrivi frá "Undervisningsministeriet" 6. januar 1983, umframt teimum tulkingum og "óskrivaðu reglunum", sum Læraraskúlin hevur fyri tímaútrokningum og lønarásetingum, eru útgoldnu lønirnar rættar; men sum vit hava gjørt vart við í fleiri ár, byggir lønarumsitingin ikki í øllum førum á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað. Vit heittu tí enn eina ferð á landsstýrismannin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í februar 2005 vísti landsstýrismaðurin á, at viðurskiftini viðvíkjandi tímaniðurskurði eru partur av málinum um at endurskoða arbeiðstíð, arbeiðsviðurskifti o.a. á Føroya Læraraskúla, sum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelagið 11. september 2001 gjørdu protokollat um. Í nýggjari semju millum partarnar 1. juli 2004 varð aftur víst til protokollatið frá 2001, og samstundis varð avtalað, at Fíggjarmálaráðið fór at taka stig til at fáa sáttmálaviðurskiftini í rættlag. Mentamálaráðið hevði tó einki frætt aftur í hesum máli.

Í februar 2006 heitti landsstýrismaðurin á Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um at taka alt málið upp við Magistarafelagið í sambandi við sáttmálasamráðingarnar. Lønardeildin hevur boðað Mentamálaráðnum frá, at Lønardeildin og Magistarafelagið hava havt fund, og at eitt av krøvunum frá Lønardeildini er, at ásetingarnar í sáttmálanum um Læraraskúlan skulu endurskoðast, tí nógvir trupulleikar eru og hava verið. Magistarafelagið hevur ynskt at seta ein arbeiðsbólk, sum kann endurskoða ásetingarnar sum heild.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið hevur ikki frætt aftur um málið, og at partarnir hava enn ikki gjørt nýggjan sáttmála.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at partarnir hava ikki undirskrivað nýggjan sáttmála, men Lønardeildin metir, at tá ið úrskurður fyriliggur í málinum viðvíkjandi undirvísingarskylduni 19/22, verða sáttmálasamráðingarnar á Føroya Læraraskúli tiknar upp aftur.

6.6 Stuðul til privatar skúlar (GL 1996/2 10 5-1)

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið roknskap og grannskoðanarfrágreiðingar hjá Adventistaskúlanum, Føroya Fólkaháskúla og Húsarhaldsskúla Føroya.

Adventistarskúlin

Játtanin var í 2006 2,5 mió.kr. Skúlaraksturin er lagdur um til ein sjálveigandi stovn frá 1. august 2003. Skúlin heldur til í leigaðum hølum hjá Adventistasamkomuni. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Føroya Fólkaháskúli

Jattanin var í 2006 2,5 mió.kr., av hesum fær Føroya Fólkaháskúli 2,2 mió.kr., og 350 t.kr. er næmingastuðul. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Húsarhaldsskúli Føroya

Játtan í 2006 var 2 mió.kr., av hesum er 1,7 mió.kr. stuðul til Húsarhaldsskúla Føroya, og um 300 t.kr. er næmingastuðul. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Samskifti við landsstýrismannin

Í september 2007 sendu vit eina frágreiðing til landsstýrismannin, har vit eisini spurdu um ymisk viðurskifti, m.a. hvussu Mentamálaráðið tryggjar sær, at studningurin er veittur sambært ásetingunum í lógini.

Viðvíkjandi Húsarhaldsskúla Føroya hava vit harumframt sett nakrar spurningar viðvíkjandi roknskapinum og sett spurningar viðvíkjandi roknskapinum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag, ið eigur bygningin, har Húsarhaldsskúli Føroya heldur til.

Vísandi til **fylgiskjal II** "Upprit um stuðul til Adventistaskúlan, Føroya Fólkaháskúla og Húsarhaldsskúla Føroya" hava vit gjøllari greitt frá um grannskoðan okkara. Vit hava ikki fingið svar upp á allar spurningarnar, sum vit settu, men vit halda tað vera viðkomandi hjá løgtingsgrannskoðarunum/Løgtinginum at vita, at spurningarnir eru settir, nú landsroknskapurin 2006 skal verða lagdur fyri Løgtingið til samtyktar.

Játtanarslag

Felags fyri játtanirnar til Adventistaskúlan, Føroya Fólkaháskúla og Húsarhaldsskúla Føroya eru, at landið fíggjar so at siga allan raksturin av virkseminum. Landsgrannskoðanin heldur, at tað út frá einum eftirlitssjónarmiði kann vera óheppið, at landið veitir ein so stóran árligan rakstrarstuðul sum "onnur játtan". Um játtanirnar høvdu verið tiknar við á fíggjarlógina sum ein "rakstrarjáttan", høvðu skúlarnir komið undir at kalla somu játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglur, sum galda fyri landsstovnar.

6.7 Musikkskúlaskipanin (GL 2001/2 10 9-5)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 69/1984 "um stuðul til musikkskúlar", broytt við Ll. nr. 67/1996.

Hóast meira enn 20 ár eru liðin, síðani lógin kom í gildi, er enn ikki samsvar ímillum allar ásetingar í lógini og fyrisitingarligu mannagongdirnar, og vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein nevnd hevur evnað til eitt lógaruppskot, ið broytir lógina so samsvar verður millum praksis og allar ásetingar í lógini. Uppskotið er til løgfrøðiliga viðgerð í Mentamálaráðnum, og verður síðani sent kommununum og musikklærarafelagnum til hoyringar.

6.8 Frítíðarundirvísing (GL 2001/2 10 9-7)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 70/1983 "um frítíðarundirvísing", sum broytt við Ll. nr. 124/2003, og K. nr. 6/1988 "um frítíðarvirksemi". Harafturat eru nógvar ásetingar gjørdar í rundskrivum.

Hóast Mentamálaráðið í oktober 2002 tók undir við, at fleiri av rundskrivunum eiga at verða gjørd til kunngerðir, er tað ikki gjørt enn.

Í frágreiðing okkara í februar 2003 vístu vit á, at hóast lógin ásetir, at landskassin veitir kommununum studning, er játtanin til frítíðarundirvísing ein rakstrarjáttan. Landskassin rindar lønirnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum fyri lønarútreiðslur til lærarar. Mannagongdin er sostatt ikki í samsvari við Ll. nr. 70/1983, har ásett er, at landskassin letur kommununum studning.

Síðani oktober 2002 hava skiftandi landsstýrismenn á hvørjum ári boðað frá, at teir hava tikið stig til, at fult samsvar fór at verða ímillum fyrisitingarligu mannagongdirnar og lógina um frítíðarundirvísing.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst. Men enn er einki broytt.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein arbeiðsbólkur á vári 2007 lat landsstýrismanninum eitt upprit um at broyta umsitingina av frítíðarundirvísingini og uppskot um býtislykil at játta kommununum stuðul til frítíðarundirvísing í mun til fólkatalið í kommununum. Landstýrismaðurin miðar eftir, at arbeiðið at gera nýggja lóggávu á økinum byrjar í januar 2008.

6.9 Listasavn Føroya (GL 2002/2 11 2-8)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2004 umrøddu vit játtanar-, roknskapar- og ognarviðurskiftini hjá Listasavni Føroya.

Í januar 2005 greiddi landsstýrismaðurin frá, at viðurskiftini millum sjálvsognarstovnin og stovnsraksturin enn ikki vóru greidd, og arbeitt varð við at endurskoða viðtøkurnar hjá Listasavninum. Tá ið tað arbeiðið verður liðugt, verður eisini greitt, hvussu roknskapurin skal verða fórdur í framtíðini, ásannandi at verandi framferðarháttur, har eitt møguligt rakstraravlop tilvildarliga verður býtt millum eginrakstur og stovnsrakstur, ikki kann halda fram. Mentamálaráðið væntaði, at arbeiðið fór at verða liðugt á vári 2005.

Í november 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at viðurskiftini millum sjálvsognarstovnin og stovnsraksturin enn ikki vóru greidd. Landsstýrismaðurin ætlaði at raðfesta hesa uppgávu soleiðis, at hon varð liðug veturin 2005/06.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004, (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at so nógv ár ganga, uttan at málið verður loyst.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann hevur sett ein arbeiðsbólk at loysa málið. Landsstýrismaðurin ger vart við, at málið er sera umfatandi, og nógv fyrilit eru at taka, bæði løgfrøðiliga og fyrisitingarliga. Landsstýrismaðurin heldur, at arbeiðsbólkurin kann koma við einum tilmæli síðst í februar 2007.

Í november 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at miðað verður eftir, at finna eina hóskandi loysn fyri Listasavn Føroya, sum kann setast í verk 1. januar 2008.

6.10 Umsiting av stuðulsjáttanum (GL 1996/2 11 9 -1)

Landsgrannskoðanin hevur kunnað seg gjøllari um stuðulsjáttanir, sum Mentamálaráðið umsitur, og játtanir, har stuðulin verður veittur feløgum at umsita.

Í juli 2007 sendu vit Mentamálaráðnum eitt fyribils uppsrit um gjøgnumgongd okkara, har vit eisini settu fleiri spurningar og heittu á Mentamálaráðið um at útvega Landsgrannskoðanini roknskapir og grannskoðanarfrágreiðingar frá feløgum o.ø., sum hava fingið stuðul.

Í **fylgiskjali I,** "Upprit um umsiting av ymsum stuðulsjáttanum undir Mentamálaráðnum", hava vit greitt frá grannskoðan okkara. Vit hava ikki fingið svar upp á allar spurningarnar, men halda tað vera viðkomandi hjá løgtingsgrannskoðarunum/Løgtinginum at vita, at spurningarnir eru settir, nú tá landsroknskapurin 2006 skal verða lagdur fyri Løgtingið til samtyktar.

6.10.1 Ítróttasamband Føroya

Umvegis Sp/f Ítróttarvedding fekk ÍSF í 2006 4.920 t.kr., sum er parturin av veddingarpengunum fyri 2006, sum ÍSF skal umsita.

Av stuðlinum fær ÍSF sjálvt 615 t.kr. til felagsrakstur, og rindar 4.305 t.kr. víðari sum stuðul til sersambond.

Ein serstøk játtan á fíggjarlógini, 6,4 mió.kr., ber heitið "Ítróttasamband Føroya":

- 2 mió.kr. er stuðul til ÍSF.
- 3,3 mió.kr. fer til ferðastuðul innanoyggja hjá ítróttafólki.
- 900 t.kr. fer til Fótbóltssamband Føroya. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2006 stendur, at av játtanini "eru 300 t.kr. settar av til bóltvenjarastuðul og 200 t.kr. sum stuðul til altjóða arbeiðið hjá Fótbóltssambandinum".
- 200 t.kr. fer til ein ítróttaráðgeva til ÍSB.

Í **fylgiskjali I** er greitt gjøllari frá, hvussu veddingarpeningaranir, sum ÍSF umsitur, eru býttir.

Í fylgiskjalinum verður eisini greitt nærri frá um stuðulin og roknskaparviðurskifti hjá tveimum sersambondum undir ÍSF, Fótbóltssamband Føroya og Ítróttasambandið fyri brekað.

6.10.2 Føroya Ungdómsráð (FUR)

Umvegis Sp/f Ítróttarvedding fekk Føroya Ungdómsráð í 2006 1.640 t.kr., sum er parturin av veddingarpengunum fyri 2006, sum FUR umsitur.

Av stuðlinum fær FUR sjálvt 400 t.kr. til felagsrakstur, og rindar 1.113 t.kr. víðari sum stuðul til lokalfeløg. Harumframt fóru 69 t.kr. í stuðulsgrunnin hjá FUR.

Í **fylgiskjali I** hava vit greitt nærri frá um:

- stuðulstreytir,
- lønar- og umsitingarútreiðslur hjá FUR,
- býtið av stuðlinum til landsfelagsskapir og lokalfeløg ,
- stuðul til feløg, ið fáa annan stuðul,
- Stuðulsgrunn FUR's.

6.10.3 Mentamálaráðið (Tiltøk fyri børn og ung)

Á høvuðskontu 7.24.1.05. "Tiltøk fyri børn og ung" er í 2006 ein inntøku- og ein útreiðslujáttan, sum eru eins stórar, 900 t.kr.

Talan er um ætlaðar inntøkur av føroyska partinum av yvirskotinum frá A/S Danske Spil, sum verða tillutaðar Mentamálaráðnum, umvegis Sp/f Ítróttavedding. Sambært landsroknskapinum 2006vóru veddingarpengarnir til Mentamálaráðið 1.640 t.kr.

Í **fylgiskjali I** hava vit greitt nærri frá um:

- endamálið við stuðulinum
- stuðulstreytir
- stuðul til feløg, ið fáa annan stuðul

Vit hava m.a. víst á:

at ilt at fáa eyga á verkætlanir ella tiltøk, ið ikki kunnu fáa stuðul,

at endamálið við stuðlinum er sera breitt orðað,

at ikki er ásett, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið,

at gjøllari krøv til roknskaparførslu og grannskoðan eru ikki ásett.

at Landsgrannskoðanin í áravís hevur vísst á, at gjøllari reglur um roknskap og grannskoðan áttu at verið ásettar, vísandi til ásetingarnar í § 7 B í lógarkunngerð nr. 464/2006 "Lovbekendtgørelse af lov om visse spil, lotterier og væddemål".

6.10.4 Aðrar studningsjáttanir

Í **fylgiskjali I** verður eisini greitt frá umsitingini av øðrum stuðulsjáttanir undir Mentamálaráðnum:

- Ymiskir studningar: høvuðskonta 7.24.1.13.
- Tónleikur og sangur: høvuðskonta 7.24.2.01.
- Sjónleikarhús: høvuðskonta 7.24.2.16.
- Menning av mentan og mentanararvi: høvuðskonta 7.24.3.20.
- Hugasamband Føroya: høvuðskonta 7.24.6.08.
- Ítróttaanlegg: høvuðskonta 7.24.6.12.

6.10.5 Skattlig viðurskifti

Mentamálaráðið rindar stuðul til eftirútbúgving, førleikamenning, konsertferð, skeið, tónleikalesnað o.a. inn á bankakontu hjá umsøkjara, uttan um skattaskipanina. Landsgrannskoðanin hevur vísst á, at henda mannagongd tykist ikki vera samsvarandi ásetingunum í § 60 í skattalógini um A-inntøku.

Mentamálaráðið hevur í september 2007 m.a. greitt frá einari avtalu, har Toll- og Skattstova Føroya frá Mentamálaráðnum fær upplýsingar um, hvørji stovnsnummur Mentamálaráðið letur stuðul til, og Toll- og Skattstovu Føroya fær heimild at lesa øll bókingarskjøl á hesum stovnsnumrum.

Landsgrannskoðanin ivast í, um avtalan/mannagongdin hevur nakra lógarheimild, í teimum førum talan er um studning, ið er at rokna sum A-inntøka sbrt. § 60, stk. 1, nr. 6, í skattalógini. Hetta tí, at sbrt. § 63 skal, áðrenn A-inntøka verður goldin skattgjaldara, A-skattur verða avroknaður í upphæddini. Arbeiðsgevarin skal gjalda A-inntøkuna til eitt av landsstýrinum góðkent avrokningarstað.

Landsgrannskoðanin hevur í oktober 2007 umrøtt málið við leiðsluna á Toll- og Skattstovu Føroya, sum eisini sigur seg ivast í, um mannagongdin er røtt, og vit hava mælt landsstýrismanninum til at viðgera spurningin av nýggjum.

Vit hava áður reist sama spurning í sambandi við studning úr Mentanargrunninum.

Vit hava vit eisini vísst á, at sambært átekning í roknskapinum hjá Føroya Symfoniorkestri er endurgjald til ferðir, samsýningar o.a. óskattað. Henda mannagongd tykist heldur ikki vera samsvarandi ásetingunum í § 60 í skattalógini um A-inntøku.

6.10.6 Alment um studningslóggávu

Landsgrannskoðanin hevur seinastu árini vísst á, at tað er góður lóggávusiður, at neyvari reglur um studningsskipanir, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, verða ásettar í serstakari lóg við m.ø.:

1. Neyvari endamálsáseting í lógini. Í viðmerkingunum: ítøkiligar ásetingar fyri, hvørji úrslit/eyðkenni kunnu nýtast sum mát fyri, um endamálið er rokkið.
2. Lýsing/avmarkan av, hvør kann fáa stuðul, hvussu stuðulin verður roknaður út, og hvussu stór samlaða stuðulsupphæddin er, vísandi til fíggjarlóg.
3. Reglur fyri, hvussu og nær stuðulin verður goldin út.

4. Heimild í lógini at áseta reglur fyri viðgerð og góðkenning av umsóknum, krøv til skjalprógv, treytir fyri játtan og nýtslu av stuðuli.
5. Heimild í lógini at krevja, at einstaklingar, feløg ella viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar o.l., skulu lúka ávís krøv/góðkennast, sum treyt fyri stuðuli.
6. Heimild í lógini at áseta neyvari treytir og reglur viðvíkjandi fíggjarætlan, eftirliti, roknskapum og grannskoðan.
7. Ásetingar í lógini um, at ein tilsøgn um stuðul fellur burtur, ella stuðulin skal verða rindaður aftur, lýkur móttakarin ikki longur settar treytir, ella megnar ikki at fullføra eina ætlan innan ásetta tíð.
8. Upplýsingarskyldu og atgongd til kanningar á staðnum.
9. Møguligar revsireglur.

Umrøddu trupulleikar viðvíkjandi stuðulsumsiting er ikki eitt serstakt fyribrigdi hjá landsstýrismanninum í mentamálum, og í samráð við fleiri aðalráð átók Landsgrannskoðanin sær í september 2001 at skipa fyri einum skeiði í "umsiting av stuðulsjáttanum o.a.".

Síðani 2002 hevur m.a. Fíggjarmálaráðið og ein serkøn nevnd, sett av Formansskap Løgtingsins, arbeitt við at evna til eina játtanarlóg og í hesum sambandi eisini almennar lógarásetingar um studning úr landskassanum. Eisini hevur verið umrøtt at bøta um viðmerkingarnar á fíggjarlógini.

Í mars 2006 legði løgtingsformaðurin fram uppskot til løgtingslóg "um landsins játtanarskipan" (Lm. nr. 81/2005). Ætlanin við uppskotinum var eisini at útvega heimild til at áseta neyvari reglur "til tess at tryggja skynsama stuðulsumsiting." Lógaruppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn Løgtingið fór heim í mai 2006, og fall burtur.

Landsgrannskoðanin heitti í oktober 2006 til fánýtis á Formansskap Løgtingsins um at reisa málið av nýggjum.

6.10.7 Alment um studningsumsiting

Ein stórur partur av studninginum til mentan og ítrótt eru veddingarpengar frá Dansk Tipstjeneste A/S. Lógin um veddingarpengar kom í gildi í apríl 1999, og hevur sostatt virkað í 8 ár. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir vístá, at tað ikki er nøktandi, at føroyska heimastýrið ikki enn hevur ásett *"nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision"*, og at ongar ætlanir eru um at áseta tílíkar reglur.

Síðani 2002 hevur Mentamálaráðið bøtt um umsitingina á ymiskan hátt við leiðreglum o.ø., men sum vístá, er endamálið við stuðlinum oftast sera breitt orðað, og ikki er ásett, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið. Gjøllari krøv til roknskaparførslu og grannskoðan eru ikki ásett. Samanumtikið kunnu vit tí í 2007 endurtaka fleiri av viðmerkingum okkara frá 2002:

> "Nógvu studningsjáttanirnar, sum politiski myndugleikin (landsstýrismaðurin) umsitur, eru bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Summar játtanir eru til meginfeløg, sum síðani umsita studning til undirliggjandi feløg, ofta uttan neyvari ásetingar frá landsstýrismanninum. Fleiri játtanir fevna um at kalla sama breiða endamál og sama umsøkjaraskara.
>
> Fleiri stovnar/feløg kunnu fáa studning til somu endamál frá meginfeløgum, umframt frá stuðulsjáttanum, ið landsstýrismaðurin umsitur.
>
> Umsitingin av studningi til mentanarendamál tykist sum heild fløkt og óskipað og er eisini merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv, í sambandi við málsviðgerð og útgjalding av studningi. Í ávísan mun er talan um fleirfalda málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál.
>
> Eftir okkara tykki er tørvur á einari sanering/upprudding viðvíkjandi stuðulsgrundarlagi/-lóggávu og stuðulsumsitingini, so endamál og treytir o.a. verða greiðari."

Í september 2007 ásannaði landsstýrismaðurin, "*at studningsumsitingin kann virka ógreið, og Mentamálaráðið kann vera samt í, at endamálini við ymsu studningsjáttanunum kundu verið neyvari lýst. Viðvíkjandi fleirfaldari málsviðgerð duga vit í verandi skipan ikki at síggja, hvussu hetta kann umgangast. Umsøkjarar hava rætt til at fáa stuðul bæði frá Mentamálaráðnum og t.d. Mentanargrunninum ella ymsum feløgum til sama tiltak, og vit hava hvør sína umsiting.*"

Fleiri studningsjáttanir, sum Mentamálaráðið varðar av, verða latnar øðrum at umsita. Eins og vit áður hava víst á, hevur Mentamálaráðið ikki í øllum førum ásett leiðreglur ella treytir fyri, hvussu hesi feløg skuldu umsita studningin, t.d. reglur um fíggjarætlan, eftirlit, roknskaparhald og grannskoðan.

Gjøgnumgongdina av útgjaldingum í 2006 hevur eisini víst, at tað framvegis í nógvum førum kemur fyri, at stuðul verður veittur til landsstovnar ella stovnar/feløg, ið frammanundan fáa stuðul sum "rakstrarjáttan" ella stuðul frá øðrum játtanum á løgtingsfíggjarlógini.

Í nøkrum førum er talan um studning til eina ávísa verkætlan, ið avvarðandi stovnur umsitur. Men í øðrum førum tykist tað vera óskipað og kanska óneyðugt at veita studning til ein almennan stovn ella felag, ið fær stuðul frá nógvum játtanum.

Í oktober 2007 vísir landsstýrismaðurin á, at Mentamálaráðið strembar eftir ikki at veita stuðul til feløg og stovnar, ið longu fáa stuðul á fíggjarlógini. Tó verða ávísar verkætlanir, ið fella uttanfyri raksturin hjá felagnum, stuðlaðar, um hildið verður, at verkætlanin eigur at verða framd, og ikki ber seg fíggjarliga uttan stuðul frá Mentamálaráðnum.

7 Innlendismál

7.1 Grannskoðan av Umhvørvisstovuni (GL 2007/2 05 9-8)

Í juni 2007 vórðu stovnarnir Matrikulstovan, Náttúrugripasavnið, Landsfólkayvirlitið, Skógrøkt Landsins, Tinglýsingarstovan og umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni lagdir saman, og fingu felagsheitið Umhvørvisstovan.

Í 2007 grannskoðaðu vit Umhvørvisstovuna við støði í einum spurnablaði, sum vit høvdu sent stovninum, viðvíkjandi roknskapar-, lønar-, KT- og øðrum viðurskiftum, sjá **fylgiskjal III**. Undan vitjanini hevði leiðslan svarað spurnablaðnum og sent okkum tað. Broyttu viðurskiftini merkja, at nógvar mannagongdir o.a. skulu verða dagførdar.

Niðanfyri er í stuttum tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

- Virksemið hjá Matrikulstovuni, Tinglýsingini og Skógrøkt Landsins eru lógarásettar, eins og tær hjá Skógrøkt Landsins sum í stóran mun eru lógarásett. Uppgávurnar við umhvørvisvernd eru eisini lógarásettar.
- Stjórin fær skrivað út úr einari journalskipan, hvussu nógv mál eru, eru avgreidd ella eru undir avgreiðslu. Tíðarskrásetingin á stovninum verður mest brúkt til "klokku", hóast skrásett verður upp á "umsiting" og "sakir". Er talan um sakir, sum verða faktureraðar út frá tíðarnýtslu, verður tíðarnýtslan skrásett á sakirnar.
- Stovnurin brúkar eina roknskaparreglugerð hjá Matrikkulstovuni sum er frá 2001, sum tá varð góðkend av Vinnumálaráðnum. Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd, síðani stovnarnir vórðu lagdir saman.
- Mánaðarroknskapirnir verða regluliga og rættstundis góðkendir mótvegis hægri myndugleika.
- Matrikulstovan hevur ment eina journalskipan í MS-Access. Stovnarnir nýta ymsar journalskipanir, og ætlanin er, at ein felags journalskipan verður tikin í nýtslu.
- Ognaryvirlitið er dagført til og við fíggjarárið 2006.
- Stovnurin hevur skipað ymisk trygdartiltøk á KT-økinum, eitt nú brandmúr, virusverju, persónlig brúkaranøvn og loyniorð, ið javnan verða skift.
- Ásetingar eru í roknskaparreglugerðini um at áleggja yvirtíð, ferðing uttanlands og setan av fólki. Ætlanir eru um at gera allar skrivligar mannagongdir av nýggjum, tá ið roknskaparreglugerðir o.a. verða "samansjóðað".
- Úrslitið av lønargrannskoðanini er, at skjalprógv er í málunum fyri útbúgving og fyri innplasering, og í teim nýggjaru málunum eru setanarskriv. Í 2 av 3 málum eru lønargjaldsumbønir, sum eru rætt fyltar út. Í 3. málinum var eingin lønargjaldsumbøn og skjalprógv manglaði fyri framflyting.
- Stovnurin hevur ikki mett um vandan fyri sviki, men vísti stjórin til skilnaðin millum tey sum skráseta og leysgeva, og kunnaði um, at mannagongdirnar fara at verða dagførdar, tá alt roknskaparøkið verður gjøgnumgingið.

7.2 Ítróttavedding (GL 2001/2 02 1-3)

Á høvuðskontu 14.3.07 "Ítróttavedding", undir innlendismálum, er í 2006 ein inntøku- og ein útreiðslujáttan, sum eru eins stórar, 8.500 t.kr. Talan er um ætlaðar

inntøkur av Føroya parti av yvirskotinum frá Danske Spil A/S, ið verða goldnar Sp/f Ítróttavedding, ið síðani býtir peningin, sum ásett í lóg.

Býtið av veddingarpengunum

Í § 6 A, stk. 1, í lógarkunngerð nr. 464 frá 18. mai 2006 "Lovbekendtgørelse af lov om visse spil, lotterier og væddemål" er m.a. ásett, hvussu yvirskotið verður at býta. Meginparturin fer til danskar ráðharrastovur at umsita, men sambært § 6 A, stk. 2, fáa Grønland og Føroyar "*overskud af spil, der foregår på Færøerne og i Grønland.*"

Sambært § 7 í lógarkunngerðini rindar Danske Spil A/S yvirskotið til Finansstyrelsen, sum síðani rindar Gjaldstovuni føroyska partin av yvirskotinum.

Sambært § 6 I lógarkunngerðini *"fordeles overskuddet fra spil på Færøerne og i Grønland af de respektive landsstyrer til almennyttige formål."*

Í uppruna uppskotinum til løgtingslógina um "ítróttavedding v.m." var í § 9, stk. 2, ásett, at nevndin fyri Sp/f Ítróttavedding gjørdi av, hvussu peningurin varð nýttur. Eftir uppskoti frá Rættarnevndini varð henda áseting tikin burtur í samtyktu lógini, við teirri grundgeving at leiðslan í ÍSF, Føroya Ungdómsráð (FUR) og landsstýrismaðurin skuldu gera av, hvussu peningurin skuldi verða nýttur.

Eftir at sett er av til fyrisiting, skal felagið sambært § 9, stk. 1, í lógini býta peningin soleiðis:

- 60% til ítróttaendamál (ÍSF)
- 20% til barna- og ungdómsendamál (FUR)
- 20% til landsstýrismannin í mentamálum at stuðla ymiskum barna- og ungdómsarbeiði.

Finansstyrelsen flytur veddingarpeningin til Innlendismálaráðið/Gjaldstovuna, sum sendir peningin víðari til:

- ÍSF, ið býtir partar av peninginum út til undirliggjandi feløg,
- FUR, ið býtir partar av peninginum út til undirliggjandi feløg,
- Mentamálaráðið, ið játtar stuðul til feløg og einstaklingar (Høvuðskonta 7.24.1.05. "Tiltøk fyri børn og ung").

Eftir okkara tykki er tað ikki skilagott, at 2 landsstýrismenn/aðalráð hava ábyrgd av veddingarpengunum. Tá ið Mentamálaráðið sjálvt umsitur ein part av pengunum, og hinir partarnir fara til endamál, sum hoyra undir Mentamálaráðið, hevði tað verið greiðari, um Mentamálaráðið hevði alla ábyrgdina. Landsgrannskoðanin bað í juli 2007 landsstýrismannin í innlendismálum og landsstýrismannin í mentamálum um viðmerkingar til hesi sjónarmið.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur ikki svarað.

Í september 2007 svaraði landsstýrismaðurin í mentarmálum, at Mentamálaráðið kann geva Landsgrannskoðanini rætt í, at tað ikki er heppið, at tvey aðalráð umsita veddingarpeningin, uttan tó at siga, at tað skal verða Mentamálaráðið, ið umsitur økið.

Býtið av stuðlinum er ásett í lógini. Landsgrannskoðanin ivast í, um nøkur meining er í at lata eitt partafelag býta stuðlin sambært ásetingum í lógini. Tað kundi Føroya Gjaldstova tað sama gjørt beinanvegin.

Sambært roknskapinum hjá Sp/f Ítróttavedding eru útreiðslurnar í 2006 til at umsita felagið 390 t.kr. Seinastu 5 árini eru samlaðu fyrisitingarútreiðslurnar um 2 mió.kr., sum kundu verið betur brúktar.

Landsgrannskoðanin bað í juli 2007 landsstýrismannin í innlendismálum og landsstýrismannin í mentamálum um viðmerkingar til hesi sjónarmið.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur ikki svarað.

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin í mentamálum frá, at Mentamálaráðið er samt í, at loysnin við partafelagnum bert er ein dýrkandi millumliður, ið kann verða spardur burtur.

Sp/f Ítróttavedding

Roknskaparviðurskifti

Í roknskapinum, ið verður latin Skráseting Føroya, er henda frágreiðing um roknskaparuppstillingina:

> *"Felagið hevur, við heimild í ÁRL § 25, valt at vísa inntøkur, vørunýtslu og annan kostnað í einum sum bruttovinning. Leiðslan metir, at felagið lýkur treytirnar í ARL § 25 fyri at kunna gera hetta."*

Sp/f Ítróttavedding er ikki í kapping við onnur feløg, og tað tykist tí burturvið, at felagið hevur valt at nýta ásetingarnar í § 25.

Í einari notu í ársroknskapinum 2006 er yvirlit yvir inntøkurnar 2002 – 2006. Niðanfyri hava vit samanborið hetta yvirlit við inntøkurnar sambært landsroknskapinum.

t.kr.

	2002	2003	2004	2005	2006	**Tilsamans**
Sambært notu í ársroknskapinum	6.994	9.825	10.480	8.537	8.837	**44.673**
Sambært landsroknskapinum	6.994	1.660	17.994	8.914	9.522	**45.084**
Munur	**-**	**8.165**	**-7.514**	**-377**	**-685**	**-411**

Eftir talvuni eru samlaðu inntøkurnar sambært landsroknskapinum 45.084 t.kr., sum er 411 t.kr. meira enn inntøkurnar sambært roknskapinum hjá Sp/f Ítróttavedding.

Sambært roknskapinum 2002 – 2006 eru lønir til stjóran 60 t.kr. um árið. Samsýningar til nevndina eru í miðal 150 t.kr. um árið. Aðrar rakstrarútreiðslur eru í miðal 210 t.kr um árið.

Sum vit áður hava gjørt vart við, ivast Landsgrannskoðanin í, um nøkur meining er í, at stuðulin fer um eitt partafelag, og m.a. verður nýttur til at løna einum stjóra, einari nevnd og annars fíggja umsitingina av partafelagnum. Seinastu 5 árini eru samlaðu fyrisitingarútreiðslurnar um 2 mió.kr., sum kundu verið betur brúktar.

Gjøllari reglur um roknskap og grannskoðan ikki ásettar

Í § 7 B í umrøddu lógarkunngerð 464/2006 er ásett: "*Det enkelte ressortministerium og hjemmestyrene **fastsætter nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision** med hensyn til midler, som efter §§ 6 B-6 I fordeles til private organisationer. Til brug for Rigsrevisionen kan ministerierne og hjemmestyrerne indhente yderligere materiale til en nøjere regnskabsgennemgang."*

Sambært § 10 í Ll. nr. 34/1999 "*hava landsgrannskoðarin og ríkisgrannskoðarin eftirlit við, at tann í § 9 nevndi peningur verður brúktur almannagagnliga, og hava teir í starvi sínum neyðuga lógarheimild at fáa hendur á øllum skjølum fyri at útinna hetta eftirlit.*

Stk. 2. Um so er, at landsgrannskoðarin ella ríkisgrannskoðarin vísa á, at peningur sbr. stk. 1, ikki er nýttur til almannagagnlig endamál, hevur landsstýrismaðurin heimild til við kunngerð at áseta, at tann peningur, sum eftir § 9 skal býtast av Ítróttasambandi Føroya og Føroya Ungdómsráð, í staðin verður útbýttur av landsstýrismanninum."

Í Danmark hevur t.d. Undervisningsministeriet í kunngerðum sett reglur um roknskap og grannskoðan av stuðli m.a. til "Dansk Ungdoms Fællesråd", og eisini sett

reglur um roknskap og grannskoðan av teimum ungdómsfeløgum, sum fáa stuðul frá "Dansk Ungdoms Fællesråd".

Í Grønlandi hevur heimastýrið í "Landstingslov om fordeling af tips- og lottomidler" m.a. ásett, at studningurin skal verða rindaður aftur, hevur umsøkjarin givið skeivar upplýsingar.

Fólkatingslógin heimilar landsstýrunum at áseta reglur um viðgerð og góðkenning av umsóknum, um treytir fyri studningi, um at útvega upplýsingar og at áseta reglur um roknskap og grannskoðan.

Samskifti við landsstýrismannin í innlendismálum

Í Føroyum hevur Løgtingið ongar tílíkar reglur sett í Ll. nr. 34/1999 "um ítróttavedding v.m.", og heldur ikki er heimilað/álagt landsstýrismanninum at áseta tílíkar reglur. Vanliga áliggur tað landsstýrismanninum í rímiligan mun at føra eftirlit og seta reglur. Landsgrannskoðanin hevur áður vísst á, at mótvegis Løgtinginum hevur landsstýrismaðurin ábyrgdina av, at játtanir á fíggjarlógini, eisini tær sum meginfeløg o.o. umsita, verða umsitnar rætt, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt.

Innlendismálaráðið helt í oktober 2004, at slíkar reglur áttu at verið gjørdar fyri Føroyar, men vísti á, at orkan í føroysku fyrisitingini er avmarkað. Innlendismálaráðið kunnaði samstundis um, at vegna stóra skerjing í Innlendismálaráðnum vóru veddingamál ikki raðfest í 2005, og tí verður í fyrsta lagi vent aftur til hetta mál í 2006.

Í februar 2006 boðaði Innlendismálaráðið frá, at ráðið var ikki ósamt við Landsgrannskoðanina í, at slíkar reglur eiga at verið gjørdar í Føroyum. Hinvegin er arbeiðsorkan í føroysku fyrisitingini sera avmarkað í mun til t.d. donsku fyrisitingina, og má tað tí ásannast, at tað ikki ber til at gera eins nógvar reglur í Føroyum, sum í t.d. Danmark, í øllum førum ikki líka skjótt. Landsstýrismaðurin hevði ongar ítøkiligar ætlanir um at gera slíkar reglur. Hildið varð framvegis, tá hugsað verður um samlaðu arbeiðsorkuna, at skulu slíkar reglur verða gjørdar í Føroyum, eiga tær at verða gjørdar antin av einum ávísum aðalráði/myndugleika, ella í felag av teimum aðalráðum, sum hava tørv á slíkum reglum.

Í september 2006 boðaði Innlendismálaráðið frá, at einki nýtt var hent í málinum.

Í skrivi 13. oktober 2006 til Rættarnevndina kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"Landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur ongar leiðreglur gjørt og hevur, sum er, ikki tikið avgerð um, í hvønn mun Innlendismálaráðið eigur at raðfesta hesa uppgávu."*

Í ummælisskrivi sínum 18. oktober 2006 til Fíggjarnevndina er Rættarnevndin av teirri fatan, at eingin peningur eigur at verða goldin út, fyrr enn leiðreglurnar eru gjørdar.

Lóg um ítróttavedding kom í gildi í apríl 1999 og hevur sostatt virkað í sløk 8 ár. Eftir okkara tykki er tað ikki nøktandi, at føroyska heimastýrið ikki enn hevur ásett *"nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision"*, og at ongar ætlanir eru um at áseta tílíkar reglur.

Í juni 2007 sendu vit landsstýrismanninum frágreiðing um veddingarpengar frá A/S Danske Spil, játtanina til Sp/f Ítróttavedding og um roknskapirnar hjá felagnum. Vit settu eisini nakrar spurningar.

Hóast áminningarskriv, hava vit einki svar fingið.

7.3 Hin føroyski Happadrátturin (GL 2001/2 02 1-3)

Í februar 2002 vísti Landsgrannskoðanin á, at seinastu 10 árini hevði nettovinningurin av Happadráttinum í miðal verið um 1,4 mió.kr. og fyrisitingarútreiðslurnar 0,9 mió.kr. Sostatt lá árliga yvirskotið í miðal um 0,5 mió.kr. Yvirskotið árini 2000 - 2005 hevur ligið frá 21 t.kr. til 344 t.kr.

Í februar 2006 tók landsstýrismaðurin málið upp á landsstýrisfundi, har hann bað um undirtøku fyri at taka Happadráttin av 30. juni 2006. Undirtøka var ikki í Landsstýrinum. Happadrátturin verður tí fyribils rikin víðari, til onnur politisk avgerð verður tikin.

Sambært álitinum til fíggjarlóg 2007 heldur Fíggjarnevndin, at Happadrátturin eigur at verða endurskoðaður og nútímansgjørdur.

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki er hent í málinum.

7.4 Roknskaparviðurskifti hjá kommununum (GL 2002/2 02 3-1)

Sambært § 47 í Ll. nr. 87/2000 "um kommunustýri" kann landsstýrismaðurin *"áseta nærri reglur um kontuskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tílíkt."*

Í november 2002 spurdi Landsgrannskoðanin løgmann, hvørjar reglur vóru ásettar, og um løgmaður helt tær vera nøktandi.

Í desember 2002 boðaði Løgmansskrivstovan frá, at Løgmálaráðið sat fyri hesum málsøki, og tí varð skrivið sent teimum at svara.

Í februar 2003 greiddi Løgmálaráðið/Innanríkisdeildin frá, at ein leiðbeining frá 1992, um at seta upp kommunalar fíggjarætlanir og roknskapir, enn var galdandi. Innanríkisdeildin helt ikki viðurskiftini vera nøktandi. Nakrar kommunur høvdu lagað skipanirnar eftir egnum tørvi, og til bar ikki at samanbera roknskapir ímillum kommunur ella ímillum land og kommunur. Ætlanin var at endurskoða roknskaparverkið hjá kommununum, og við heimild í § 47 í kommunustýrislógini at áseta neyvari og nøktandi reglur á økinum.

Í mars 2004 boðaði Innlendismálaráðið frá, at arbeiðið var ikki byrjað, tí val varð skrivað út. Ætlanin var at taka arbeiðið upp aftur, tá støða var tikin til arbeiðssetningin.

Í september 2004 vísti Gjaldstovan á, í ummæli sínum til uppskotið til løgtingslóg um barnavernd (Lm. nr. 10/2004):

> *"Tað er ein trupulleiki at flyta fíggjarligar uppgávur út til kommunurnar, sum ikki hava nakrar ásettar treytir um roknskaparverkið, t.d. eina felags kontuskipan ella eina roknskaparkunngerð, sum landið hevur. Tað er torført hjá Løgtinginum at taka avgerð um at flyta umsitingina av einari uppgávu, sum er so regulerað, til eitt annað almannaverk – í hesum føri kommunur, har tað ikki verða sett krøv – tí alt verður fíggjað við skattaborgarans peningi.*
>
> *Nú kenni eg einki til, hvørjar skrásetingarskipanir eru neyðugar útyvir eina roknskaparskipan, men tað kundi hugsast, at neyðugt er við øðrum fyrisitingarligum KT-loysnum, har krav er um at uppfylla sokallaðu trygdarkunngerðina, sum fór at virka 1. september 2004.*
>
> *Gjaldstovan hevur fleiri ferðir peikað á, at um ikki tað verður stovnsett eitt vælvirkandi KT-undirstøðukervi fyri tað kommunala økið, so verður hetta ein forðing fyri at flyta uppgávur frá landi til kommunur."*

Í 2004 vóru fleiri fundir millum Innlendismálaráðið, Fíggjarmálaráðið og kommunufeløgini um eina felags roknskaparskipan, har Fíggjarmálaráðið m.a. greiddi frá Búskaparskipan Landsins, Kontuskipan Landsins og konteringarleiðbeiningini, uttan at komið varð til nakra semju um at nýta hesar skipanir.

Eftir at kommunufeløgini høvdu skipað seg av nýggjum eftir kommunuvalið, varð fundur aftur hildin í mars 2005 millum formenninar í kommunufeløgunum og landsstýrismenninar í innlendismálum og fíggjarmálum um eina arbeiðsætlan.

Í mai 2005 varð upprit um "strategi 2015" á kommunala økinum lagt fyri Landsstýrið. Partur av ætlanini var, at ein fíggjarstýringarskipan skuldi verða gjørd,

sum skuldi standa kommununum í boði at nýta ella regluliga fráboða til. Skipanin skuldi tryggja gjøgnumskygni í kommunala geiranum og samstundis tryggja samanberingargrundarlag millum kommunurnar. Sambært landsstýrismanninum varð málið viðgjørt, og onkrar smærri fyrireikingar gjørdar, *"men síðst í november varð staðfest, at ongin avgerð var tikin um strategi á kommunala økinum. 2. november 2005 tekur nýggjur landsstýrismaður við í Innlendismálum."*

Í oktober 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann ætlar at leggja stóran dent á, at arbeiðið við kunngerð, kontuskipan og vegleiðing verður framt og liðugt komandi vár (2007).

Í november 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við at gera kontustrong er komið so langt, at miðað verður ímóti, at kommunurnar kunnu taka hann í nýtslu í 2008.

Sambært landsstýrismanninum í innlendismálum hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum givið kommununum tilboð um at fáa FSL-skipanina hjá landinum ókeypis. Hesum hava fleiri kommunur víst áhuga fyri.

Roknskaparkunngerðin er til løgfrøðiliga eftirkanning áðrenn hon fyri aðru ferð verður send til hoyringar. Ætlanin er, at kunngerðin kemur í gildi 1. januar 2008.

Samskifti við landsstýrismannin

Løgtingsgrannskoðararnir hava fleiri ferðir heitt á landsstýrismannin um at tryggja, at reglurnar um roknskaparviðurskifti o.a. hjá kommununum verða endurskoðaðar og dagførdar, og at roknskaparviðurskiftini verða samskipað. Løgtingsgrannskoðararnir hava eisini víst á, at nú fleiri uppgávur verða fluttar kommununum, er tað umráðandi at tryggja, at roknskapar- og KT-viðurskiftini koma í eina tryggari legu. Løgtingsgrannskoðararnir hava átalað, at ikki nóg mikið er gjørt fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum umsitur kommunumál og hevur ábyrgdina av lóggávuni um kommunal mál, herímillum hoyra stjórnan av kommununum og eftirlit við teimum. Ein landsstýrismaður hevur rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum eru løgd til hansara, og tað áliggur honum, í rímiligan mun, at føra eftirlit við og áseta reglur á sínum málsøki.

Í september 2006 boðaðu vit landsstýrismanninum frá, at Landsgrannskoðanin ikki kundi góðtaka ferð eftir ferð at fáa ógreið og óformlig svar frá øðrum í Innlendismálaráðnum, tá ið vit settu fram spurningar til landsstýrismannin í einum so týðandi máli.

Í svarskrivi sínum í oktober 2006 ásannar landsstýrismaðurin, at tað hevur gingið striltið við at fáa skipað roknskaparviðurskiftini hjá kommununum á nøktandi hátt, og at arbeiðið hevur gingið illa og alt ov seint.

Landsgrannskoðanin helt í januar 2007, at ábyrgdin av at áseta nærri reglur um kontuskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap o.t., umframt ábyrgdin at hava eftirlit við hesum pørtunum av virkseminum hjá kommununum, eigur at vera flutt til Fíggjarmálaráðið. Innlendismálaráðið hevur ikki førleikan á hesum øki.

Í seinasta uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið í januar 2007, stendur m.a. viðvíkjandi roknskaparviðurskiftunum hjá kommununum:

> *"Nú fleiri uppgávur verða fluttar til kommunurnar, hava løgtingsgrannskoðararnir í áravís víst á, at tað er umráðandi at tryggja, at roknskapar- og KT-viðurskiftini koma í eina tryggari legu, og fyri betur at kunna samanbera roknskapir millum kommunur, og millum land og kommunur. Málið er ikki loyst (s. 98-100). Løgtingsgrannskoðararnir átala enn eina ferð, at ikki nóg mikið er gjørt fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.*

Løgtingsgrannskoðararnir halda eisini, at tað eigur at bera til at kunna fylgja við, um t.d. útreiðslur hjá landinum minka, í tann mun kommunurnar átaka sær uppgávur hjá landinum."

Í áliti sínum frá mars 2007 til uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005 heldur Fíggjarnevndin eisini:

"At arbeiðið við at samskipa roknskapir millum land og kommunur gongur alt ov seint. Tað er umráðandi, at hesi viðurskifti verða avgreidd.

Fíggjarnevndin heldur, at løgmaður átti at lagt alt búskaparøkið til ein og sama landsstýrismann, soleiðis at tað ber til at samskipa hetta økið betur og harvið fáa eitt betri innlit í búskapargongdina fyri alt tað almenna."

8 Almanna- og heilsumál

8.1 KT-viðurskifti á Almannastovuni (GL 2004/2 07 1-5)

Niðanfyri hava vit kunnað um støðuna viðvíkjandi KT-viðurskiftunum á Almannastovuni í mun til tilmæli okkara í frágreiðingini í juli 2000.

I. VFS-SKIPANIN

1. januar 2000 varð VFS-skipanin á Almannastovuni tikin í nýtslu. Skipanin er ein journal-, málsviðgerðar-, útrokningar- og útgjaldsskipan, ið verður nýtt til at gjalda út fólkapensjón, fyritíðarpensjón, forsorgarveitingar, barnaforsorgarveitingar o.a., tilsamans um 800 mió.kr. um árið.

Í juli 2000 gjøgnumgingu vit skipanina við støði í FSR-grannskoðanarvegleiðing nr. 14, "Vejledning om revision i virksomheder, som anvender edb". Vit sendu landsstýrismanninum eina frágreiðing, ið vísti, at KT-viðurskiftini á Almannastovuni vóru ikki nóg trygg, og vit mæltu til fleiri ábøtur.

Vit hava síðani havt samskifti við Almannastovuna og landsstýrismannin um, hvussu arbeiðið gongur, og hvørji tiltøk eru sett í verk.

Síðani 2000 eru ásettar reglur og krøv um KT-trygd í landsumsitingini, t.d. í:

- roknskaparrundskrivinum, serliga í pkt. 8 og 10,
- Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum" v.s.b., serliga í § 31, stk. 3,
- K. nr. 28 frá 27. februar 2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum", ið neyvari greinar ítøkilig krøv til trygdartiltøk eftir § 31, stk. 3, í persónsupplýsingarlógini,
- KT-trygdarpolitikki Føroya Gjaldstovu, ið ásetir krøv til stovnar, ið samskifta við Búskaparskipan Landsins,
- rundskrivi Vinnumálaráðsins 22. desember 2004 um KT-trygd, ið ásetir, at leiðslurnar fyri 1. februar 2006 skulu lúka krøvini í trygdarstandardunum ISO 17799 og BS 7799-2.

II. AÐRAR SKIPANIR

Almannastovan nýtir eina journalskipan (ScanJour) og eina HP3000 teldu til forskotsrindan av barnapeningi, til dagpeningaskipanina og til lønir.

III. VÁÐAMETING AV KT-KERVINUM

Í september 2005 fekk Almannastovan handaða eina váðameting av KT-kervinum, sum eitt grannskoðarafelag hevði gjørt. Í váðametingini er vístá fleiri viðurskifti, sum ikki eru nóg trygg. Váðametingin fevnir um VFS-skipanina, ScanJour og Oracle dátugrunnin. Aðrar skipanir eru eisini í váðametingini (dagpeningaskipanin, aðrar skipanir, sum hoyra til virksemið hjá Hjálpartólamiðstøðini o.a.).

Sambært almannastjóranum í juni 2006 hevði Almannastovan stórt sæð ongan pening til at bøta um teir veikleikar í KT-trygdini, sum váðametingin hevði vístá. Eingin broyting var gjørd í VFS-skipanini, síðani váðametingin varð gjørd.

Í desember 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan hevði vístá fleiri økir í KT-trygdini, ið bøtt kundi verða um primo 2007.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ein raðfesting er gjørd í mars 2007. Arbeitt hevur verið við nøkrum av málunum, men arbeiðið við KT-verkætlanini hevur enn eina ferð seinkað arbeiðinum við KT-trygdini nakað.

IV. ARBEIÐIÐ VIÐ NÝGGJARI KT-SKIPAN

VFS-skipanin varð ment í 1997-1999 og tikin í nýtslu 1. januar 2000, uttan at Almanna- og Heilsumálaráðið og Almannastovan fyrst høvdu søkt Fíggjarmálaráðið um loyvi sambært § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini.

Í februar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ein forkanning, í sambandi við menning av nýggjari avgreiðslu- og kunningarskipan á Almannastovuni, var um at verða liðug. Eitt aðalmál við hesari forkanning er, at nýggja KT-skipanin, sum skal fevna um alt kjarnuvirksemið á Almannastovuni, skal lúka allar ásetingar í roknskaparkunngerðini og í lóg/kunngerð um persónsupplýsingar. Føroya Gjaldstova er við í forkanningunum og verður somuleiðis við í menningini av nýggju skipanini fyri at tryggja, at øll krøv, ásett í roknskaparkunngerðini, verða fylgd.

Í november 2006 kunnaði Almannastovan landsstýrismannin um kravfestingina av nýggju KT-heildarskipanini, sum í minsta lagi kemur at kosta 18 mió.kr., men sum fult útbygt fer at kosta umleið 36 mió.kr. Væntandi verður talan um eina verklagslóg, sum fevnir um eitt 3 ára prosjekt, og ætlanin er at bjóða uppgávuna út alment.

3. mai 2007 samtykti Løgtingið verklagslógina um fyrra part av nýggju KT-skipanini til Almannastovuna. Játtanin bleiv 15 mió. kr., við møguleika fyri at fáa 3 mió. kr. afturat, um tilboðið fyri fyrra partin vísir seg at verða meira enn 15 mió. kr.

Sambært landsstýrismanninum hevur fyrri partur av nýggju KT-skipanini eftir ætlan í sær allar fakskipanirnar hjá Almannastovuni, og øll krøv til roknskaparreglugerðina, ISO-17799 og persónsupplýsingalógina. Ætlanin er, at fyrri partur av KT-skipanini skal verða tikin í nýtslu seinast í 2009.

V. TRUPULLEIKAR, TENGDIR AT VERANDI KT-SKIPANUM

Herd krøv til KT-trygd

Í februar 2005 sendi Vinnumálaráðið út rundskriv um KT-trygd. Treytirnar í rundskrivinum skuldu vera loknar fyri 1. februar 2006.

Almannastovan er eisini fevnd av krøvunum í § 31, stk. 3, í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum og kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.

Í juni 2006 boðaði almannastjórin frá, at Almannastovan hevði orðað ein KT-trygdarpolitikk fyri stovnin, sum tó ikki var settur í verk, tí tað var ov kostnaðarmikið. (Í november 2006 fekk Landsgrannskoðanin útflýggjað ásetingar um KT-stevnumið/KT-politikk, og KT-trygdarpolitikk, sum Almannastovan hevði orðað liðugt í oktober 2006).

Almannastovan søkti í mars 2006 við áminningarskrivi í apríl 2006 Dátueftirlitið um loyvi at "útseta" nøkur av teimum "tungu økjunum".

Sambært skrivinum søkti Almannastovan Dátueftirlitið um:

1. at leingja tillagingartíðina til 31. august 2006 fyri tey tiltøk, sum hildið verður kunnu gerast beinanvegin, og
2. at onnur tiltøk, sum krevja stórar skipanarligar umleggingar og eru kostnaðarmiklar, verða tikin við í menningina av nýggju KT-skipanini.

Í september 2007 hevði Dátueftirlitið ikki svarað skrivinum.

Um at skjalfesta skipan og mannagongdir

Í juli 2000 mæltu vit til sum skjótast at greina krøvini til at skjalfesta skipanina og mannagongdirnar á Almannastovuni, at savna og skipa skjalfestingina, og at gera reglur fyri at varðveita og dagføra hana. Sum nevnt, eru í dag alsamt fleiri krøv til KT-trygd, eisini til skipaðar skjalfestingar.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki nakra skipanarskjalfesting, sum lýsir, hvussu skipanirnar virka, hvussu dátastreymar eru o.s.fr.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tær flestu KT-skipanirnar á Almannastovuni eru skjalfestar, men skjalfestan av øllum virksemi í skipanunum finst ikki savnað. At gera hetta arbeiði er kostnaðarmikið (um 300 t.kr.) .

Í november 2006 og aftur í september 2007 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at einki er hent viðvíkjandi skipanardokumentatión. Sambært landsstýrismanninum er arbeiðið ov kostnaðarmikið, serstakliga tá hugsað verður um, at arbeitt verður við at menna eina nýggja skipan.

Førleiki á KT-deildini

Í juli 2000 mæltu vit til, at hóskandi útbúgving varð bjóðað starvsfólkunum á KT-deildini, serliga til at umsita brúkarar og at logga. Einki er ásett um, hvønn førleika KT-starvsfólk á Almannastovuni skulu hava.

Í desember 2004 svaraði landsstýrismaðurin, at starvsfólk á Almannastovuni tóku skeið í KT-trygd og persónsupplýsingalógini, umframt at arbeitt varð við serligari útbúgvingarætlan fyri KT-økið.

Í februar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at starvsfólk á KT-deildini høvdu í 2005 fingið neyðuga útbúgving í at umsita brúkarar og at "logga" nýtsluna av kervinum.

Landsstýrismaðurin boðaði eisini frá, at formlig lýsing av teimum førleikakrøvum, sum ein deild eigur at hava, varð gjørd fyri 2006-2007. Í tí sambandi varð gjørt eitt yvirlit yvir ta eftirútbúgving, sum starvsfólkini á deildini skuldu hava. Talan er m.a. um skeið og eftirútbúgving í KT-trygd og persónsupplýsingarlógini, og í umsiting av fakskipanum, dátugrunnum, heimasíðu/intraneti o.a.

Landsgrannskoðanin skal í hesum sambandi viðmerkja, at Almannastovan er sera nógv merkt av stórari starvsfólkaútskifting á KT-deildini, og nógvir leiðarar hava verið á deildini. Almannastovan hevur roynt at leggja KT- og fíggjardeildina saman, men tað hevur víst seg at vera ov tungt, og deildirnar eru síðani skildar sundur aftur í sjálvstøðugar eindir.

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at 1. mars 2007 varð nýggjur leiðari settur. Viðkomandi er útbúgvin cand.merc.dat og hevur síðan 1998 arbeitt í KommuneData í Danmark innan KT-menning og verkætlanarleiðslu.

Broytingarmannagongd

Í juli 2000 mæltu vit til at gera reglur fyri, hvussu farast skuldi fram, vórðu broytingar gjørdar í skipanini. Reglurnar skuldu tryggja, at broytingar fóru fram undir skipaðum viðurskiftum, at skjalfesting varð útvegað, og at krøv vórðu sett til skjalfestingina.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki formligar mannagongdir fyri at stýra broytingum.

Í desember 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at farast skuldi sum skjótast undir at gera reglur um mannagongdir, í sambandi við at broytingar skuldu verða gjørdar í skipanum og skráum.

Í november 2006 boðaði Almannastovan frá, at arbeiðið var í gongd, og fór væntandi at verða liðugt í 2007.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í sambandi við arbeiðið, ið varð sett í verk í mars 2007, eru fleiri av hesum mannagongdum gjørdar, og miðað verður fram ímóti at fáa hetta arbeiði liðugt í 2007.

Fysisk trygd/neyðætlan

Í juli 2000 mæltu vit til fyribyrgjandi tiltøk í maskinrúminum og til eina neyðætlan.

Í mars 2005 svaraði Almannastovan, at ein rakstrarsáttmáli var gjørdur við P/f Elektron um at hýsa servarunum hjá Almannastovuni og um rakstraruppgávur í hesum sambandi.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki tryggjað, at skipanir kunnu verða endurskapaðar frá trygdaravritum.

Í februar 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at sambært rakstrarsáttmálanum við P/f Elektron skuldu avtalur verið gjørdar um hesi viðurskifti. Almannastovan hevur og fer at hava regluligar fundir við P/f Elektron m.a. um at fáa skipað eina neyðtænastu. Í hesum sambandi skal eitt "testumhvørvi" verða sett upp, har royndir kunnu verða gjørdar at endurskapa dátur út frá trygdaravritum.

Í november 2006 boðaði Almannastovan frá, at teimum kunnugt hevði P/f Elektron ikki roynt at endurskapa dátur út frá trygdaravritum.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannastovan hevur verið í samband við Elektron viðvíkjandi trygdaravritum og endurskapan av skipanunum hjá Almannastovuni. Elektron hevur boðað frá, at trygdaravrit verða tikin hvønn dag. Elektron hevur somuleiðis váttað, at eydnaðar royndir við at endurskapa trygdaravritini eru gjørdar.

Um eftirlit og reglur um at logga

Í juli 2000 mæltu vit til at bøta um eftirlitið við feilum og misnýtslu, herímillum at lýsa møguleikar at logga og at áseta reglur fyri at logga.

Sambært § 14, stk. 2, í K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum" skal verða skrásett, um nakar óheimilaður roynir at nýta upplýsingarkervið.

Í juli 2006 fingu vit eftir áheitan dømi um, hvat varð loggað tveir ávísar dagar, og dømi um ein "benyttelseslog" frá einari viku í 2006, sum vísir, hvat eitt starvsfólk hevur gjørt í VFS-skipanini ein ávísan dag.

Almannastovan brúkar ikki logglistarnar í dagliga arbeiðinum, men við støði í loggaðum upplýsingum verður hvønn dag ein dagslisti skrivaður út fyri hvørt økið hjá Almannastovuni.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki nakran politikk fyri, hvat skal verða loggað, nær skrivað kann verða yvir, og hvussu loggar skulu varðveitast. Tað eru loggar í Windows, VFS-skipanini, ScanJour, HP3000 umframt loggar í brandmúrum og routarum. Trygdarkunngerðin ásetir, at góðkend og ikki góðkend nýtsla av skipanum skal verða loggað, og at loggar skulu varðveitast í 1 ár.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan hevur ikki nakran politikk fyri, hvussu loggar skulu verða varðveittir, men loggar í skipanini

skulu varðveitast í minst 1 ár. Almannastovan fer í næstum – saman við Elektron – at viðgera henda spurning.

Brúkararættindi

Í juli 2000 mæltu vit til at gera greiðar reglur fyri, hvussu brúkararættindi skulu verða umsitin.

Sambært váðametingini frá september 2005 hevur Almannastovan ikki skrivligar mannagongdir, sum áseta, at rættindi skulu verða dagførd ella strikað, tá starvsfólk skifta virkisøki ella fara úr starvi.

Í desember 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at sum skjótast skuldi verða farið undir at gera reglur um mannagongdir fyri at áseta brúkararættindi.

Í juni 2006 boðaði Almannastovan frá, at skrivligar reglur ikki enn eru gjørdar, um og hvussu brúkararættindi skulu verða umsitin. Avvarðandi deildarleiðari boðar skrivliga Vitanardeildini frá, hvørji rættindi nýggj starvsfólk skulu hava, tá tey verða sett í starv.

Tá ið fólk fara úr starvi, er eingin formlig mannagongd sett í verk, sum tryggjar, at brúkararættindi verða strikað. Av og á verður ruddað upp í skipanunum, og tá verða brúkararættindi strikað hjá starvsfólki, sum eru farin úr starvi. Almannastovan brúkar ikki og hevur ongan kekklista, tá starvsfólk fara úr starvi. Vit hava víst á eitt dømi um ein tílíkan kekklista, sum er á heimasíðuni hjá Føroya Gjaldstovu.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannastovan hevur nú formliga mannagongd viðvíkjandi brúkararættindum, har avvarðandi deildarleiðari hevur ábyrgd av at boða Vitanardeildini frá, tá starvsfólk verða sett, ella fara úr starvi. Henda fráboðan verður gjørd skrivliga, og eisini ein kekklisti verður brúktur. Brúkararættindini verða stýrd við "profilum", ið lýsa tey rættindi, sum t.d. ein málsviðgeri ella ein sosialráðgevi skulu hava. Hesir profilar verða endurskoðaðir í sambandi við møguligar broytingar innan arbeiðsøkir ella arbeiðsgongdir á Almannastovuni.

Funktiónsskilnaður

Framvegis er tað so, at skilnaður er ikki í VFS-skipanini millum tey, sum skráseta, og tey, sum vátta, og skilnaður er framvegis ikki millum deildir í VFS-skipanini.

Í juli 2006 boðaði Almannastovan frá, at møguleiki er í VFS-skipanini at gera skilnað millum skráseting og váttan, men tað krevur broytingar í skipanini, og er ikki sett í verk, tí tað er ov kostnaðarmikið.

Í desember 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannastovan hevur ikki hildið tað vera neyðugt at hava funktiónsskilnað millum deildir, tí tað ger Almannastovuna meira fleksibla og betur føra fyri at røkja sína skyldur. Almannastovan fer at áseta greiðar reglur á hesum øki og taka støðu til, um funktiónsskilnaður skal verða gjørdur.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at í juni 2006 er broyting gjørd í VFS-skipanini soleiðis, at funktiónsskilnaður er millum tey, sum skráseta, og tey, sum vátta. Henda loysn er royndarkoyrd og verður væntandi tikin í nýtslu 1. oktober 2007.

VI. EFTIRLITSVIRKSEMI VIÐ ÚTGJALDINGUM

Roknskaparreglugerð fyri almannapensjónir, forsorgarveitingar o.a.

Í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum 1. februar 2001 um roknskaparreglugerðir er ásett, at innaneftirlitið á roknskaparøkinum á einum stovni skal vera skjalfest í einari roknskaparreglugerð.

Vit hava fingið avrit av roknskaparreglugerðini fyri almannapensjónir, forsorgarveitingar o.a. Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd og ikki dagfest.

Í november 2006 boðaði Almannastovan frá, at hon arbeiddi framvegis við at gera roknskaparreglugerðina lidna, og fór hon síðani at verða send Almanna- og Heilsumálaráðnum at góðkenna.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin væntandi verður liðug í 2007, og tá fer Almannastovan at senda hana til Almanna- og Heilsumálaráðið at góðkenna.

VII. NIÐURSTØÐA

Í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar hava vit í mong ár skrivað um KT-viðurskiftini á Almannastovuni og um VFS-skipanina. Samanumtikið halda vit, at bøtt er um viðurskiftini á summum økjum, men á týðandi økjum eru framvegis ikki framdar nøktandi ábøtur samsvarandi tilmælum okkara og ikki minst samsvarandi teimum herdu krøvunum á økinum.

Týðandi partar av KT-kervinum á Almannastovuni lúka ikki allar ásetingar í:

- roknskaparrundskrivinum, serliga í pkt. 8 og 10,
- § 31, stk. 3, í Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 “um viðgerð av persónsupplýsingum”,
- § 16 í K. nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum”,
- rundskrivinum um KT-trygd frá Vinnumálaráðnum 22. desember 2004, ið ásetir, at krøvini í trygdarstandardunum ISO 17799 og BS 7799-2 skulu verða lokin í seinasta lagi 1. februar 2006.

Sum víst á, hevur Landsgrannskoðanin á hvørjum ári, síðani VFS-skipanin varð tikin í nýtslu í 2000, gjørt vart við fleiri av trupulleikunum. Bøtt er heldur ikki um teir veikleikar í KT-trygdini, sum víst varð á í váðameting, sum eitt grannskoðarafelag gjørdi í september 2005 av KT-kervinum.

Tá havt verður í huga støddina á KT-kervinum á Almannastovuni, hvussu nógvur peningur fer um KT-skipanirnar, hvussu nógvar persónsupplýsingar KT-kervið rúmar, og hvussu heftur stovnurin er at kunningartøkni, er KT-trygdin ikki nøktandi, og langt er eftir á mál.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin víst á, at Almannastovan í sínum forarbeiði til nýggju KT-skipanina hevur tikið hædd fyri øllum viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini og um KT-trygd annars.

8.2 KT-trygd innan Nærverkið (GL 2004/2 07 4-16)

Í juni 2006 fekk Landsgrannskoðanin avrit av einari váðameting frá januar 2005, sum eitt grannskoðaravirkið hevði gjørt fyri Nærverkið (Heimarøktina og Serforsorgina). Váðametingin varð gjørd við atliti at ásetingunum í K. nr. 28/2003 “um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum”. Endamálið var at eyðmerkja, hvørji sløg av persónsupplýsingum Nærverkið viðger, og hvussu trygdin er skipað.

Sambært váðametingini vóru staðfestir nakrir veikleikar í KT-trygdini, sum hava við sær ein øktan váða fyri persónsupplýsingum:

1. Fysiskar skjalagoymslur eru ikki læstar á øllum stovnum.
2. Upplýsingar, ið eru lagdar á ambætara, liggja óneyðugt á lokalum teldum.
3. Starvsfólk nýta í stóran mun felags loyniorð ella siga sítt loyniorð til onnur.
4. Summir stovnar lata búfólk nýta teldu. Ongar reglur eru fyri slíkari nýtslu.

5. Summir stovnar senda viðkvæmar persónsupplýsingar við telduposti. Ongar reglur eru fyri slíkum.
6. KT-trygdin eigur at verða samskipað (nógvir tænastuveitarar).
7. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru ikki nøktandi tryggjaðar í sambandi við visitatiónsskipan í gerð.
8. Lønarupplýsingar verða sendar við telduposti uttan bronglan.
9. Hóskandi skilnaður er ikki ímillum eindir á netinum hjá Nærverkinum og aðrar "kundar" hjá Landsapotekaranum.
10. Antivirusverjan á lokalum teldum er ikki nøktandi.
11. Trygdaravrit verða ikki testað, einki er avtalað hesum viðvíkjandi.
12. Ein veitari hevur ikki hert trygdina í Windows sambært viðurkendum kekklistum.
13. Einki eftirlit er við, hvørt ein veitari hevur eitt nøktandi støði í logisku trygdini.
14. Stýrisskipanir á lokalum teldum eiga at verða uppstigaðar, so allar kunnu limast inn í domenið.
15. Umsitingin av lyklum, til at brongla tráðleysu netsambondini, er ikki løgd í fasta legu.
16. Trygdin í tráðleysu netsambondunum verður ikki testað, og eingin manna-gongd er fyri trygdini.
17. Raksturin av tráðleysu netsambondunum er í stóran mun knýttur at einum ávísum persóni.
18. Útgerðin hjá Nærverkinum og hjá Landsapotekaranum er ikki liðugt uppsett. Skápið kann ikki latast aftur.
19. Internettrygdin er ikki testað av uttanveltaðum, og ongar ásetingar eru um at fremja slíkar testir.
20. Tað er ikki gjørd skrivlig avtala um samstarvið millum Nærverkið og Landsapotekaran.
21. Einki eftirlit er við, hvørt Landsapotekarin hevur eitt nøktandi trygdarstøði.

Í februar 2005 kunnaði leiðslan á Nærverkinum um, at váðametingin *"fór at verða viðgjørd í vár við atliti at teimum viðurskiftum, sum eru nevnd í metingini, og fyri at skipa arbeiðið viðvíkjandi trygdarkrøvunum eftir einum miðvísum leisti."*

Í juni 2006 og aftur í november 2006 boðaði leiðslan frá, at váðametingin enn ikki var viðgjørd.

Í august 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at einki er hent í málinum. Landsstýrismaðurin hevur eisini kunnað um, at Nærverkið hevur sett KT-leiðara frá 1. september 2007. Sambært landsstýrismanninum verða trygdarviðurskiftini ein av høvuðsuppgávunum hjá KT-leiðaranum, og arbeiðið við at menna KT-trygdina fer at verða raðfest frammalaga.

8.3 Almannastovan (GL 2004/2 07 1-5)

Í 2004 kannaðu vit, um roknskaparviðurskiftini á Almannastovuni vóru í tráð við ásetingarnar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um roknskaparreglugerðir. Samanumtikið hildu vit roknskaparhaldið vera væl skipað, men vit vístu á, at:

1. nøkur ferðaforskot vóru ikki goldin aftur rættstundis,

2. skuldarar, vegna ov nógv goldið út ella goldið út av órøttum – um 2,6 mió.kr. - vóru ikki minkaðir (Almannastovan heitir á skuldarar um at gera eina afturgjaldsskipan, og sendir rykkjarar umleið triðja hvønn mánað),
3. ognaryvirlitið var ikki dagført.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at:

1. *tað eru 4 gamlar eftirstøður. Avtala er gjørd viðvíkjandi trimum, og viðvíkjandi tí fjórðu verður umhugsað, um tað loysir seg fíggjarliga at senda hana til innheintingar.*
2. *skuldin er komin niður á 2,1 mió.kr. – tað merkir, at skuldin er minkað við um 0,5 mió.kr.*
3. *vegna umvælingar og flytan av hølum o.a. er gjørt av at gera eitt nýtt ognaryvirlit fyri allan stovnin.*

Roknskapardeildin á Almannastovuni umsitur lønarútgjaldingarnar til starvsfólkini á Almannastovuni og á Hjálpartólamiðstøðini, um 100 fólk. Harafturat umsitur roknskapardeildin eisini lønarútgjaldingarnar til einar 130 stuðlar, ið brektoymið og barnaforsorgartoymið hava játtað. Vit mæltu í 2004 til at lýsa í roknskaparreglugerðini, hvør kann:

- seta fólk í starv/loysa fólk úr starvi, áseta lønarflokk, flyta í hægri lønarflokk, geva lønarískoyti o.t.,
- áleggja yvirtíðararbeiði/meirarbeiði og tænastuferðir,
- góðkenna lønarútgjaldingarnar, arbeiðstíð, frítíð, sjúku, avspáking og møguligar lønarfrádráttir.

Í juli 2004 boðaði Almannastovan frá, at tey ætlaðu at fremja tær ábøtur, vit høvdu mælt til.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at øll orka er nýtt til at gera roknskaparreglugerðina til lógarbundnar veitingar, sum væntandi verður liðug í 2007. Tá hetta arbeiðið er liðugt, verður farið undir at gera neyðugu tillagingarnar í roknskaparreglugerðini fyri Almannastovuni.

8.4 Barnapeningur veittur í forskoti (GL 2000/2 07 2-5)

Vit hava síðani februar 2002 í frágreiðingum greitt frá, at á fleiri økjum er tørvur á at bøta um viðurskiftini. M.a. hava vit vístá:

Barnapeningur verður ikki heintaður inn uttan fyri Norðurlond

Barnapeningur verður ikki heintaður inn uttan fyri Norðurlond, hóast tað sambært konventiónum kann lata seg gera.

Í november 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstova Føroya ikki longur heintar pening inn uttan fyri Norðurlond, av tí at upplýsingarnar um persónarnar eru ikki nøktandi. Í nógvum førum finst bert navnið á persóninum, landinum ella býnum. Toll- og Skattstovan heldur tað ikki vera gjørligt, og hartil at vera ov kostnaðarmikið at heinta henda pening inn.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Toll- og Skattstovu Føroya framvegis heldur tað vera ógjørligt og ov kostnaðarmikið at heinta pening inn uttan fyri Norðurlond viðvíkjandi teimum gomlu krøvunum, tá skjalfestingin hevur verið ófullfíggjað.

Hinvegin er skjalfestingin viðvíkjandi teimum nýggju krøvunum í lagi, og støðan øðrvísi.

Barnapeningur er ongantíð eftirgivin

Barnapeningur er ongantíð eftirgivin, og fylgt verður ikki við, um krøv fyrnast. Í november 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað tá vóru umleið 400 krøv, sum Almannastovan skuldi taka støðu til, um skuldin skuldi verða eftirgivin. Í flestu førum vóru krøvini fyrnað, gjaldskyldugi var deyður ella komin til pensjónsaldur, og Almannastovan hevði ikki havt orku til at avgreiða tey. Ætlanin var at fáa málini avgreidd fyrst í 2006.

Í august 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at leisturin var gjørdur, men Almannastovan hevði ikki havt orku til at taka støðu til hesi mál.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannastovan og Toll- og Skattstovu Føroya eru vorðin samd um, hvar ábyrgdarbýtið eigur at liggja, og øll krøvini eru send aftur til Toll- og Skattstovu Føroya.

Sambært ábyrgdarbýtinum er tað Toll- og Skattstovu Føroya, ið fylgir við fyrningini í krøvunum. Sambært § 13 í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." skal Almannastovan taka støðu til eftirgeving av skuld.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at higartil í 2007 hevur Almannastovan tikið støðu til 7 umsóknir um eftirgeving av skuld; 4 er ikki gingnar á møti, 2 eru játtaðar og ein partvís játtað. Tilsamans er eftirgivið fyri um 15 t.kr.

8.5 Almannapensjónir (GL 2004/2 07 2-8)

Landsgrannskoðanin hevur í 2007 kunnað seg gjøllari um umsitingina av almannapensjón sambært lógarbroytingunum frá 22. desember 2005 í almannapensjónslógini.

Ásetan av pensjónum

Í § 21, stk.1, í almannapensjónlógini er ásett:

> *"Pensjónir verða ásettar hvønn 1. januar við gildi fyri eitt álmanakkaár eftir inntøkugrundarlagnum sambært § 20".*

Í juni 2006 kunnaði Almannastovan um, at stovnurin var við at fyrireika at um- og eftirrokna eftir nýggju reglunum. Eftir gomlu reglunum, vóru inntøkuupplýsingar úr skattaskipanini hjá Toll- og Skattstovu Føroya fluttar yvir í VFS-skipanina 1. juli og 1. oktober. Eftir nýggju reglunum fóru inntøkuupplýsingarnar fyrstu ferð at verða fluttar yvir í VFS-skipanina 1. november 2006, og umrokningin at fara fram fyrstu ferð eftir nýggju reglunum í januar 2007.

Pensjónirnar frá 1. januar 2007 eru ásettar sambært inntøkunum fyri 2005. Um pensjónistar ikki hava boðað frá broyttu inntøku síni 2005, fær inntøkubroytingin ávirkan á pensjónsupphæddina fyri 2007.

Eftirrokning

Sambært § 21a er talan um tvær ymiskar eftirrokningar:

1. Umroknaðar pensjónir vegna inntøkubroytingar verða eftirroknaðar eftir skattskyldugu inntøkuni, tá inntøkan viðkomandi álmanakkaár er endaliga uppgjørd av skattamyndugleikunum. Pensjónin verður eftirroknað fyri eitt heilt álmanakkaár.
2. Nýggjar pensjónir verða eftirroknaðar eftir skattskyldugu inntøkuni, tá inntøkan viðkomandi álmanakkaár er endaliga uppgjørd av skattamyndugleikunum. Pensjónin verður eftirroknað fyri tíðarskeiðið aftaná tillutan og árið út.

Vit kannaðu 12 mál, har inntøkur vórðu broyttar í 2006. Talan var um tilvildarliga vald mál. Tó eru málini vald út soleiðis, at tey fevna um ymiskar málsviðgerar. Vit kannaðu:

- hvør málsviðgerð var farin fram,
- hvussu málsviðgerðin var skjalprógvað, og
- um mettu inntøkuuplýsingar hjá Almananstovuni og inntøkuupplýsingar frá fyribilsskattaskránni vóru rætt samanbornar.

Vit høvdu einki at finnast at.

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Í frágreiðing okkara til landsstýrismannin í juli 2000 gjørdu vit vart við, at í fleiri førum er ógreitt, hvussu ásetingarnar í §§ 21-23 í almannapensjónslógini skulu verða tulkaðar, og er tað serliga § 21, ið hevur sera stóran umsitingarligan og fíggjarligan týdning fyri pensjónistin. Mong ivamál vóru viðvíkjandi umrokning, eftirrokning og uppgerðum av krøvum um ov nógv útgoldna pensjón.

Landsgrannskoðanin hevur síðani á hvørjum ári heitt á landsstýrismannin um at boða frá, hvørji stig hann fer at taka fyri at fáa viðurskiftini í rættlag. Kærustovnurin og Almannastovan hava heitt á Almanna- og Heilsumálaráðið um at broyta almannapensjónslógina, soleiðis at reglurnar fyri um- og eftirrokning verða eintýddar.

Ásannast má, at í fleiri ár er ov nógv orka verið "spilt burtur" til kæruviðgerðir í Kærunevndini og á Almannastovuni í sambandi við t.d. tulkingar/umsiting av § 21-23 í almannapensjónslógini.

Í desember 2005 vísti landsstýrismaðurin á, at broytingarnar í almannapensjónslógini, sum vórðu samtyktar 19. desember 2005, fara at avmarka ella "minka um" mongu ivamálini, sum hava verið viðvíkjandi pensjónsáseting og um– og eftirrokning, og at umsitingin væntandi verður greiðari og meira gjøgnumskygd.

Eftir at vit í 2007 hava kunnað okkum um ásetan á pensjónunum fyri 2007 og eftirrokning fyri 2006 tykjast flestu ivamálini at verða beind av vegnum. Kærunevndin í almannamálum hevur í 2007 í fleiri avgerðum staðfest avgerðir hjá Almannastovuni.

8.6 Persónlig viðbót til pensjónistar (GL 2004/2 07 2-8)

Sambært § 12 í almannapensjónslógini kann persónlig viðbót verða veitt pensjónistum, ið hava serliga trupul kor.

Í K. nr. 19 frá 14. mai 2004 "um persónliga viðbót sambært almannapensjónslógini" ásetti landsstýrismaðurin neyvari reglur.

Sambært § 4, stk. 2, í K. nr. 19/2004 *"verður sum nøktandi upphædd til útreiðslur til mat, klæði og tílíkt nýtt ein grundupphædd, ið svarar til grundupphæddina til fólkapensjón."*

Grundupphæddin til fólkapensjón verður ikki javnað, sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum" við seinni broytingum. Upphæddin til uppihaldsútreiðslur er sostatt ikki hækkað síðani 1. februar 1999, og hevur tí ikki fylgt við prísvøkstrinum.

Í februar 2005 spurdu vit landsstýrismannin, um henda avleiðing var tilætlað.

Í mars 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at javning av grundupphæddini kundi verið ein partur av einari samlaðari endurskoðan av almannapensjónslógini, men at sjøtul ikki enn var settur á fyrireikingararbeiðið at endurskoða almannapensjónslógina.

Í september 2006 og aftur í august 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann hevur ongar ætlanir um at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um at javna grundupphæddina til fólkapensjónistar, fyrr enn arbeiðið hjá Fíggjarmálaráðnum og Almanna- og Heilsumálaráðnum við eftirlønarreforminum er liðugt viðgjørt.

8.7 Ansingarsamsýning (GL 2002/2 07 3-7)

Í viðmerkingunum til Ll. nr. 52/2000 "um broyting í løgtingslóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima", sum varð løgd fyri Løgtingið 4. mars 2000, varð Løgtingið kunnað um, at *"landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ætlar at endurskoða lógina í síni heild seinni í ár, so møguligar lógarbroytingar fáa gildi frá ár 2001."*

Fleiri ferðir síðani, seinast í september 2007, hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at endurskoðanin av lógini um ansingarsamsýning liggur ikki fremst í raðfestingini av uppgávum í Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Í áliti sínum til uppskotið til løgtingsfíggjarlógina 2007 heldur Fíggjarnevndin, "*at landsstýrismaðurin átti at arbeitt við at styrkt hesa skipan.*"

Eftir svarunum frá landsstýrismannin at døma hevur hann ongar ætlanir um at endurskoða lógina um ansingarsamsýning.

8.8 Forsorgarútreiðslur (GL 2006/2 07 3-11)

Veitingarstøðið sambært §§ 9 og 13

Sambært § 9 í forsorgarlógini kann fyribilshjálp vanliga í mesta lagi svara til grundupphæddina í fólkapensjónini.

Sambært § 13 verður varandi hjálp veitt við einari upphædd, ið svarar til fólkapensjónina (grundupphædd og viðbót) hjá pensjónisti uttan aðrar inntøkur.

Í báðum førum verður ískoytið veitt fyri hvørt barn, svarandi til barnaviðbótina eftir løgtingslóg um almannapensjónir.

Grundupphæddin til fólkapensjón verður ikki javnað, sambært Ll. nr. 107 frá 22. desember 1999 "um áseting og javning av almannaveitingum" við seinni broytingum. Grundupphæddin í uppihaldshjálpini sambært § 9 og varandi veitingin sambært § 13 eru sostatt ikki hækkaðar síðani 1. februar 1999, og hava tí ikki fylgt við prísvøkstrinum.

Í februar 2005 spurdu vit landsstýrismannin, um henda avleiðing var tilætlað. Vit vístu eisini á, at í svari sínum 26. januar 2005 til fyrispurning "viðvíkjandi skiftisupphædd hjá fyritíðarpensjónistum, javning og øðrum" - Lm. 100-17/2004 - hevði landsstýrismaðurin m.a. sagt:

> *"At uppihaldshjálpin ikki verður javnað, og ikki hevur verið tað seinastu árini, er sera óheppið, og rættast hevði verið at javnað upphæddirnar sambært einum javningarsatsi. Hetta kundi verið gjørt, uttan at bíðast skal eftir einari endurskoðan av allari pensjónslóggávuni. Arbeiðið at gera eina nýggja forsorgarlóg er farið í gongd. Í tí sambandi er ætlanin at broyta § 9 í forsorgarlógini í komandi ári."*

Í desember 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at av tí at grundupphæddin til fólkapensjón ikki verður javnað longur, er tað neyvan rætt framhaldandi at nýta hana til at áseta eina upphædd, ið skal nøkta grundleggjandi tørvin til uppihald sambært forsorgarlógini – livikostnaðurin stendur ikki í stað. Landsstýrismaðurin umhugsaði tí at broyta lógina.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tað framvegis var ætlanin at fremja lógarbroytingina í § 9, men sambært landsstýrismanninum var tað ógreitt, nær

arbeiðsorka varð tøk, og tí var tað óvist, nær eitt lógaruppskot fór at verða lagt fyri Løgtingið.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at einki er hent í málinum.

Endurgjald fyri inntøkumiss/vantandi kunngerð sambært § 17

Ásetingarnar í § 17 komu upprunaliga inn í forsorgarlógina sum § 14 A við "Lov nr. 224 af 17. maj 1970":

> *"Personer, der i hjemmet forsørger et barn med en fysisk eller psykisk lidelse, som medfører særlige udgifter ved forsørgelsen, har ret til at få dækket sådanne nødvendige merudgifter, såfremt de ikke kan dækkes gennem særforsorgens hjælpeforanstaltninger. Hjælpen er betinget af, at lægelige anvisninger med hensyn til barnets pasning m.v. følges."*

Við "Lov nr. 246 af 8. juni 1983" varð § 14 A flutt til § 17.

Longu í 1993 gjørdu vit vart við ivasomu heimildina í § 17 at veita endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til persónar, sum heima passa barn við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku.

Ikki fyrr enn við Ll. nr. 82 frá 8. mai 2003 "um broyting í lóg um almenna forsorg" varð heimildin lógarfest:

> *"Stk. 3. Stuðul kann verða veittur sum endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til persónar, sum heima uppihalda barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku. Stuðulin er treytaður av, at tað er ein avleiðing av sjúkuni ella brekinum, at tað er neyðugt at ansa barninum heima."*

Samstundis varð heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur um útreiðslur til ávísar viðgerðir og um endurgjald fyri inntøkumiss. Landsstýrismaðurin hevur ongar reglur ásett enn.

Í november 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann "*í næstum*" fór at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta veitingina sambært § 17 frá einari nettoveiting til eina bruttoveiting. Sambært landsstýrismanninum fór ein tílík broyting at hava við sær, at trupulleikarnir við at rokna út nettoendurgjaldið fyri mista arbeiðsinntøku fóru at verða loystir. Eitt slíkt lógaruppskot er ikki lagt fyri Løgtingið, og lógin er ikki broytt.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003), sum varð samtykt 18. mai 2004, heitti Løgtingið á landsstýrismannin um at áseta neyvari reglur sum skjótast.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 og aftur í mars 2005 umrøddi Landsgrannskoðanin, at útrokningin av mistari arbeiðsinntøku tyktist tilvildarlig, og vit vístu á dømi.

Vit vístu eisini á, at hóast Kærunevndin í fleiri førum hevði tikið avgerðir, sum greitt settu til viks siðvenju hjá Almannastovuni í málum viðvíkjandi endurgjaldi fyri inntøkumiss, hevði Almannastovan ikki broytt siðvenju í líknandi málum. At kunngerðin ikki var gjørd, var helst ein orsøk til trupulleikarnar.

Í juni 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at við verandi arbeiðsorku var tað óvist, nær kunngerðin fór at verða gjørd, og at aðrar uppgávur vórðu raðfestar hægri.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann framvegis hevur ætlanir um at broyta veitingina fyri inntøkumiss sbrt. § 17 frá at vera eina nettoveiting til eina bruttoveiting. Ein tílik broyting er tó treytað av, at broytingar samstundis verða gjørdar í skattalóggávuni.

Landsstýrismaðurin boðar eisini frá, at hann ætlar at fáa ásett reglur um inntøkumiss í kunngerð, men av vantandi arbeiðsorku er óvist, nær hesar uppgávur verða loystar.

Kirkjuskattur

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 umrøddu vit, at kirkjuskattur verður ikki tikin við í útrokningina, tá ið netto dagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið sambært § 9 verður roknað út. Í frágreiðing í februar 2002 umrøddu vit, at kirkjuskattur verður heldur ikki tikin við í útrokningina av nettoendurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 17.

Í oktober 2002 svaraði landsstýrismaðurin, at hann fór at taka stig til at broyta vegleiðingina, ið ásetir útrokningarháttin, soleiðis at kirkjuskattur fór at verða tikin við í útrokningina frá 1. januar 2003.

Í mars 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki var hent í málinum.

Í november 2004 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevði ætlanir um at endurskoða alla forsorgarlógina, og fór hetta arbeiði at verða gjørt í stigum. Ætlanin var at broyta allar forsorgarveitingar til bruttoveitingar. Harvið fór trupulleikin, at kirkjuskatturin ikki var við í útrokningini, at verða loystur. Landsstýrismaðurin hevði tí ongar ætlanir um at gera nakra broyting í útrokningini av hámørkunum.

Fleiri ferðir síðani, seinast í september 2007, hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at einki er hent í málinum.

Hjálparamboð v.m. § 18, stk. 5, í forsorgarlógini

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina september 2003 og eykajáttanarlógina desember 2003 varð Løgtingið kunnað um, at Almannamálaráðið arbeiddi við at gera kunngerðir um stuðul til:

- heilivág,
- avlamisbilar, og
- hoyri- og sjóntól.

Í november 2004 væntaði landsstýrismaðurin, at kunngerðirnar fóru at verða lidnar í 2005.

22. juni 2005 varð kunngerð nr. 91 “um stuðul til keyp av avlamisbili sambært forsorgarlógini” lýst. Eingin kunngerð um hoyri- og sjóntól er lýst, og kunngerðin um heilivág er ikki broytt.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 varð Løgtingið aftur kunnað um, at:

> *“Landsstýrismaðurin arbeiðir við at áseta nærri reglur í nýggjari kunngerð um hoyritól við heimild í § 18, stk. 6 í forsorgarlógini. Við kunngerðini verður talan um neyvari reglur fyri hoyritólavirksemið.”*

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann arbeiðir við at orða kunngerð um hoyritól, men óvist er, nær arbeiðsorka verður tøk til at orða nýggja kunngerð um hjálpartól og at broyta kunngerð um heilivág.

Í skrivi til Trivnaðarnevndini í oktober 2007, í sambandi við fíggjarlógaruppskotið 2008, hevur landsstýrismaðurin m.a. boðað frá, at “*landsstýrismaðurin arbeiðir við einum uppskoti til kunngerð um hoyritól, sum millum annað hevur tað endamál, at avgerð og játtan koma at liggja á sama stað. Miðað verður ímóti at fáa kunngerðina í gildi 1. januar 2008.*”

Kontering av forsorgarveitingum

Vit hava til fánýtis síðani 1993 víst á, at konteringarnar eru alt ov tilvildarligar, helst tí at eingin konteringarleiðbeining finst. Hóast fleiri ætlanir, er einki hent.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003), ið varð samtykt 18. mai 2004, heittu løgtingsgrannskoðararnir á landsstýrismannin um at tryggja, at viðurskiftini komu í rættlag sum skjótast.

Landsstýrismaðurin hevur í áravís boðað frá, at konteringarleiðbeiningin væntandi fór at verða liðug innan stutta tíð.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at vegna vantandi arbeiðsorku er konteringarleiðbeiningin ikki liðug enn, men verður væntandi liðug primo 2008.

8.9 Endurbúgvingarútreiðslar (GL 2006/2 07 3-11)

Landsgrannskoðanin hevur í 2007 grannskoðað endurbúgvingarmál á Arbeiðsmarknaðardeildini á Almannastovuni í Tórshavn.

Val av málum

Við støði í einum lista úr VFS-skipanini hjá Almannastovuni yvir útgoldnar veitingar í 2006 eftir forsorgarlógini, vórðu 22 mál tikin út til neyvari kanningar. Talan er um tilvildarliga vald mál. Tó eru málini vald út soleiðis, at tey fevna um ymisk sløg av veitingum og ymiskar málsviðgerar. Harumframt hava vit eisini hugt eftir málum, har samlaða veitingin er stór.

Gjøgnumgongd av málsviðgerð

Vit hava kannað:

- um mannagongd og málsviðgerð er hóskandi og trygg.
- um eitt fullfíggjað journaluppritsblað finst, har greitt verður frá gongdini í málinum o.a.
- um dokumentatiónin er í lagi, t.v.s. at rætt útfylt umsóknarblað finst o.a.

Vit hava einki at finnast at málsviðgerðini, men vit hava víst á nøkur ivamál, ið knýta seg at tulkingini av lógini/væntandi kunngerð.

Vard størv o.a.

Sambært leiðbeining nr. 1 frá Almanna- og Heilsumálaráðnum 1. mai 2002 “um vard størv” kann Almannastovan endurrinda arbeiðsgevaranum 1/3, 1/2 ella 2/3 av lønini, treytað av arbeiðsførleikanum hjá løntakaranum.

Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja nakað í § 18a í forsorgarlógini, sum ásetir mark fyri endurrindan av løn. Landsgrannskoðanin heldur, at lógarásett rættindini verða avmarkað við einari leiðbeining uttan beinleiðis heimild í galdandi lóg.

Í oktober 2007 ásannar landsstýrismaðurin, at reglurnar, sum eru ásettar í leiðbeiningini, kundu verið betri orðaðar í lógini, og landsstýrismaðurin fer at taka stig til fáa hesi viðurskiftii rættlag.

Ásetan av endurbúgvingarstuðli

Í § 18 í forsorgarlógini stendur onki um, hvussu endurbúgvingarstuðulin skal verða ásettur, og einki er ásett í kunngerð, hóast heimild er at áseta neyvari reglur um at veita hjálp sbrt. § 18, stk. 6.

Endurbúgvingarstuðulin verður sambært siðvenju Almannastovunnar roknaður út eftir somu prinsippum, sum veiting eftir tørvsmeting sbrt. § 9, stk. 2, í forsorgarlógini.

Landsgrannskoðanin kann viðmerkja, at Løgtingið 25. oktober 2007 samtykti at broyta forsorgarlógina soleiðis, at stuðul til endurbúgving verður roknaður út sbrt. § 9, stk. 2, og at stuðulin ikki er tengdur at ogn umsøkjarans ella inntøku og ogn hjúnafelagans.

Veitingar sambært donsku reglum/ivamál um endurbúgving

Almannastovan hevur í fleiri ár játtað stuðul til endurbúgving í Danmark. Almannastovan sendir skriv til viðkomandi kommunu og biður hana taka yvir og viðgera málið sambært donskum reglum, og rinda viðskiftafólkinum endurbúgvingarstuðul og aðrar viðkomandi veitingar sambært "lov om aktiv socialpolitik". Almannastovan gevur samstundis tilsøgn um at endurrinda kommununi útreiðslurnar.

Endurbúgvingarstuðulin sambært "Aktivloven", nevndur "bruttorevalideringsydelse", verður rindaður *uttan tørvsmeting* og er ein *føst veiting*, ið verður javnað á hvørjum ári.

Almannastovan ásannar, at eingin áseting er í forsorgarlógini ella í kunngerð at veita endurbúgvingarstuðul til føroyingar, ið eru undir endurbúgving í Danmark, uttan tørvsmeting og eftir donskum reglum. Almannastovan vísir á, at henda siðvenja hevur verið, síðani byrjað var at játta endurbúgving í Danmark.

Almannastovan heldur, at onki grundarlag er fyri at biðja donsku kommunurnar umsita málini sambært § 9 í forsorgarlógini. Eisini heldur Almannastovan tað vera rímiligt, at føroyingar, ið flyta til Danmarkar í sambandi við endurbúgving, liva undir somu korum, sum danir, ið eru í somu støðu.

Vit hava víst á, at vit ivast í um:

- stuðul til "Grøn service i udslusningsted for anoreksiramte" ,
- stuðul til uppihald á eftirskúla í Danmark í 6 ár,

kann verða veittur sambært reglunum um endurbúgving. Heldur er talan um aðrar fyriskipanir sambært forsorgarlógini.

Nærri reglur um endurbúgving o.a. sambært § 18 í forsorgarlógini

Meira enn 15 ár eru liðin, síðani vit fyrstu ferð heittu á Landsstýrið um, sambært § 18, stk. 6, at áseta gjøllari reglur um stuðul til endurbúgving o.a.

Nevnast kann, at á fundi í november 1992 millum "Socialministeriet" og Landsstýrið varð avtalað, at allar kunngerðir innan almannaøkið skuldu vera gjørdar í seinasta lagi 1. apríl 1993.

Síðani miðskeiðis í nítiárunum hava skiftandi landsstýrismenn í almanna- og heilsumálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu.

Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir átalað, at landsstýrismaðurin ikki hevur ásett neyvari reglur.

Vísandi til uppskot til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir enn eina ferð, at neyvari reglur ikki vóru ásettar á hesum týðandi øki, har nógvur peningur verður brúktur.

Landsgrannskoðanin heldur, at vantandi reglur er ein orsøk til ivamálini um endurbúgving.

Nevnast kann eisini, at sambært almennu viðmerkingunum til uppskotið um broyting í § 18 í forsorgarlógini, sum Løgtingið samtykti 25. oktober 2007, verður víst á, at Føroya Kærustovnur í sínari viðmerking til lógaruppskotið hevur víst á, at enn vanta greiðar reglur fyri, hvør kann fáa stuðul, og hvørjar treytir skulu vera loknar, og at fyriliggjandi uppskot bøtti ikki upp á støðuna.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin ásannað, at vantandi reglur um endurbúgving er ein orsøk til ivamálini, og vil landsstýrismaðurin taka stig til at orða neyvari reglur um endurbúgving.

8.10 Stuðul til heilivág (GL 2003/2 07 3-11)

Í frágreiðing okkara í februar 2006 umrøddu vit, at viðskiftafólk rinda eitt ávíst egingjald um ársfjórðingin fyri stuðulsheimilaðan heilivág. Í apoteksskipanini verður skrásett, nær viðskiftafólkið hevur rindað egingjaldið.

Sera nógv viðskiftafólk koma síðst í einum ársfjórðingi fyri at "keypa inn undir seg", so teimum ikki nýtist at heinta heilivág komandi ársfjórðing, og harvið sleppa tey undan egingjaldinum í ein ársfjórðing. Sambært Tjaldurs Apoteki er neyðugt at hava eyka starvsfólk til arbeiðis, t.d. millum jól og nýggjár, tí so nógv viðskiftafólk koma eftir heilivági.

Til samanberingar er egingjaldið í Danmark ásett fyri eitt "stuðulsár", sum byrjar, tá viðkomandi fyrstu ferð fær útflýggjað stuðulsheimilaðan heilivág.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið arbeiddi við at broyta stuðulsskipanina, svarandi til donsku og svensku skipanina. Har letur sjúkrakassin eisini stuðul til heilivág, íroknað sertilskot, fyri tær fyrstu umleið 500 kr. um árið (tó 50% fyri fólk undir 18 ár). Stuðulin økist, so hvørt tørvurin á heilivági økist. Endamálið við einari tílíkari skipan er at lata tey, sum nýta lítið av stuðulsheimilaðum heilivági, gjalda meira sjálvi, og heldur nýta ein størri part av samlaða stuðlinum til teirra, sum hava størri tørv.

Henda skipan verður akkumulerað yvir eitt ár. Hvørt viðskiftafólk hevur sítt egna "stuðulsár", sum byrjar frá tí degi, viðkomandi fyrstu ferð keypir stuðulsheimilaðan heilivág, og endar 12 mánaðir seinni. Eitt nýtt "stuðulsár" byrjar so aftur, fyrstu ferð viðskiftafólkið keypir stuðulsheimilaðan heilivág, eftir at gamla "stuðulsárið" er endað. Landsstýrismaðurin helt, at soleiðis slapst undan trupulleikanum, at fólk keyptu inn undir seg.

Í desember 2005 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið við at umleggja alla stuðulsskipanina var eitt størri arbeiði, sum enn var í gongd. Ætlanin var, at nýggja skipanin skuldi virka einaferð í 2006.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein broyting í K. nr. 100/1999 skuldi koma í gildi 1. oktober 2005, soleiðis at stuðul bert varð veittur til heilivág, ið fekk stuðul frá sjúkrakassunum. Tað vísti seg tó, at ávísir sjúklingar fingu stuðul eftir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini til lívsneyðugan dýran heilivág, ið ikki fekk stuðul frá sjúkrakassa. Varð broytingin framd, hevði tað fingið sera óhepnar fylgjur fyri hesar sjúklingar. Hesin trupulleiki hevði gjørt arbeiðið at broyta kunngerðina torførari, men tað bleiv í løtuni kannað, hvussu tað kundi verða gjørt.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at *"málið er tíverri enn ikki búgvið til at fremja ætlaðu broytingina í kunngerðini."*

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at einki er hent í málinum.

8.11 Gjald fyri heimahjálp í sambandi við umlætting (GL 2004/2 07 4-14)

Í frágreiðing okkara í februar 2006 vístu vit á, at ymiskt er, hvussu nógv pensjónistar skulu rinda fyri heimahjálp í sambandi við umlætting.

Pensjónistur, sum hevur aðra inntøku enn fólkapensjónina, skal rinda fyri heimahjálp alt eftir, hvussu stór inntøkan er. Sambært K. nr. 139 frá 13. desember 2005 "um broyting í kunngerð um heimahjálp" er frá 1. januar 2007 hægsta gjaldið, sum pensjónisturin kann koma at rinda, kr. 146 um tíman, tó verður í mesta lagi rindað fyri 30 tímar um mánaðin.

Fer sami pensjónistur til umlættingar á eldrasambýli hjá landinum ella kommununi, skal hann rinda fult tímatal fyri heimahjálp, meðan hann er á sambýlinum, uttan mun til, hvussu nógvar tímar hann frammanundan rindaði fyri. Tó er hægsta gjaldið fyri heimahjálp í 6 vikur (42 dagar) ásett til kr. 6.570 (kr. 146x45).

Fer pensjónisturin til umlættingar á ellisheimi ella á røktarheimi í 6 vikur, rindar hann harafturímóti einki fyri heimahjálp.

Pensjónistur, ið frammanundan rindar fyri heimahjálp, hevur sostatt stóran fyrimun av at fara til umlættingar á ellis-/røktarheimi, heldur enn á eldrasambýli. Landsgrannskoðanin ivast í, um hesin munur kann vera tilætlaður, serliga tá hugsað verður um, at tað í nógvum førum er sama tænasta, ið verður veitt á einum ellisheimi, sum í einum eldrasambýli.

Í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hesin munur ikki hevur verið tilætlaður.

Í august 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at frá 7. mars 2007 er kunngerðin um heimahjálp broytt. Broytingin hevur við sær, at goldið verður ikki fyri heimahjálp, tá pensjónistur fer til umlætting.

8.12 Almannapensjón á stovnum (GL 2004/2 07 4-14)

Í § 4, stk. 1-2, í Ll. nr. 108/1999 "um uppihald á stovni. o.l" v.s.b. er ásett:

> *"Hjá pensjónistum, sum fáa varandi uppihald á góðkendum røktar- ella ellisheimum ella øðrum varandi staði, sum kann sammetast við eitt røktar- ella ellisheim, lækkar pensjónin við endan av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin, pensjónisturin fær uppihald á viðkomandi heimi.*
>
> *Stk. 2. Ein upphædd verður varðveitt til rindan av útreiðslum til persónliga tørv pensjónistsins."*

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið "um uppihald á stovni o.l." (Lm. nr. 25/1999) stendur m.a.:

> *"Almanna- og Heilsumálastýrið arbeiðir víðari við ætlanini um, at øll fólk skulu varðveita pensjónina. Ætlanin er at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið til støðutakan, so skipanin kann koma at virka frá ár 2001."*

Í oktober 2004 spurdu vit landsstýrismannin, nær eitt tílíkt lógaruppskot væntandi fór at verða lagt fyri Løgtingið.

Í mars 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at *"spurningurin um at varðveita pensjónina, tá ein fær varandi uppihald (meira enn 6 mánaðir) á stovni hevur fyrr verið umrøddur, og er landsstýrismaðurin til reiðar at taka málið uppaftur til politiska støðutakan í samgonguni. Tað er óvist, nær eitt uppskot kann leggjast fyri Løgtingið."*

Landsstýrismaðurin hevur síðani fleiri ferðir, seinast í september 2007, boðað frá, at einki ítøkiligt er hent í málinum.

Eftir svarunum frá landsstýrismannin at døma hevur hann ongar ætlanir um at endurskoða lógina um uppihald á stovni.

8.13 Heimatænastan (GL 2004/2 07 4-15)

Í frágreiðing okkara í februar 2006 umrøddu vit grannskoðanina av roknskapar- og lønarviðurskiftunum innan Heimatænastuna (Heimarøktina), umsitingina av gjaldi fyri heimahjálp og nýggju visitatiónsskipanina. Í juni 2006 vitjaðu vit Suðurstreymoyar øki og kunnaðu okkum gjøllari um, hvørjar ábøtur eru framdar, og hvussu støðan er í dag.

Roknskaparreglugerð

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Heimatænastan í november 2004 hevði sett eitt starvsfólk at endurskoða roknskaparreglugerðirnar.

Í juni 2006 kunnaði Meginskrivstovan um, at nýggjar roknskaparreglugerðir fyri stovnarnar undir Heimtænastani í mars 2006 vóru sendar Almanna- og Heilsumálaráðnum at góðkenna.

Í desember 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at roknskaparreglugerðirnar væntandi vórðu góðkendar 1. februar 2007.

Í august 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at miðað verður ímóti, at fáa roknskaparreglugerðirnar endaliga góðkendar innan árslok 2007.

Kunngerð um heimahjálp

Í K. nr. 101/2000 "um heimahjálp" var ikki ásett, hvussu gjøldini skulu verða eftirroknað, hvussu gjøldini skulu verða javnað, og hvørjar inntøkur inntøkugrundarlagið skuldi fevna um. Í mars 2004 mæltu vit landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða kunngerðina.

Við K. nr. 139 frá 13. desember 2005 varð kunngerðin broytt. Í § 8a er nú ásett: *"Landsstýrismaðurin ásetir javnaðu gjøldini í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum í seinasta lagi 1. januar á hvørjum ári, fyrstu ferð 1. januar 2007."*

Um inntøkugrundarlagið er í § 8, stk. 2, nú ásett: *"Inntøkugrundarlagið verður roknað sambært ásetingunum um hetta í løgtingslóg um almannapensjónir."*

Landsgrannskoðanin ivast í, um henda orðing er nóg neyv, m.a vísandi til ásetingina í § 20, stk. 5, í almannapensjónslógini: *"Ein frádráttur verður gjørdur í inntøkugrundarlagnum sambært stk. 1-4."*

Í august 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at § 8a í kunngerðini er strikað, og § 8, stk. 2, er broytt til: "*Inntøkugrundarlagið verður roknað sambært ásetingunum um hetta í § 20, stk. 1-4 í løgtingslóg um almannapensjónir.*"

Sambært landsstýrismanninum skuldu øll ivamál, hvørjar inntøkur inntøkugrundarlagið skal fevna um, nú verið beind burtur.

8.14 Trivnaðartænastan (GL 2004/2 07 4-16)

Í frágreiðing okkara í februar 2006 umrøddu vit grannskoðan av Trivnaðartænastuni (Serforsorgini). Tørvur var á at bøta um viðurskiftini á fleiri økjum. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

Roknskaparviðurskifti

Í februar 2005 vístu vit á, at eftir okkara tykki eru roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar ikki væl greinaðar og lýstar í roknskaparreglugerðini. Í fleiri førum er ikki greitt, hvørji starvsfólk hava ábyrgdina av arbeiðsuppgávunum, og í roknskaparreglugerðini er ikki í nóg stóran mun tikið fyrilit fyri, at roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar hjá stovnunum eru ymiskar.

Vit mæltu til:

at gera eina roknskaparreglugerð fyri hvønn bústovn/sambýli/verkstað sær,

at lýsa roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar betur,

at lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi inntøkum betur,

at greiða frá um journalskipanarreglur, trygdaravrit o.t., og

at lýsa mannagongdirnar viðvíkjandi vørugoymslum hjá verkstøðum.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Serforsorgin í november 2004 hevði sett eitt starvsfólk at endurskoða roknskaparreglugerðirnar.

Í juni 2006 kunnaði Meginskrivstovan um, at nýggjar roknskaparreglugerðir fyri stovnarnar undir Serforsorgini í mars 2006 vórðu sendar Almanna- og Heilsumálaráðnum at góðkenna.

Í desember 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at roknskaparreglugerðirnar væntandi fóru at verða góðkendar um ársskiftið 2006/2007.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at roknskaparreglugerðirnar væntandi fara at verða góðkendar í ár (2007).

Ognaryvirlit

Í februar 2005 mæltu vit m.a. til at dagføra og menna ognaryvirlitini.

Í juni 2006 boðaði Meginskrivstovan frá, at stovnarnir á oyðublað føra yvirlit yvir ognirnar, men at teir eru ikki farnir undir at skráseta størri edv-útbúnað, innbúgv og aðrar størri ognir í skipanini hjá Gjaldstovuni.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Nærverkið hevur fingið yvirlit yvir størri ognir frá stovnunum innan Nærverkið og hevur sent oyðubløðini til skrásetingar hjá Gjaldstovuni. Nærverkið fer at skráseta størri ognir á Meginskrivstovuni í næstum. Talan er serliga um edv-útbúnaðin.

Peningastovnskontur/kassar

Í sambandi við grannskoðanini í 2004 varð staðfest, at á einum verkstaði varð kassin ikki stemmaður av mótvegis skrásettu fíggjarstøðuni í bókhaldinum, sum ikki stemmaði við kassauppgerðina. Kontan hevði ikki verið røtt í áravís.

Í juni 2006 boðaði Meginskrivstovan frá, at torført var at stemma av, tí talan var um gamlar saldur frá 1999/2000.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Nærverkið fer aftur at venda sær til Gjaldstovuna fyri at fáa saldurnar avskrivaðar.

Gávukonta

Í sambandi við grannskoðanina í 2004 varð staðfest, at á tveimum verkstøðum var eingin reglugerð fyri gávukontuna.

Í juni 2006 boðaði Meginskrivstovan frá, at hon hevði sent málið til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Í september 2007 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Nærverkið hevði vent sær til Gjaldstovuna fyri at kanna, um nøkur reglugerð fanst fyri gávukontur fyri almennar stovnar. Eingin tílík reglugerð er.

Eftir hesum at døma hava hvørki Nærverkið ella Almanna- og Heilsumálaráðið ætlanir um at gera reglugerð fyri gávukonturnar.

8.15 Føroyingar á stovni í Danmark o.a. (GL 2004/2 07 4-16)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2004 umrøddu vit grannskoðanina av útreiðslum viðvíkjandi føroyingum á stovni í Danmark o.a. Niðanfyri verður kunnað um, hvat síðani er hent.

Endurgjald fyri pensjón til føroyingar á stovnum í Danmark

Árligu endurgjaldsútreiðslurnar liggja um 1 mió.kr. Landið hevur endurrindað hesar útreiðslur síðani 1995. Sambært viðmerkingunum til "Lov nr. 315 af 17. maj 1995 om sociale ydelser på Færøerne" endurrindar landskassin donskum kommunum pensjónsútreiðslur fyri føroyingar á stovni í Danmark. Talan er um 10 fólk, hóast eini 30 fólk eru á stovni í Danmark.

Í januar 2003 svaraði landsstýrismaðurin, at hann helt ikki, at viðmerkingar til eitt danskt lógaruppskot var nóg haldgott grundarlag at játta pening á løgtingsfíggjarlógini. Hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Sambært § 54 í "Lov nr. 217 af 16. maj 1984 om social pension" við seinni broytingum og "Lov nr. 1164 af 19. december 2003 om højeste, mellemste, forhøjet almindelig og almindelig førtidspension m.v" við seinni broytingum:

> *"Fastsætter Socialministeren efter aftale med Færøernes landsstyre regler om afholdelse af udgifter til pension efter denne lov til personer, der på foranledning af færøske sociale myndigheder får ophold i Danmark, og om afholdelse af udgifter til pension til personer, der fra Danmark får ophold på Færøerne formidlet af danske sociale myndigheder."*

Reglurnar eru ikki ásettar.

Í januar 2003 boðaði landsstýrismaðurin frá, at samráðingar vóru farnar í gongd millum "Socialministeriet" og Almanna- og Heilsumálaráðið um at áseta reglurnar.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann, við verandi starvsfólkaorku, hevði valt at raðfesta aðrar átrokandi uppgávur framum.

Í februar 2006 og aftur í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki var hent í málinum.

Eftir hesum at døma hevur landsstýrismaðurin ongar ætlanir um at samráðast við "Socialministeriet" um at áseta reglur.

Ferðaútreiðslur til viðskiftafólk og avvarðandi

Sambært skjali A í "Lov nr. 717 af 18. november 1987 om tilskud til Færøernes hjemmestyre på det sociale område" skal landskassin, frá 1. januar 1988, rinda ferðaútreiðslur til føroyingar á stovni í Danmark og avvarðandi teirra.

Útreiðslurnar árini 2001 - 2006 hava ligið úr 44 t.kr. í 81 t.kr.

Ongar reglur eru fyri, hvussu játtanin skal verða umsitin, t.d. um skjalprógv, ella hvussu ofta um árið viðskiftafólk kunnu ferðast.

Í mai 2002 mæltu vit Serforsorgini til at áseta neyvari reglur.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at heita á Serforsorgina um at áseta neyvari reglur.

Í februar 2006 og aftur í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki var hent í málinum.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at avvarðandi hvørja ferð søkja Nærverkið um stuðul til at vitja viðskiftafólk á stovni í Danmark. Nærverkið játtar skrivliga eina ferð um árið, á bíligasta hátt, aftur og fram til Danmarkar. Avvarðandi letur ferðaskrivstovuni játtanarskrivið, og rokningin verður send Nærverkinum at rinda.

Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk

Sambært skjali A í "Lov nr. 717 af 18. november 1987 om tilskud til Færøernes hjemmestyre på det sociale område" skal landskassin frá 1. januar 1988 rinda útreiðslur viðvíkjandi "klienter under ekstern forsorg".

Talan er um viðbót til foreldur, ið heima forsyrgja barni/børnum við víðfevndum likamligum ella sálarligum breki. Viðbótin verður veitt fyri eykaútreiðslur og stríð, ið stendst av brekinum. Almannastovan ger av, hvør skal hava viðbót, og gevur Serforsorgini boð um at rinda upphæddina.

Í 2001 var viðbótin kr. 2.000 um mánaðin fyri hvørt barnið, og rindað varð fyri 11 børn. Útreiðslurnar árini 2001-2006 hava ligið úr 64 t.kr. í 264 t.kr.

Sambært § 17 í forsorgarlógini kann hjálp til meirútreiðslur verða veitt foreldrum við brekaðum børnum. Vit duga ikki at síggja, hví viðbótin skal verða rindað júst hesum foreldrum, ella um veitingin sampakkar við § 17.

Í fylgiskjølum til løgtingsfíggjarlógaruppskotið fyri 1992 vísti Almannastovan m.a. á, *"at henda játtan er ein leivd frá tíðini í donsku umsitingini, og finst hon ikki aðrastaðni."* Landsgrannskoðanin hevur víst á, at eingin heimild er í almannalóggávuni at rinda hesar útreiðslur.

Í januar 2003 segði landsstýrismaðurin seg vera samdan við Landsgrannskoðanini, og hann fór tí at útvega sær neyðuga lógarheimild.

Í apríl 2005 boðaði landsstýrismaðurin frá, at síðani 1990 hevði eingin tilgongd av persónum verið á hesari kontu, og í 2008 fór útreiðslan at falla burtur. Sambært landsstýrismanninum fór heimildarspurningurin at verða tikin upp í sambandi við, at forsorgarlógin fór at verða dagførd.

Í februar 2006 og aftur í september 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at einki var hent í málinum.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann fer at heita á Almannastovuna um, í samstarv við Trivnaðartænastuna, at endurskoða tey fáu málini, ið eftir eru, við tí fyri eygað bert at veita stuðulin eftir § 17 í forsorgarlógini.

8.16 Hjálpartólamiðstøðin (GL 2004/2 07 4-17)

Roknskaparviðurskifti

Í frágreiðing frá mars 2004 kunnaðu vit um grannskoðan okkara av roknskaparviðurskiftunum á Hjálpartólamiðstøðini, har vit mæltu til fleiri ábøtur, m.a.:

at greiða gjøllari frá í roknskaparreglugerðini um KT-skipanir og um KT-trygd. Í desember 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at vegna vantandi starvsfólkaorku var einki gjørt.

at samstarva við Heimatænastuna (Heimarøktina) fyri at fáa skrásett hjálpartól, ið eru lænt út. Í desember 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at vegna vantandi starvsfólkaorku var einki gjørt.

Í juni 2006 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin:

- um stovnurin lýkur treytirnar í rundskrivi frá Vinnumálaráðnum 22. desember 2004 "um KT-trygd". Vit fingu einki svar.
- hvørjar ætlanir eru um at skráseta hjálpartólini. Vit fingu einki svar.

Í juni 2007 settu vit landsstýrismanninum spurningarnar av nýggjum.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá:

at alt KT-kervið á Hjálpartólamiðstøðuni verður í næstum lagt undir KT-kervið hjá Almannastovuni, og væntar Almannastovan, at stovnurin kemur at røkka langt í inniverandi ári við at lúka treytirnar um KT-trygd.

at støðan er óbroytt. Hjálpartólamiðstøðin hevur ikki orku at fara undir at skráseta øll tey hjálpartól, sum eru heima hjá borgarunum, og sum ikki er skrásett. Hjálpartólamiðstøðin skrásetur tó øll tól, ið nú fara út.

8.17 Studningur til ALV (GL 1998/2 07 5-1)

Yvirskotsgjaldføri

Í november 2005 kannaði Landsgrannskoðanin roknskapirnar hjá ALV árini 2003 og 2004. Sambært roknskapunum hevði stovnurin í 2004 og 2003 avlop, ávikavist 680 t.kr. og 398 t.kr., tilsamans 1,1 mió.kr. fyri tann partin av virkseminum (Smiðjugerði), sum landið letur studning til.

Í roknskapinum er ein samlað fíggjarstøða. Í tíðarskeiðinum 2003 - 2004 er "eginognin" fyri samlaða ALV-virksemið vaksin við 1,3 mió.kr., til 2,2 mió.kr., og sæst tað aftur í øktum innistandandi í peningastovnum. Avlopið av studningsjáttanini tykist sostatt verða nýtt til at samla upp pening.

Í januar 2006 svaraði landsstýrismaðurin, at hann hevði ongar ætlanir um, at ALV skuldi savna saman almennan pening í tann mun, sum gjørt var, og hann fór at taka málið upp við stýrið fyri ALV.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann fór at hava fund við stýrið og leiðsluna fyri ALV, og fór at umrøða málið viðvíkjandi uppsavnan av almennum peningi.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann arbeiðir framvegis við málinum.

Játtanarslag

Á fíggjarlógini 2002 varð játtanin til ALV hækkað úr 350 t.kr., í 4,8 mió.kr. Landsgrannskoðanin helt í juli 2002, at út frá einum eftirlitssjónarmiði var sera óheppið, at landið veitir ein so stóran árligan studning sum "onnur játtan" uttan aðra lógarheimild enn fíggjarlógina. Landið fíggjar so at siga allan raksturin av hesum virksemi, og um játtanin verður tikin við á fíggjarlógina sum ein "rakstrarjáttan", kemur ALV undir at kalla somu játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglur, sum galda fyri landsstovnar.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálaráðið "*í løtuni*" arbeiðir við einari arbeiðsætlan fyri møguliga at broyta játtanina til rakstrarjáttan.

Á løgtingsfíggjarlógini 2007 er játtanarslagið framvegis ein studningsjáttan (onnur játtan). Sum víst á frammanfyri, er tað eitt játtanarslag, sum er óvanligt fyri tílíkar stórar játtanir.

Í áliti sínum til løgtingsfíggjarlógina 2007 helt Fíggjarnevndin, at ALV nú fær so stóran stuðul, at landsstýrismaðurin eigur at umskipa játtanina til eina rakstrarjáttan.

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at hann arbeiddi framvegis við málinum.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2008 er játtanarslagið aftur ein studningsjáttan, og eftir ætlanini skal játtanin í 2009 hækka til 7,1 mió.kr.

8.18 Sjúkrakassar (GL 2001/2 08 3-1)

Vantandi ásetan av reglum

Í frágreiðing okkara í februar 2002 vístu vit á, at sambært § 22, stk. 2 - 4, í sjúkratryggingarlógini kann Landsstýrið áseta neyvari reglur um ávís viðurskifti, og sambært § 25 er álagt Landsstýrinum at seta neyvari reglur fyri eftirliti við rindan av limagjaldi.

Á hvørjum ári síðani hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at arbeitt verður við nýggjari lóggávu, sum ætlanin er at leggja fyri Løgtingið. Eftir hesum at døma hava ongar ætlanir verið um at áseta reglur sambært galdandi lóg.

Í juli 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið hevur tikið longri tíð enn upprunaliga mett. Landsstýrismaðurin ætlar at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið fyrst í komandi tingsetu (2007/08).

Eftirlit, grannskoðan o.a.

Sambært § 32 í sjúkratryggingarlógini hevur Almannastovan eftirlit við sjúkrakassunum, og sambært § 35, stk. 7, *"skal der med passende mellemrum ved Almannastovans foranstaltning foretages en indgående lokalrevision i enhver sygekasse, herunder undersøgelse af kassens regnskabsvæsen og øvrige virksomhed. Ved samme lejlighed skal der ydes kasserne regnskabsmæssig og anden vejledning. Den nærmere ordning af denne revision fastsættes af Almannastovan."*

Vit vístu í 2002 á, at Almannastovan regluliga grannskoðaði sjúkrakassarnar, men at arbeiðið varð ikki skjalprógvað, og eingin grannskoðanarfrágreiðing varð gjørd. Almannastovan hevði ikki ásett neyvari reglur fyri grannskoðan sambært § 35, stk. 7.

Tá ið sjúkratryggingarlógin áleggur Almannastovuni at útinna grannskoðan og seta neyvar reglur, var støðan eftir okkara tykki ikki nøktandi.

Á hvørjum ári síðani hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at sambært uppskotinum til nýggja sjúkratryggingarlóg, fer eftirlitsuppgávan at verða flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Í 2006 fór Almannastovan undir at skjalprógva grannskoðanina og gera innanhýsis grannskoðanarfrágreiðing.

8.19 Ymiskar heilsuskipanir (GL 2005/2 08 3-3)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 umrøddu vit útreiðslurnar til:

- koppsetingar
- kunning um gitnaðarfyribyrging
- heilsukanningar av barnakonum
- læknakanningar av børnum

Samsýning til kommunulæknar

Sambært lógunum eru samsýningarnar tær somu, sum galda í Danmark. Samsýningarnar eru sambært sáttmála millum "Sygesikringen og Praktiserende Lægers Organisation".

Eftir avtalu í november 1998 millum Almanna- og Heilsumálaráðið og Kommunulæknafelag Føroya verða samsýningarnar javnaðar við føroyska prístalinum sambært § 80 í sáttmálanum millum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelagið, og ikki sambært donsku reglunum.

Vit vístu á, at smærri munir eru millum tær føroysku og donsku samsýningarnar. Talan er ikki um stórar upphæddir, men rindað verður ikki sambært lógini.

Í august 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur undirskrivað avtalu um gjald fyri fyribyrgjandi kanningar og koppsetingar, sum førir við sær, at frá 1. oktober 2006 verða samsýningar goldnar sambært sáttmála millum "Sygesikringen og Praktiserende Lægers Organisation.".

Nýtt lógargrundarlag

Lógargrundarlagið fyri koppsetingar, upplýsing um gitnaðarfyribyrging og heilsukanningar av barnakonum eru danskar lógir frá fyrst í áttatiárunum.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1994 varð avtalað, at Landsstýrið í seinastu lagi ultimo 1995 skuldi leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslógir á øllum almanna- og heilsuøkinum.

17. mai 1995 kom í gildi "Lov om sociale ydelser på Færøerne" og "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne". Talan er um rammulógir, sum áleggja/heimila heimastýrinum at lóggeva á almanna- og heilsuøkinum. Sambært rammulógunum verða gomlu donsku almanna- og heilsulógirnar í gildi, til nýggjar løgtingslógir loysa tær av.

Undir samráðingunum við donsku stjórnina í november 1995 varð m.a. avtalað, at: *"Landsstyret bekræfter, at der vil blive fremsat forslag om udfyldende lovgivning vedrørende social- og sundhedsområdet i henhold til vedlagte tidsplan. Det er landsstyrets ansvar at sikre gennemførelsen af denne lovgivning i Lagtinget til ikrafttrædelse senest ved udgangen af lagtingssamlingen 1996/97."* Í avtaluni við donsku stjórnina í juni 1998 vórðu tíðarfreistirnar aftur broyttar.

Í august 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at uppskot til løgtingslóg um ókeypis koppsetingar, sum skal avloysa donsku lógina, væntandi verður lagt fyri Løgtingið tíðliga á heysti 2007.

Sambært landsstýrismanninum verður galdandi danska kunngerðin tó í gildi óbroytt, til allar fyrireikingar av skipanini við ókeypis koppseting móti influensa til øll eldri enn 66 ár er klár at seta í verk. Tá er ætlanin, at ein nýggj føroysk kunngerð verður sett í gildi, sum skal avloysa ta donsku. Landsstýrismaðurin hevur somuleiðis í hyggju at víðka um barnakoppsetingarskránna við koppseting móti pneukokkum, ið kunnu elva til meningitis. Enn er ikki greitt, nær henda skipan er klár at seta í verk.

Landsstýrismaðurin hevur ikki ætlanir um at fara undir at gera aðrar føroyskar lógir á hesum øki í hesum valskeiðnum.

8.20 Fyribyrgingarráðið (GL 2005/2 08 3-3)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 umrøddu vit roknskapar- og lønarviðurskiftini í Fyribyrgingarráðnum. Í frágreiðingini mæltu vit til:

1. at gera eina roknskaparreglugerð samsvarandi rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum. (Almanna- og Heilsumálaráðið hevur fingið uppskotið til reglugerð í oktober 2006).
2. at fáa húsaleigusáttmálan góðkendan av Fíggjarmálaráðnum.
3. at dagføra ognaryvirlitið.
4. at fylgja mannagongdunum um mánaðarligu góðkenningina av roknskapinum.

Í august 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um:

1. *at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur fingið nýtt uppskot til roknskaparreglugerð.*
2. *at Fyribyrgingarráðið er flutt í høli hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum.*
3. *at ognaryvirlitið er dagført.*
4. *at Fyribyrgingarráðið arbeiðir við at gera innanhýsis mannagongdir, so mannagongdin um mánarligu góðkenningina verður fylgd í framtíðini.*

9 Fylgiskjal I: Upprit um umsiting av stuðulsjáttanum undir Mentamálaráðnum

10 Fylgiskjal II: Upprit um stuðul til privatar skúlar

11 Fylgiskjal III: Spurnablað til stovnar